| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>02. mars 2017 | Blað nr.: 1<br>Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 02. mars 2017 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:**

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen

**LUTTÓKU EISINI:**
Ingunn Eiriksdóttir
Sigurð Vang
Anna Havmand

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>02. mars 2017 | Blað nr.: 2 |
| | Formansins merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 61/17 | 17/00041-1 | Mál beind í nevndir 2017 | 4 |
| 62/17 | 14/02332-6 | Umskiping og umbygging av bátahylinum á Argjum | 5 |
| 63/17 | 16/00212-1 | Bátahylur við Sjógv. Umlegging frá teymum til bátabrúgvar | 7 |
| 64/17 | 17/00464-1 | Bátadráttur í Álakeri | 9 |
| 65/17 | 17/00174-1 | Uppskot til broyting av kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu | 11 |
| 66/17 | 16/03366-1 | Søla av grundstykkjum á Hamrabø í Kollafirði | 31 |
| 67/17 | 16/04202-2 | Umsókn um keyp uml. 66 fermetrar av matr. nr. 853aa, at leggja saman við matr. nr. 853c, Tórshavn. Umsøkjari Bogi Beck Jensen. | 33 |
| 68/17 | 16/02243-2 | Umsókn at leiga ein part av økinum vestan fyri Vágsbotn 14, matr. nr. 190, Tórshavn | 35 |
| 69/17 | 15/02355-4 | Bústaðir : Umsókn um keyp av ovara parti av matr. 1464a, – ætlan at byggja vardar íbúðir á 1464i, Tórshavn – Berjabrekka 3 | 37 |
| 70/17 | 17/00163-1 | Pant í matr. nr. 1456a, Tórshavn eigarar Anna Dalsgaard, Ása, Ólavur og Tórhild Justinussen | 41 |
| 71/17 | 14/03408-18 | Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064) | 42 |
| 72/17 | 14/00218-2 | Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan | 53 |
| 73/17 | 14/04448-33 | Deksbáturin Fram TN2 | 61 |
| 74/17 | 17/00586-1 | Fyrireikandi verkætlan at byggja eldrabústaðir | 65 |
| 75/17 | 16/01711-1 | Vatnrussjibani vm. til Svimjihøllina í Gundadali | 68 |
| 76/17 | 16/00962-1 | Tórsvøllur - vestursíðan | 72 |
| 77/17 | 15/01400-1 | Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl | 76 |
| 78/17 | 16/02171-45 | Forkanningar : Nýtt tyrvingarpláss (2003-2242) | 80 |
| 79/17 | 16/01724-1 | Átak parkeringspolitikkur - Parkeringsloyvir til íbúgvar í miðbýnum | 87 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 80/17 | 17/00345-2 | Keyp av lendi til Á-handil við Landavegin | 91 |
| 81/17 | 15/01335-38 | Tórshavnar Musikkskúli - staðseting av musikkskúlanum | 93 |
| 82/17 | 14/00896-7 | Víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki | 113 |
| 83/17 | 16/04149-2 | Uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini | 125 |
| 84/17 | 17/00371-1 | Broyting av ásetingum fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini | 129 |
| 85/17 | 14/00772-13 | Bygginevndin fyri Hoyvíkar kirkju- kirkjugarður í Hoyvík (2007-2036) | 131 |
| 86/17 | 16/01498-2 | Íbúgvar norðuri í Sundum : Umsókn um stuðul til nýggjan sparkivøll og dagføring av verandi spæliplássi. | 138 |
| 87/17 | 16/02938-5 | Umsókn um fíggjarligan stuðul til ábøtur á spæliplássið á Velbastað | 139 |
| 88/17 | 17/00303-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2017 | 140 |
| 89/17 | 16/01873-1 | Fíggjarætlan 2017 | 141 |
| 90/17 | 17/00812-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í eldranevndina | 154 |
| 91/17 | 16/04611-1 | Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í vinnunevndina | 155 |

***61/17 Mál beind í nevndir 2017***

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 42/17 | 17/00041-1 |
| 2 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 61/17 | 17/00041-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

# 62/17 Umskiping og umbygging av bátahylinum á Argjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 13.02.2017 | 2/17 | 14/02332-6 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 16/17 | 14/02332-6 |
| 3 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 62/17 | 14/02332-6 |

**Málslýsing:**

Gott 300 fólk standa á bíðilista til bátapláss í Tórshavn og á Argjum. Tað er trupult at meta um hvussu nógv av teimum, sum standa á bíðilistanum, høvdu tikið av einum tilboði um bátapláss.
Ymiskir møguleikar at fáa fleiri bátapláss hava verið kannaðir.
Hesar ætlaninar eru lutfalsliga dýrar, tí neyðugt er at byggja nýtt grótkast.

Í sambandi við møguliga bygging av bátahyli á Sundi, blivu 270 spurnarbløð send út umsøkjarar av bátaplássi. Av teimum 270 svaraðu 8o at tey høvdu tikið av, um tað stóð teimum í boði at fáa eitt bátapláss á Sundi..

Møguleikin at umskipa verðandi bátahyl á Argjum eru kannaðir, og ber til at fáa umleið 70 bátaplás afturat. Hetta kann gerast við at burturbeina verðandi fasta mola inni í hylinum, og síðani leggja 170 m av flótibrúgvum í hylin. Hetta ger at vit fáa 100 nýggj pláss við flótibrúgvarnar, meðan talið av teymum verður minkað við 30.

Samlaði kostnaðurin er mettur til tkr. 5.060,-

Arbeiðið er deilt upp í fleiri smærri enterprisur, so sum burturbeining av mola, fundament til brúgvar, el, kavaraarbeiði o.s.v. Hesi arbeiðini verða gjørd av smærri veitarum.

Nógv tann størsti parturin av kostnaðinum er til flótibrúgvar, bummar, landgongdir, ketur o.a. Fólk hjá Tórshavnar havn hava royndir at standa fyri, og at gera hesi arbeiðir.

Ætlanin skal fíggjast av íløgukonto 7476 smábátahavnir.

Kontan er í dag disponerað soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 7476 L00001 | Íløgukarmur | 750.000 |
| 7476 L74001 | Brimgarður á Argjum | 670.000 |
| 7476 L74002 | Útbúnaður á bátaøkinum | 3.642.742 |
| 7476 L74003 | Bátapláss Gomlurætt | 24.000 |
| 7476 L74004 | Bátahylur á Sundi | 1.000.000 |
| | | 6.086.742 |

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:**
Mælt verður til at játta t.kr 5.060,- til endaliga liðugtgerð av arbeiðinum, at fíggja av íløgukonto nr. 7476 smábátahavnir, soleiðis at kontan verður disponera soleiðis:

| | |
|---|---|
| Umskiping/umbygging av bátahylinum á Argjum: | 5.060.000 |
| Útbúnaður á bátaøkinum: | 1.026.742 |
| | 6.086.742 |

**Vinnunevndin 21. mai 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við vinnunevndini.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin umskiping og umbygging av bátahylinum á Argjum, skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest eitt avlop upp á kr. 1.088.000.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Vinnunevndin 13. februar 2017: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.**

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017: Samtykt og at beina málið í býráðið.**

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

# 63/17 Bátahylur við Sjógv. Umlegging frá teymum til bátabrúgvar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 01.02.2016 | 3/16 | 16/00212-1 |
| 2 Kollafjarðarnevndin | 08.02.2016 | 6/16 | 16/00212-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 71/16 | 16/00212-1 |
| 4 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 67/16 | 16/00212-1 |
| 5 Vinnunevndin | 29.11.2016 | 42/16 | 16/00212-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 431/16 | 16/00212-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 14/17 | 16/00212-1 |
| 8 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 63/17 | 16/00212-1 |

**Málslýsing:**
Í bátahylinum við Sjógv eru í dag 54 teymar, ongin er á bíðilista og onki pláss er tókt.

Tað hevur leingi verið eitt ynski frá báteigarunum, at fáa umlagt bátaplássini frá teymum til flótibrúgvar, sum er ein munandi høgligari og tryggari loysn.

Í miðjuni í bátahylinum er ein timburbrúgv, sum er í vánaligum standi.

Um timburbrúgvin, sum er í hylinum, verður tikin burtur, er pláss fyri tveimum flótibrúgvum, har tað kunnu liggja 64 bátar, tað eru 10 fleiri enn nú.

Um brúgvarnar verða á umleið sama støði, sum nýggju brúgvarnar á Argjum ið eru útgjørdar við el steyrum, ljósi og vatni, er samlaði kostnaðurin kr. 3.190.000,-.

Tórshavnar havn hevur áður staðið fyri innkeypi og útlegging av bátabrúgvum, við hjálp frá undirveitarum.

Tað er Tórshavnar kommuna, sum rindar fyri íløgur í bátapláss.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka støðu til, um íløgan skal gerast. Um íløgan skal gerast, verður mælt til at játta kr. 3.190.000,- til arbeiðið.

**Vinnunevndin 01. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Kollafjarðarnevndin 08. februar 2016:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 3.190.000 av konto 7476, smábátahavnir og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið í bátahylinum í Kollafirði, at umleggja frá báteteymum til bátabrúgvar, er liðugt.

Sambært byggiroknskapinum kostaði arbeiðið kr 2.940.760,-

Nú arbeiðið er liðugt, er tað eitt stórt ynski frá bátaeigarunum á staðnum, at gera ein nýggjan bátadráttur, ístaðin fyri tann gamla. Kostnaðurin fyri hetta arbeiðið er 400.000 kr.

Tað hevði bøtt nógv um innsiglingina til tann vestara partin av bátahylinum, um nakað av gróti, sum liggur í innsiglingini, hevði blivið burturbeint. Hetta hevði eisini bøtt um umstøðurnar hjá alarunum, sum liggja har tá veðrið er ringt. Kostnaðurin fyri hetta arbeiðið er 40.000 kr.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Eftir av játtan til bátahylin: | | 249.240 | |
| Kostnaður bátadráttur | 400.000 | | |
| Kostnaður burturbeining av gróti | 40.000 | | |
| Óvantað | 20.000 | | |
| Meirjáttan | 460.000 | 249.240 | **210.760** |

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til at taka støðu til, um íløgan skal gerast í bátadrátt og burturbeining av gróti, og um játtast skulu 210.760 kr, av konto 7476 bátahavnir.

**Vinnunevndin 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

# 64/17 Bátadráttur í Álakeri

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 13.02.2017 | 5/17 | 17/00464-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 15/17 | 17/00464-1 |
| 3 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 64/17 | 17/00464-1 |

**Málslýsing:**
Tað hevur í nógv ár verið eitt ynski frá báteigarum, at tað var møguligt at taka bátar upp eftir einum bátadrátti í Tórshavn.
Tað er bátadráttur í bátahylinum á Argjum, men hesin er ikki egnaður til størri bátar
Í Tórshavn og á Argjum eru umleið 500 bátar, og um størri bátar skulu upp á land í kommununi, máa teir hivast við kranabili.

Um drátturin skal vera í Tórshavn, er Álaker helst rætta staðið.

Mettur kostnaður er umleið 1- 1,5 mió, alt eftir staðseting og stødd.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt at gera byggiprogram.

**Vinnunevndin 25. februar 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

- Byggiprogrammið sigur m.a. at drátturin skal býtast í tvey, onnur hálvan er til smærri bátar og hin til størri bátar.

Drátturin til smærru bátarnar er 4 m breiður, har hallið er 1:4, og kemur út á 2 m dýpi.
Drátturin til størru bátarnar er 7 m breiður , har hallið er 1:6,5, og kemur út á 7 m dýpi.

Fyri at fáa tað neyðugu kyrruna, er neyðugt at gera eitt 30 m grótkast, við eini hædd upp á 3 m yvir sjóvarmálanum.

Tann samlaði kostnaðurin er mettur til 1,75 mió, íroknað mvg.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at játta tkr. 1,75 til arbeiðið, at fíggja av kto. nr. 7476. Umsitingin bjóðar arbeiðið út og setur ætlanina í verk, treytað av at samlaði kostnaðurin ikki er hægri enn mett, annars má málið leggjast aftur fyri nevnd til støðutakan.

**Vinnunevndin 15. apríl 2013:** Samtykt og at beina málið í fíggjarnevndina. Íløgukonto nr 7476 smábátahavnir.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

Borgarstjórin luttók ikki í viðgerðini av hesum máli.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Sambært játtanarreglunum skulu lidnar verkætlanir eftirmetast í avvarðandi nevnd og leggjast fyri fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

Verkætlanin verður samstundis lokað, og møguligt avlop fellur aftur til íløgukarmin.

Nú verkætlanin Bátadráttur í Álakeri, skal lokast, er sambært leiðslukunningini staðfest eitt avlop upp á kr. 137.000.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til, at verkætlanin verður lokað og at málið verður beint í fíggjarnevndina og býráðið til kunningar.

**Vinnunevndin 13. februar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt og at beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

# 65/17 Uppskot til broyting av kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.01.2017 | 2/17 | 17/00174-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 43/17 | 17/00174-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 19/17 | 17/00174-1 |
| 4 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 65/17 | 17/00174-1 |

**Málslýsing:** Í sambandi við, at býráðsmeirilutin skjýtur upp at stovna nýggja nevnd, ið skal umsita eldraøkið v.m., er neyðugt at broyta kommunustýrisskipanina, ið ásetur, hvørjar fastar nevndir skulu verða valdar.

Ásett er í § 28, stk. 1 í kommunustýrislógini, at settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum, og í § 20 í kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu er ásett, hvørjar fastar nevndir skulu verða valdar.

Skotið verður upp at seta á stovn eina eldranevnd, ið m.a. skal varða av heilsu- og umsorganartænastuni hjá Tórshavnar kommunu, og í hesum sambandi verður skotið upp at broyta kommunustýrisskipanina, so talið á føstum nevndum hækkar úr 6 upp í 7, soleiðis at møguligt verður av velja limir í nýstovnaðu eldranevndina.

Tá ið talið á nevndum hækkar úr 6 upp í 7 ávirkar hetta samsýningina til nevndarformenninar, og tískil er eisini neyðugt at broyta kommunustýrisskipanina viðvíkjandi teirri áseting, ið snýr seg um samsýning til nevndarformenn.

Býráðsmeirilutin skjýtur harumframt upp at broyta samsýningina til varaborgarstjóran soleiðis, at varaborgarstjóri fær eina árliga samsýning uppá 10% av samsýningini, ið verður givin borgarstjóranum jfr. § 10, stk. 2 í kunngerð um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini.

Ásett er í galdandi kommunustýrisskipan, § 40, 9. petti, at varaborgarstjórin og 2. varaborgarstjóri hvør sær fáa eina árliga samsýning uppá 5 % av samsýningini, ið verður givin borgarstjóranum, og henda áseting má tískil broytast samsvarandi uppskotinum hjá meirilutanum fyri at fáa gildi.

Broytingarnar eru lýstar niðanfyri.

**§ 1**

Í kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu frá 16. apríl 2001 sum seinast broytt við býráðssamtykt frá 14. august 2014, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 20, 1. petti verður orðað soleiðis:

**“1. petti.** Hesar føstu nevndir skulu verða valdar

1. Tekniska nevnd
2. Byggi- og býarskipanarnevnd
3. Náttúru- og umhvørvisnevnd

4. Trivnaðarnevnd
5. Eldranevnd
6. Mentamálanevnd
6. Vinnunevnd"

2) § 27 verður orðað soleiðis:

"**§ 27**

## Trivnaðarnevndin

**1. petti.** Trivnaðarnevndin hevur 5 limir.

Nevndin tekur avgerð í málum, ið sambært lóggávu eru løgd til býráðið ella eina sosiala nevnd, í tann mun fyriskipaninar í lóggávuni ikki eru til hindurs fyri hesum.

**2. petti**. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Barnatannrøkt
2. Barnavernd
3. Familjupolitikkur
4. Fólkaheilsa

**3. petti.** Nevndin fyrisitur teir stovnar hjá kommununi, ið ætlaðir eru til sosial- og heilsulig endamál og kommunalar íbúðir og skipar fyri at útvega innbúgv, amboð og tílíkt til hesar."

3) § 28 verður orðað soleiðis:

"**§ 28**

## Eldranevndin

**1. petti.** Eldranevndin hevur 5 limir.

Nevndin tekur avgerð i málum, ið sambært lóggávu eru løgd til býráðið í tann mun fyriskipanirnar í lóggávuni ikki eru til hindurs fyri hesum.

**2. petti**. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Heilsu- og umsorganartænasta

**3. petti.** Nevndin fyrisitur heilsu- og umsorganartænastuna og stovnar undir hesi og skipar fyri at útvega innbúgv, amboð og tílíkt til hesar."

4) §§ 28-41 verða hereftir til §§ 29-42.

5) § 40, 9. petti, sum verður § 41, 9. petti verður orðað soleiðis:

"**9. petti.** Varaborgarstjórin fær eina árliga samsýning uppá 10% av samsýningini, ið verður givin borgarstjóranum jfr. § 10, stk. 2 í kunngerð um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini."

6) § 40, 11. petti, sum verður § 41, 11. petti, verður orðað soleiðis:

“**11. petti.** Árliga fasta samsýningin til formenn í føstu nevndunum sambært 5. parti er 7,14% av teirri samsýning, ið borgarstjórin fær sambært 1. petti. Harumframt eina árliga samsýning á 17 ferðir upphæddina í § 2, stk. 2, nr. 3, í kunngerðini, sum samsýning fyri arbeiðið í avvarðandi nevnd.

Árliga fasta samsýningin er tá fyri alt arbeiðið í avvarðandi nevnd.”

**§ 2**

Broytingarnar koma í gildi eftir at hava verið viðgjørdar á tveimum býráðsfundum, við minst 14 daga millumbili.

Kommunustýrisskipanin fyri Tórshavnar kommunu verður við uppskotnu broytingunum omanfyri soljóðandi:

# ”KOMMUNUSTÝRISSKIPAN

# fyri

### Tórshavnar kommunu

## Evnisyvirlit:

1. partur Býráðið
2. - Borgarstjórin
3. - Val av nevndum og vanligar reglur fyri virki teirra o.a.
4. - Fíggjarnevndin
5. - Føstu nevndirnar
6. - Aðrar nevndir
7. - Samsýningar o.a.
8. - Broytingar í stýrisskipanini o.a.

## 1. partur
## Býráðið

**§ 1**

Býráðið hevur 13 limir, ið verða valdir eftir teim til eina og hvørja tíð galdandi reglunum í kommunalu vallógini.

**§ 2**

**1. petti.** Samsvarandi reglunum í kommunustýrislógini velur býráðið við meirilutavali ein borgarstjóra fyri alt valskeið býráðsins. Borgarstjórastarvið er fulltíðarstarv. Eisini velur býráðið við lutfalsvali ein varaborgarstjóra og ein 2. varaborgarstjóra.

**2. petti**. Um borgarstjórin ella varaborgarstjórin av eini ella aðrari orsøk hevur forfall, røkja varaborgarstjórin ella 2. varaborgarstjóri í hesi raðfylgju borgarstjórastarvið. Varir fráveran meira enn 2 mánaðir, skal býráðið velja fyribils borgarstjóra ella varaborgarstjóra í teirra stað við gildi, til fráveran heldur uppat.

**§ 3**

Býráðið samtykkir eina fundarskipan, ið m.a. ásetur nærri reglur um fyrireiking, fundarboð, hvussu fundir skulu haldast og málsmannagongd o.a.

**§ 4**

**1. petti**. Býráðið tekur avgerð um, nær og hvar vanligir býráðsfundir skulu vera. Við byrjanini av hvørjum álmanakkaári verður hetta kunngjørt á tann hátt, ið vanliga verður nýttur í kommununi. Býráðið hevur almennan fund vanliga eina ferð um mánaðin.

**2. petti**. Eykafundir verða hildnir, tá ið borgarstjórin heldur tað vera neyðugt, ella um 1/3 av limunum krevur tað. Borgarstjórin ger av, nær og hvar eykafundirnir skulu vera, og um høvi er til tess, verða hesir almannakunngjørdir.

**3. petti.** Limur, ið hevur tørv at fáa upplýsingar og tekniskan stuðul frá kommunalu fyrisitingini í sambandi við málsviðgerðina, fær hesa við at venda sær til kommunustjóran.

## 2. partur
## Borgarstjórin

**§ 5**

**1. petti**. Nærri reglur um virksemi borgarstjórans verða ásettar í kommunustýrisskipanini, sambært § 22 í kommunustýrislógini.

**§ 6**

**1. petti**. Borgarstjórin hevur dagligu leiðsluna av kommunalu fyrisitingini. Hetta er lýst í kapittul 4 í kommunustýrislógini, og eru uppgávur hansara m.a. hesar:

1. hevur dagliga leiðslu av kommunalu fyrisitingini,
2. býtir málini út til tær ymisku nevndirnar,
3. tekur sær av málum, sum ikki fara í nakra nevnd,
4. gevur fundarboð,
5. fyrireikar býráðsfundir,
6. kunnar býráðslimir um, hvørji mál koma fyri á fundum,
7. leggur mál og málsupplýsingar fram við einum hóskandi tíðarskeiði, so at býráðslimir kunnu gera sær sína egnu meting um málið,
8. boðar frá, hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund,
9. ansar eftir, at mál, ið krevja býráðsviðgerð, fáa tílíka viðgerð, og at neyðug ummæli verða fingin,

10. sær til, at málini verða avgreidd og um neyðugt gera fyriskipan um hetta,
11. tekur avgerðir í málum, ið ikki tola at bíða ella har eingin orsøk er til iva,
12. ansar eftir, at farið verður fram eftir samtyktum býráðsins,
13. ansar eftir, at allar útreiðslur og inntøkur hava neyðuga játtan og
14. saman við einum persóni, sum býráðið hevur heimilað til tess, undirskrivar skjøl, ið binda kommununa.

**2. petti**. Borgarstjórin hevur eftirlit við, at mál, ið krevur býráðsins avgerð og hoyrir undir fyrisitingarøki hjá nevnd, verður lagt fyri býráðið saman við neyðugum nevndarummæli, áðrenn býráðið tekur avgerð.

**3. petti**. Borgarstjórin hevur eyguni eftir, at einki mál liggur á láni. Nevndirnar hava skyldu til at greiða honum frá teimum málum, tær hava við at gera, og hvussu tað liggur fyri við at avgreiða tey. Um tað er neyðugt, ger hann fyriskipan fyri, hvussu málini skulu verða avgreidd.

**§ 7**

**1. petti**. Borgarstjórin ansar eftir, at hvør peningaupphædd - tað veri seg inntøka ella útreiðsla við kommunukassan - er bókað í kommunuroknskapinum, og at upphæddin hevur heimild í ársfíggjarætlanini ella eykajáttan. Er talan um eina peningaupphædd, ið heimild ikki er fyri, leggur hann málið fyri býráðið.

## 3. partur
## Val av nevndum og vanligar reglur fyri virki teirra o.a.

**§ 8**

**1. petti.** Til at taka sær av teirri beinleiðis fyrisitingini av viðurskiftum kommununnar verða skipaðar ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir.

**2. petti.** Býráðið velur limir í tær nevndir, stjórnir og tílíkt, har býráðið ella kommunan sambært øðrum fyriskipanum skal verða umboðað.

**3. petti.** Val av limum og tiltakslimum í fastar nevndir o.a. fer fram á fyrsta býráðsfundi og beint aftan á valið av borgarstjóra og varaborgarstjóra og 2. varaborgarstjóra. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sbrt. § 3. Verður avgjørt at velja av nýggjum, stendur øll nevndin fyri vali.

**§ 9**

**1. petti.** Býráðið kann seta serstakar ráðgevandi nevndir og staðbundnar nevndir, ið skulu taka sær av ávísum málum ella gera fyrireikandi ella ráðgevandi arbeiði fyri býráðið, fíggjarnevndina ella hinar føstu nevndirnar, sí 6. part.

**§ 10**

**1. petti**. Hvør nevnd hevur sína gerðabók, har allar samtyktir nevndarinnar verða førdar. Við fundarlok verður gerðabókin lisin upp og undirskrivað av øllum teimum luttakandi nevndarlimunum.

**2. petti**. Hevur nevndarlimur serstøðu, kann hann krevja, at serstøða hansara í stuttum verður viðmerkt í gerðabókini. Tá mál, har nevndarlimur hevur serstøðu sambært gerðabókini, verða send øðrum myndugleikum, kann nevndarlimur krevja, at myndugleikin verður kunnaður um tað, ið stendur í gerðabókini. Nevndarlimurin kann viðleggja málinum grundgeving fyri serstøðu síni.

**§ 11**

**1. petti.** Hendir tað, at ein nevnd hugsar um at fremja ætlanir, ið nerta við arbeiðsøkið hjá aðrari nevnd, verða samráðingar at fara fram við hesa ella ummæli fingið frá hesi nevnd, áðrenn ætlanirnar verða settar í verk. Um neyðugt luttaka fíggjarnevndin og borgarstjórin í samráðingunum.

**2. petti.** Hvør nevnd sendir, um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina, tilráðing til býráðið viðvíkjandi íleggingararbeiði, ið hoyrir undir hennara fyrisitingarøki.

**§ 12**

Nevndarformennirnir ansa eftir, at ikki verður brúktur meira peningur enn avsettur er sambært teim einstøku upphæddunum á ársfíggjarætlanini ella er játtaður við eykajáttan. Um tað er hildið ynskjandi ella neyðugt at játta meira pening, senda nevndirnar - um fíggjarnevndina - býráðnum tilráðing hesum viðvíkjandi.

**§ 13**

Nærri reglur um nevndararbeiði kunnu verða ásettar í fundarskipan, sum býráðið góðtekur.

## 4. partur
## Fíggjarnevndin

**§ 14**

**1. petti.** Í fíggjarnevndini situr borgarstjórin, ið er nevndarformaður, og 4 aðrir býráðslimir.

Fíggjarnevndin fyrisitur tey málsøki, sum løgd eru til hana sambært kapittul 8 í kommunustýrislógini.

**2. petti.** Fíggjarnevndin fyrisitur hesi málsøki**:**

1. Fíggjarviðurskifti
2. Starvsfólkaviðurskifti
3. Ognir kommununar

4. Trygging av virðum hjá kommununi
5. Leigumál
6. Sløkkiliðið
7. Verkstaðin
8. Kommunuplanur
9. Interkommunalir felagsskapir
10. Yvirskipað mál sum bústaðarfígging, gransking v.m.

**3. petti.** Fíggjarnevndin fyrisitur mál viðvíkjandi burturleigu av ognum í minni enn fimm ár. Nevndin sendir býráðnum tilráðing um keyp ella sølu av føstum ognum, veðseting og um burturleigu í meira enn fimm ár av ognum kommununnar.

**4. petti.** Øll mál, ið snúgva seg um fígging, skulu - áðrenn tey verða løgd fyri býráðið til samtyktar - hava verið til ummælis hjá fíggjarnevndini.

**§ 15**

**1. petti.** Fíggjarnevndin ansar eftir, at peningaognir kommununnar - íroknaður tann peningur, ið ikki er neyðugur til gjaldingar av dagligu útreiðslunum - verða goymdar á tryggan hátt og eisini soleiðis, at tær geva sum mest av sær.

**2. petti.** Tær peningaognir, ið ikki eru neyðugar at hava til taks í reiðum peningi fyri at greiða dagligu útreiðslurnar, skulu verða settar inn í peningastovn, á postgirokonto ella settar í slík lánsbrøv, sum verða nýtt, tá ið tað snýr seg um ognir hjá ómyndingum.

**3. petti.** Virðisbrøv kommununnar skulu - um tey ikki verða tryggjað á annan fullgóðan hátt - fáa átekning um, at tey eru ogn kommununnar, og at eingin hevur ræði á nøkrum virðisbrævi uttan við samtykki býráðsins. Um tað er møguligt, skal átekningin verða skrivað í bók hjá avvarðandi stovni.

**4. petti.** Somu skyldur, sum frammanfyri eru tilskilaðar, hevur fíggjarnevndin viðvíkjandi øðrum peningaognum, sum kommunan hevur um hendur.

**§ 16**

**1. petti.** Fyri 1. oktober sendir fíggjarnevndin býráðnum uppskot til ársfíggjarætlan fyri komandi fíggjarár.

**2. petti.** Uppskot til ársfíggjarætlan skal viðgerast tvær ferðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili. Ársfíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember og latin landsstýrismanninum innan 3 gerandisdagar aftaná.

**3. petti.** Við hvørjari upphædd á uppskotinum skal verða viðmerkt:

1) tann upphædd, ið verður skotin upp fyri komandi ár.
2) tann upphædd, ið er avsett fyri verandi roknskaparár, og
3) tann upphædd, ið er inngoldin ella brúkt í undanfarna roknskaparári.

Um roknskapurin fyri undanfarna ár ikki er lagdur fram, kunnu fyribils tøl úr honum verða nýtt.

**4. petti.** Tær íleggingar- og fíggjarætlanir, ið nevndin hevur gjørt, verða lagdar fram saman við uppskotinum til ársfíggjarætlanina. Við uppskotinum skulu eisini fylgja upplýsingar um tær fíggjarligu broytingar, sum kunnu væntast í komandi roknskaparári.

**§ 17**

Fíggjarnevndin hevur ábyrgdina av:
1) at gjørd verður ein bókhaldsførsluskipan, ið gjølla sýnir, hvussu kommunuognin verður umsitin,
2) at liðugur roknskapur við møguligum viðmerkingum verður grannskoðaður,
3) at viðgera og taka støðu til viðmerkingar frá grannskoðanini,
4) at leggja grannskoðaðan roknskap fyri býráðið til góðkenningar og undirskrivingar, og
5) at leggja grannskoðanarfrágreiðing fyri býráðið til viðgerðar.

**§ 18**

Fíggjarnevndarformaðurin ansar eftir, at ikki verður farið upp um tær á fíggjarætlanini viðtiknu peningaupphæddir ella samtyktu eykajáttanir, hvørki tilsamans ella tá talan er um einstakar upphæddir, og at ikki verður farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk sbrt. § 19, 2. petti.

**§ 19**

**1. petti.** Fíggjarnevndin hevur eftirlit við fyrisitingini av peningi og bókhaldi kommununnar. Hon ansar eftir, at inntøkurnar hjá kommununi koma inn rættstundis, og at møgulig útistandandi skuld verður innkravd. Eisini ansar nevndin eftir, at eftirstøðulistar verða gjørdir og kannar hesar við hóskandi millumbili.

**2. petti.** Fíggjarnevndin ásetur tær reglur, sum kommunala umsitingin hevur at ganga eftir, tá ið tað snýr seg um at siga nevndini frá, um tað í nøkrum føri er farið - ella kann væntast at verða farið - upp um tær einstøku peningaupphæddir á ársfíggjarætlanini ella tær upphæddir, ið játtaðar eru sambært eykajáttan.

**3. petti.** Fíggjarnevndin ansar eftir, at øll onnur skjøl verða goymd á tryggan hátt.

## 5. partur
## Hinar føstu nevndirnar

**§ 20**

**1. petti.** Hesar føstu nevndir skulu verða valdar

1. Tekniska nevnd
2. Byggi- og býarskipanarnevnd
3. Náttúru- og umhvørvisnevnd

4. Trivnaðarnevnd
5. Eldranevnd
6. Mentamálanevnd
7. Vinnunevnd

**2. petti.** Limirnir í teim í 1. petti umrøddu nevndum verða valdir millum býráðslimirnar.

**§ 21**

Eftir áheitan frá fíggjarnevndini og innan eina tíðarfreist, sum henda nevnd setir, skulu nevndirnar koma við teirra parti av uppskotinum til ársfíggjarætlanina og til gerð av íleggingar- og fíggjarætlanum.

Tá íleggingararbeiði innan málsøki nevndarinnar skulu verða sett í verk, sendir nevndin tilmæli til býráðið hesum viðvíkjandi, jfr. § 11, 2. petti, og skipar fyri, at arbeiðini verða framd samsvarandi teirri av býráðnum samtyktu arbeiðsætlan.

**§ 22**

Hvør nevnd gevur tilmæli til býráðið í málum, innan hennara fyrisitingarøki, har tað sambært lóg áliggur býráðnum at geva tilmæli ella taka støðu.

**§ 23**

Hvør nevndarformaður ansar eftir, at ikki verður farið upp um tær á fíggjarætlanini viðtiknu peningaupphæddir og eykajáttanir, hvørki tilsamans ella tá talan er um einstakar upphæddir, og at ikki verður farið undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk sbrt. § 19, 2. petti.

**§ 24**

## Tekniska nevnd

**1. petti.** Tekniska nevnd hevur 5 limir.

Nevndin ansar eftir, at tær viðtøkur og reglugerðir, sum galda fyri málsøki nevndarinnar, verða fylgdar.

**2. petti.** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Bussleiðin
2. Vatnveiting og vatngóðska
3. Kloakkir og yvirflatuvatn
4. Vegir og ferðslumál
5. Gøtuljós
6. Onnur teknisk viðurskifti, ið ikki hoyra undir aðra nevnd

Nevndin skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

**3. petti**. Nevndin hevur tekniskt eftirlit við almennum plássum, vegum, kloakkum, reinsiverkum, almennum nátthúsum o.ø.

**4. petti**. Nevndin fyriskipar, at navnaskelti verða sett upp á gøtum, vegum, torgum, støðum o.ø. og hevur í øllum førum eftirlit við, at fyriskipanirnar í vegareglugerðini um gerð og yvirtøkur av gøtum og vegum verða hildnar.

**5. petti.** Skylda kommununnar at reinsa gøtur, vegir og pláss (torg) er løgd til nevndina, og leiðir og útinnir hon hesi arbeiði - eisini tá talan er um kavagrevstur og at beina fyri burturkasti frá hesum arbeiðum.

**§ 25**

## Byggi- og býarskipanarnevndin

**1. petti.** Byggi og býarskipanarnevndin hevur 5 limir.

Nevndin fyrisitur øll mál, ið sambært byggilóggávu og lóg um býarskipanir og byggisamtyktir eru løgd undir býráðið.

**2. petti.** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Býarskipan og byggisamtyktir
2. Útstykkingar
3. Byggimál
4. Lendismál
5. Kirkjugarðar
6. Bygningsrakstur og -viðlíkahald
7. Fríðkan (viðarlundir, spælipláss, gøtur)
8. Áir, veitir og jarðarognir, tað veri seg traðarognir, urtagarðs- og onnur jarðarstykki.

**3. petti.** Nevndin fyrisitur allar umsóknir um bygging og sundurluting og viðger hesar sambært galdandi lógum, reglugerðum og fyriskipanum og ansar eftir, at øll bygging er í samsvari við hesi.

**4. petti.** Nevndin sendir býráðnum um fíggjarnevndina tilráðing um keyp ella sølu av føstum ognum og um burturleigu í meira enn fimm ár av teimum ognum, sum nevndin útinnir viðlíkahaldi av. Eisini sendir hon eftir áheitan fíggjarnevndini tilmæli viðvíkjandi burturleigu av ognum.

**5. petti.** Nevndin hevur eftirlit við, at gingið verður eftir teimum servituttum og deklaratiónum, sum álagdar eru til frama fyri kommununa.

**§ 26**

## Umhvørvisnevndin

**1. petti.** Umhvørvisnevndin hevur 5 limir.

Nevndin fyrisitur mál, ið sambært lóggávuni, kunngerðum og reglum um umhvørvisvernd og fyriskipanum, eru løgd undir kommununa, og skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

**2. petti.** Nevndin fyrisitur hesi málsøki:

1. Brennistøðin
2. Ruskinnsavnanin
3. Jarnmóttøku kemikaliur, spilloljuslamsúgving, rottangatøming, tyrving o.a.
4. Náttúru og umhvørvi
5. Frílendi
6. Framtíðar orka
7. Umhvørvismál
8. Umhvørvisátøk so sum umhvørvisvika v.m.

Nevndin skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

**§ 27**

## Trivnaðarnevndin

**1. petti.** Trivnaðarnevndin hevur 5 limir.

Nevndin tekur avgerð í málum, ið sambært lóggávu eru løgd til býráðið ella eina sosiala nevnd, í tann mun fyriskipaninar í lóggávuni ikki eru til hindurs fyri hesum.

**2. petti**. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:

1. Barnatannrøkt
2. Barnavernd
3. Familjupolitikkur
4. Fólkaheilsa

**3. petti.** Nevndin fyrisitur teir stovnar hjá kommununi, ið ætlaðir eru til sosial endamál og kommunalar íbúðir og skipar fyri at útvega innbúgv, amboð og tílíkt til hesar.

**§ 28**

## Eldranevndin

**1. petti.** Eldranevndin hevur 5 limir.

Nevndin tekur avgerð i málum, ið sambært lóggávu eru løgd til býráðið í tann mun fyriskipanirnar í lóggávuni ikki eru til hindurs fyri hesum.

**2. petti**. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Heilsu- og umsorganartænasta

**3. petti.** Nevndin fyrisitur heilsu- og umsorganartænastuna og stovnar undir hesi og skipar fyri at útvega innbúgv, amboð og tílíkt til hesar.

**§ 29**

## Mentamálanevndin

**<u>1. petti</u>.** Mentamálanevndin hevur 5 limir.

**<u>2. petti</u>**. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Dagstovnaøkið
2. Fólkaskúli
3. Forskúli
4. Frítíðarskúli
5. Ungdómsvirksemi
6. Námsfrøðiliga ráðgevingin
7. Kvøldskúli
8. Musikkskúli
9. Býarbókasavn
10. Býarsavn
11. Mentanarhøli
12. Stuðulsskipanir
13. Svimjihøll
14. Uttandura vallir, ítróttaranlegg og ítróttahallir
15. Onnur mál av mentunarligum týdningi í kommununi.

**3. petti.** Nevndin gevur viðmæli til býráðið í málum viðvíkjandi nøvnum á nýggjum gøtum, vegum o.ø. sambært tilmæli frá serstakari nevnd, bólki e.ø.

**4. petti.** Eftir gjøllari reglum frá býráðnum umsitur nevndin studningsjáttanir til skúlabørn og til feløg, herundir eisini fyri stovnandi tiltøkum til frama fyri slík, o.tl.

**§ 30**

## Vinnunevndin

**<u>1. petti</u>.** Vinnunevndin hevur 5 limir.

**2. petti**. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Tórshavnar havn
2. Smábátahavn
3. Vinnubygningar og vinnuøki
4. Oljuvinnu
5. Fiskivinnu
6. Ferðavinnu
7. Cruisevinnu
8. Handils- og tænastuvinnu
9. Vinnunýskapan
10. Vinnustrategi
11. Hýruvognsloyvi.

**3. petti**. Nevndin fyrisitur bíðilistar til pláss í smábátahavnum og skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

**4. petti**. Nevndin fyrisitur býráðsins vegna peningaviðurskiftum og roknskaparhaldi hjá vinnuhavnum og smábátahavnum samsvarandi teimum til eina og hvørja tíð galdandi roknskaparreglum og reglum viðvíkjandi fyrisiting av havnum o.ø.

Roknskaparhaldið hjá vinnuhavnum og smábátahavnum skal haldast hvørt sær.

Loyvt er ikki at rinda møguligt hall av rakstri av smábátahavnum v.m. av inntøkum frá vinnuhavnum.

## 6. partur
## Aðrar nevndir

### § 31

### Økisnevndin

**1. petti.** Undir fíggjarnevndini verður sett ein økisnevnd við 3 kommunustýrislimum, ið skal viðgera og taka stig til at dagføra og menna bygdirnar í kommununi.

**2. petti.** Nevndin arbeiðir í høvuðsheitum yvirskipað og tvørgangandi.

**3. petti.** Nevndin orðar økismenningarpolitikk fyri kommununa og setir ítøkilig mál fyri tey einstøku økini.

**4. petti.** Nevndin leggur síni tilmæli fyri fíggjarnevndina at bera víðari í skipanini.

### § 32

## Kaldbaksnevndin

**1. petti**. At taka sær av áhugamálum í Kaldbak verður vald ein nevnd við 5 limum.

Tríggir valdir av og millum borgararnar í Kaldbak eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.

Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

**2. petti.** Kaldbaksnevndin vegleiðir, umrøður og ger tilmæli til býráðið í málum, ið hava við spurningar í Kaldbak at gera.

**§ 33**

## Hvítanesnevndin

**1. petti.** At taka sær av áhugamálum á Hvítanesi verður vald ein nevnd við 5 limum.

Tríggir valdir av og millum borgararnar á Hvítanesi eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.

Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

**2. petti.** Hvítanesnevndin vegleiðir, umrøður og ger tilmæli til býráðið í málum, ið hava við spurningar á Hvítanesi at gera.

**§ 34**

## Kollfjarðarnevndin

**1. petti.** At taka sær av áhugamálum í Kollafirði verður vald ein nevnd við 5 limum.

Tríggir valdir av og millum borgararnar í Kollafirði eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.

Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

**2. petti.** Kollfjarðarnevndin vegleiðir, umrøður og ger tilmæli til býráðið í málum, ið hava við spurningar í Kollafirði at gera.

**§ 35**

## Nólsoyarnevndin

**1. petti.** At taka sær av áhugamálum í Nólsoy verður vald ein nevnd við 5 limum.

Tríggir valdir av og millum borgararnar í Nólsoy eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.

Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

**<u>2. petti</u>.** Nólsoyarnevndin vegleiðir, umrøður og ger tilmæli til býráðið í málum, ið hava við spurningar í Nólsoy at gera.

**§ 36**

## Kirkjubøar- Velbastaðarnevndin

**<u>1. petti</u>.** At taka sær av áhugamálum í Kirkjubø og á Velbastað verður vald ein nevnd við 5 limum.

Tríggir valdir av og millum borgararnar í Kirkjubø og á Velbastað eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.

Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

**<u>2. petti</u>.** Kirkjubøar- og Velbastaðarnevndin vegleiðir, umrøður og ger tilmæli til býráðið í málum, ið hava við spurningar í Kirkjubø og á Velbastað at gera.

**§ 37**

## Hest- Koltursnevndin

At taka sær av áhugamálum í Hesti og Koltri verður vald ein nevnd við 5 limum.

Tríggir valdir av og millum borgararnar í Hesti og Koltri eftir reglunum í kommunalu vallógini. Valbæri og valrætt hava tey, sum hava valrætt og eru valbær til býráðið.

Ein valdur av býráðnum millum limir tess. Fimti limurin, ið er borgarstjórin, er føddur formaður.

**2. petti.** Hest- Koltursnevndin vegleiðir, umrøður og ger tilmæli til býráðið í málum, ið hava við spurningar í Hesti og Koltri at gera

**§ 38**

## Skattakærunevndin

**<u>1. petti</u>**. Skattakærunevndin hevur 7 limir og 7 tiltakslimir úr Tórshavnar kommunu, sbrt. kunngerð nr. 94 frá 21. desember 2004 um val av limum í kommunalu skattakærunevndirnar.

**2. petti**. Nevndin fyrisitur mál, ið sambært lóggávuni, kunngerðum, reglum um skatta-kærur og fyriskipanum, eru løgd undir hana, og skipar fyri teimum arbeiðum, sum skulu verða gjørd í hesum sambandi.

**§ 39**

## Barnaverndarnevndin

**1. petti**. Barnaverndarnevndin hevur 5 limir og 5 varalimir, sbrt. løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 8. mai 2007.

**2. petti**. Nevndin virkar við grundarlagi í barnaverndarlógini, kunngerðum, reglum og fyriskipanum um barnavernd og tekur avgerðir eftir tilmæli frá barnaverndarumsitingini.

**§ 40**

## Tilbúgvingarnevndin

**1. petti.** Tilbúgvingarnevndin hevur 5 limir.

Í Tilbúgvingarnevndini situr borgarstjórin, sum er formaður, brunaumsjónarmaðurin, eitt umboð fyri Føroya Landfúta og 2 aðrir limir, tilnevndir av kommunustýrinum.

**2. petti**. Nevndin fyrisitur kommunalu tilbúgvingina sambært løgtingslóg um tilbúgving og samsvari við galdandi reglugerðir og ársfíggjarætlan.

## 7. partur
## Samsýningar o.a.

**§ 41**

**1. petti**. Borgarstjórin fær í fulltíðarstarvi sínum samsýning ájavnt við 39. flokk sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Tænastumannafelag landsins.

**2. petti**. Tá borgarstjórin fer frá, fær hann samsýning eftir somu reglum sum landsstýrismaður, sambært góðkendu skipanini viðvíkjandi eftirløn, eftirsitiløn v.m. til borgarstjóra, sum hildið verður fram við.

**3. petti**. Eftirsitandi hjúnafelagi ella børn undir 18 ár eftir borgarstjóranum í starvi fær/fáa samsýning eftir somu reglum sum eftirsitandi hjúnafelagi og børn eftir landsstýrismann, sbrt. § 12,2 í kunngerð um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógini.

**4. petti**. Fyrrverandi borgarstjórin hevur rætt til egna eftirløn, eftir somu reglum sum fyrrverandi landsstýrismenn, sbrt. § 12, 2.1, í kunngerð um samsýning v.m sambært kommunustýrislógini.

**5. petti.** Eftirsitandi hjúnafelagi og børn eftir fyrrverandi borgarstjóra hevur, eftir somu reglum sum eftirsitandi hjúnafelagi og børn eftir landsstýrismann, rætt til part av teirri eftirløn sum borgarstjóri hevði rætt til.

**6. petti.** Eftirsitandi børn undir 18 ár hava rætt til barnaeftirløn eftir somu reglum sum eftirsitandi børn eftir fyrrverandi landsstýrismenn.

**7. petti.** Samsýning**,** borðfæ og eftirløn verða goldin frammanundan við 1/12 um mánaðin.

**8. petti.** Borgarstjóri fær ikki fundar- og aðrar samsýningar sbrt. § 9,6 í kunngerð um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógini.

**9. petti.** Varaborgarstjórin fær eina árliga samsýning uppá 10% av samsýningi, ið verður givin borgarstjóranum, jfr. § 10, stk. 2, í kunngerð um samsýning o.a. sambært kommunustýrislógini.

**10. petti.** Árlig føst fundarsamsýning til lim í býráðnum er 48 ferðir upphæddina í § 2, stk. 2, nr. 3, í kunngerð um samsýning v.m sambært kommunustýrislógini.

**11. petti.** Árliga fasta samsýningin til formenn í føstu nevndunum sambært 5. parti er 7,14% av teirri samsýning, ið borgarstjórin fær sambært 1. petti. Harumframt eina árliga samsýning á 17 ferðir upphæddina í § 2, stk. 2, nr. 3, í kunngerðini, sum samsýning fyri arbeiðið í avvarðandi nevnd.

Árliga fasta samsýningin er tá fyri alt arbeiðið í avvarðandi nevnd.

**12. petti.** Árliga fasta nevndarsamsýningin til býráðslim, sum er limur í einari av føstu nevndunum ella fíggjarnevndini er 17 ferðir upphæddina í § 2, stk. 2, nr. 3, í kunngerðini um samsýning.

**13. petti.** Kommunustýrislimir, ið eru formenn ella nevndarlimir í øðrum nevndum, sum býráðið hevur valt tey í, fáa fundarsamsýning eftir reglunum í § 2, stk. 2, í kunngerðini um samsýning, er ikki annað ásett í aðrari lóg.

Kommunustýrislimir, ið eru nevndarlimir í hesum nevndum, fáa tó eina árliga fasta samsýning á kr. 5.000,00:

1. Staðbundnu nevndunum
2. Tilbúgvningarnevndini.

"Kommunustýrislimur, ið er nevndarformaður í økisnevndini, sbr. § 30, fær hóast stk. 1 eina árliga fasta samsýning, sum er 3 ferðir nevndarsamsýningina sambært § 6, stk. 2, nr. 5, í kunngerðini um samsýning Árliga fasta samsýningin er tá fyri alt arbeiði í nevndini."

**14. petti.** Samsýning verður goldin til og við endan á tí mánaði, tá viðkomandi ikki er í starvinum longur, ella at viðkomandi ikki hevur røkt starvið samanhangandi í 3 mánaðir, sbrt. § 17,1 í kunngerð um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógini. Er frávera grundað á sjúku, barnsburð, ella ættleiðing, hevur viðkomandi rætt til samsýning í upp til 6 mánaðir, sbrt. § 17,2 í kunngerð um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógina.

**15. petti.** Tiltakslimur fær samsýning sum býráðslimir ella nevndarlimir. Tiltakslimur fær tó einans lutfalsliga samsýning fyri tað tíðarskeið, hann fyribils er limur. Tiltakslimur, sum einans møtir á einstøkum fundi, fær tá fundarsamsýning sbrt. § 7, 1-2 í kunngerð um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógina.

**16. petti.** Onnur enn kommunustýrislimir fáa fundarpening fyri arbeiði í nevndum o.l., sum býráðið hevur valt tey í, eftir reglunum í § 9 í kunngerðini um samsýning.

**17. petti.** Býráðið og føstu nevndirnar kunnu taka avgerð um, at kommunustýrislimur kann luttaka á skeiði, kunningarferð, umboðan v.m., bæði innan- og uttanlands. Tá verður samsýning, ella um viðkomandi kommunustýrislimur ynskir hetta, endurgjald latið eftir reglunum í § 4 í kunngerðini um samsýningar.

Ynskir ein nevnd at luttaka í nevnda virksemi, skal umbønin góðkennast av fíggjarnevndini. Er talan um fíggjarnevndina, skal býráðið góðkenna umbønina.

Ynskir býráðslimur at luttaka í nevnda virksemi, skal umbønin góðkennast av avvarðandi nevnd.

Borgarstjórin ferðast sambært egnari fíggjarætlan og kann góðkenna, at varamaður luttekur í hansara stað.

Verða ørindini samsýnt av øðrum, verður eingin samsýning latin frá býráðnum.

## 8. partur
## Broytingar í stýrisskipanini o.a.

### § 42

Henda kommunustýrisskipan og broytingar í henni skulu verða viðgjørd á tveimum býráðsfundum, við minst 14 daga millumbili.”

**Tilmæli:** Kommunustjórin mælir býráðnum til at taka støðu til omanfyristandandi uppskot til broytingar í kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu.

**Fíggjarnevndin 18. januar 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við broytingunum í kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við uppskotinum til broytingar í kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti við teirri rætting til §31 1 petti: Økisnevnd við 5 kommunustýrislimum.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Býráðsmeirilutin mælir til, at skoytt verður uppí í í § 27, 2. petti viðvíkjandi teimum økjum, ið trivnaðarnevndin fyrisitur, at nevndin eisini skal fyrisita málsøkið integratión.

§ 27, 2. petti verður hereftir soljóðandi:

“Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Barnatannrøkt
2. Barnavernd
3. Familjupolitikkur
4. Fólkaheilsa
5. Integratión”

**Tilmæli:** Kommunustjórin mælir býráðnum til umvegis fíggjarnevndina at taka støðu til uppskotið omanfyri, soleiðis at trivnaðarnevndin eisini kemur at fyrisita málsøkið integratión.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur støðu á býráðsfundinum.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

# 66/17 Søla av grundstykkjum á Hamrabø í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 264/16 | 16/03366-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 328/16 | 16/03366-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 18/17 | 16/03366-1 |
| 4 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 66/17 | 16/03366-1 |

**Málslýsing:**
Í næstum er ætlanin at bjóða stykkini í útstykkingin á Hamrabøi í Kollafirði út vísandi til, at arbeiðið at gera vegin o.a. í økinum er farið í gongd.

Innan stykkini verða boðin út, er tørvur á, at áseta prís fyri stykkini.

**Tilmæli:**
Tilmæli og meira tilfar verður tókt innan fundin.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
Byggibúningin av Hamrabøi verður ætlandi liðug í byrjanini av 2018.

Kommunan hevur biðið tveir meklarar um at virðismeta 12 tey vestastu stykkini, ið ætlanin er at selja fyrst. Metingarnar eru rættuliga eins og tær staðfesta, at kommunan ikki kann vænta at fáa kostprís fyri stykkini, ið kommunan vanliga brúkar sum søluprís og mett verður ikki, at tað er fíggjarliga ráðiligt at bíða við at selja stykkini.

Innkomnu metingarnar vísa, at vestastu stykkini hava eitt meðal virði á 248.750 kr. Um øll 22 stykkini verða seld fyri metta virði, verður samlaði søluprísurin 5.472.500 kr. Hetta gevur ein fermeturprís á 457,01 kr. fyri teir 11.974 m2 ið seldir vera.

Endaligi søluprísurin verður ásettur í mun til støddina á stykkinum.

Kostnaðir ísv. útstykkingina, við kommunalum MVG:

| | |
|---|---|
| Jarðarkeyp o.t | 3.386.707 kr. |
| Byggibúning (mett) | 7.450.000 kr. |
| Tilsaman | 10.836.707 kr. |

Av hesum eru játtaðar á íløguætlanini í alt 6.965.707 (j. Nr. 14/00865 og 15/00969)
Restin verður fíggjað við inntøku frá søluni.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at tilluta 12 tey vestastu stykkini sambært bíðilistanum fyri mett søluvirði á 470,01 kr/m2, vísandi til at tað ikki kann roknast við at prísurin fer at hækkað.

Um ikki øll 12 vestastu stykkini vera seld, so at seta restina av vestastu stykkjunum til sølu fyri 470,01 kr/m2 og síðan selja eystureftir.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum, tí tilmæli ger mun á borgarum í Tórshavnar kommunu tí prísurin verður ymiskur, og krevur málið fyri býráðið, har minnilutin fer at koma við tilmæli.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein, mæla býráðnum til at seta grundstykkini í Kollafirði á sølulistan til kostprís. hetta sambært galdandi reglum. Umráðandi er, at borgarar í kommununi ikki vera forfordeildir, tá íð talan er um at ogna sær grundstykkir í kommununi. Tilmæli fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Heðin Mortensen, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein metia, at samtyktin, sum er gjørd í hesum málið er ólóglig og skal boðað frá, at kært verður til innlendismálaráðið um hesa avgerð hjá meirilutanum í býráðnum. Biðið verður um, at øll skjøl í hesum málið eru taks at senda við kæruni

# 67/17 Umsókn um keyp uml. 66 fermetrar av matr. nr. 853aa, at leggja saman við matr. nr. 853c, Tórshavn. Umsøkjari Bogi Beck Jensen.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 417/16 | 16/04202-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.01.2017 | 16/17 | 16/04202-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 17/17 | 16/04202-2 |
| 4 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 67/17 | 16/04202-2 |

**Málslýsing:**
Kommunan lýsti í 2014 ognina matr. nr. 853c, Jóannesar Paturssonargøta 22, Tórshavn til sølu til hægstbjóðandi, og varð ognin, ið er 1.480 m2 til víddar, seld í juli 2014.

Á kommunalu grannaognini, matr. nr. 853AA, ið er 824 m2 til støddar, er m.a. alment parkeringsøki til umleið 5-6 bilar.

Í sambandi við søluna av matr. nr. 853c, varð atkoman til kommunala parkeringsøkið viðgjørd, tí umráðandi varð at tryggja hesa. Í sambandi við søluna varð avtalað við keyparan, at í staðin fyri at frámatrikulera umleið 80 m2 til atkomuna, so at tinglesa atkomurættin á matr. nr. 853 C.

Viðmerkjast kann, at tá ið læknaviðtala var í húsunum, var parkeringsøkið í dagtímunum brúkt sum parkeringspláss hjá " kundunum " meðan serliga íbúgvar í raðhúsunum hinumegin vegin brúktu økið eftir arbeiðstíð.

Keyparin av matr. nr. 853c søkir nú um, at keypa almenna pakeringsøki at brúka sum privata parkering. Upplýsast kann, at á ognini hjá umsøkjaranum eru sum er 2 privat parkeringspláss, ið eigarin fult út ræður yvir, og grundøki er so stórt, at tað áttu at verið góðir møguleikar at gera fleiri parkeringspláss á stykkinum, um tørvur er á hesum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til, at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. december 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina

**Ískoyti:**
Av tí at parkeringstørvurin í økinum er stórur, so hevur Tekniska deild saman við Býarskipan arbeitt við ætlanini at innrætta matr. nr. 853aa til felags parkeringsøki fyri umhvørvið, sí skjal nr. 16/04202-5. Ætlanin hevur enn ikki verið raðfest, men liggur sum ein framtíðarætlan fyri at betra um parkeringsviðurskiftini í økinum.

Ognin matr. nr. 853c, Jóannesar Paturssonar gøta 22, er 1480 $m^2$. Mett verður, at ognin er nóg stór til at veita sethúsunum privat parkeringsøki á egnum øki, um ynski er til tess.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla frá at selja 66 $m^2$ av matr. nr. 853aa og at beina málið aftur í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. januar 2017:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena D. á Neystabø, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Ein meiriluti Annika Olsen, Bergun Kass, Gunvør Balle samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

# 68/17 Umsókn at leiga ein part av økinum vestan fyri Vágsbotn 14, matr. nr. 190, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 215/16 | 16/02243-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 30.12.2016 | 438/16 | 16/02243-2 |
| 3 Tekniska nevnd | 14.02.2017 | 8/17 | 16/02243-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.02.2017 | 28/17 | 16/02243-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 21/17 | 16/02243-2 |
| 6 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 68/17 | 16/02243-2 |

**Málslýsing:**
Umsókn er komin frá Jóhannu Andreasen, um at leiga ein part av økinum vestan fyri Vágsbotn 14 ( matr. nr. 190 ) har ætlanin er at byggja eina terassu til at nýta til útikafé.

Terassan verður bygd frá verandi Altan í Vágsbotni 14, og eisini frá Gríms Kambansgøtu.

Umsøkjarin leigar aðru og triðju hædd í Vágsbotni 14, har kafé verður innrættað.

Vísandi til at umsøkjarin bindir seg til at gera terassuna, verður mælt til at gera 5 ára leigumál.

Tað kann viðmerkjast at tekniska nevnd 10.04.2013 og fíggjarnevnd 17.04.2013, samtyktu, at vísa til eitt økið, í samband við at Mouldi Manai ( Sp/f La Terasse ) søkti um eitt økið til útiservering framman fyri sama bygning. Sí skjal nr. 14/00544–16 og 20) og verður mælt til at brúka hesa staðseting í staðin.

Umsøkjarin fær loyvi til útiborðreiðing á Gríms Kambansgøtu, sum kann nýtast til borðuppstillan, og annars eftir somu treytum og fyri sama tíðarskeið sum kommunan hevur góðkent til útiservering hjá øðrum, ið reka líknandi virksemi.

Somuleiðis fær umsøkjarin loyvi at gera eina timbur terassu út av kantinum, sum hann kann nýta árið runt, sambært nærri ásettari leiguavtalu fyri undirlendið.

Talan er um eina eitt sindur øðrvísi loysn, enn sambært umsóknini hjá Jóhannu.

Umsøkjarin skal søkja um byggiloyvi til terassuna.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at gera eina 5 ára brúksavtalu uppá tað lendið sum verður bygt av timbri, og annars til vanliga avtalu, sí reglugerð um útiborðreiðing í almenna rúminum í Tórshavnar kommunu.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við, at gjørd verður brúksavtala um lendið, tó so, at loyvi ikki verður givið til at hava virksemið á Grím Kambans Gøtu.

**Ískoyti:**

Borgarstjórin biður um at fáa málið á skrá.
Borgarstjórin vísir á, at málið eigur at fara fyri teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 30. december 2016:** Samtykt at beina málið í teknisku nevnd og byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Býarskipan hevur hugt at uppskotinum um at gera nýggja terassu á matr. nr. 190 og metir, at virksemið er í tráð við miðbýarætlanina og grundleggjandi hugsanina at stuðla undir livandi býarlívi í miðbýnum. Seinnu árini er Vágsbotnur vorðin ímyndin av kafévirkseminum í høvuðsstaðnum, og sambært miðbýarætlanini verður lagt upp til at fáa fleiri kaffihús við útiborðreiðing, tískil stuðlar umsóknin undir býarskipanini í Vágsbotni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at ganga umsóknini á møti um at byggja nýggja timbur terassu á matr. nr. 190.

**Tekniska nevnd 14. februar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. februar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Bogi Andreasen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt, at Bogi Andreassen ikki luttók í viðgerðini av málinum.

Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bergun Kass, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Atkvøddi blankt: Heðin Mortensen.

# 69/17 Bústaðir : Umsókn um keyp av ovara parti av matr. 1464a, – ætlan at byggja vardar íbúðir á 1464i, Tórshavn – Berjabrekka 3

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 28.09.2015 | 192/15 | 15/02355-4 |
| 2 Býráðsfundur | 30.09.2015 | 158/15 | 15/02355-4 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 331/16 | 15/02355-4 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.01.2017 | 15/17 | 15/02355-4 |
| 5 Tekniska nevnd | 14.02.2017 | 7/17 | 15/02355-4 |
| 6 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 20/17 | 15/02355-4 |
| 7 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 69/17 | 15/02355-4 |

**Málslýsing:**
Bústaðir søkir í skrivi 17. juli 2015, um at keypa uml, 9.000 m$^2$ av matr. nr. 1464a, har ætlanin er at byggja íbúðir.

Harumframt verður nevnt at eftir avtalu við Almannaráðið, skulu Bústaðir fáa til vega 12 íbúðir til fólk við sálarsjúku. Felagskapurin Sinnisbati eigur matr. nr. 1446i (vídd 1.368 m$^2$) , og hevur Sinnisbati áhuga í at lata Bústøðum grundstykkið, um tey vera ein partur av samlaðu verkætlanini.

Samlaða byggiætlanin umfatar tískil eitt samlað økið á uml.10.400 m$^2$. Sí Skitsu av nýggja býlinginum. Skjal 15/02355-3.

Gongur Tórshavnar kommuna Bústøðum á møti við umsóknini um keyp av lendi, fer Bústaðir, Almannaráðið og Tórshavnar Kommuna undir at menna verkætlanina soleiðis, at hon kann setast í verk í inniverandi ári.

Ætlanin hjá Bústøðum er enn á skitsustøði. Bústaðir ynskir at tryggja sær rættin til lendið, meðan arbeitt verður víðari við ætlanini, sum seinni verður fyriløgd kommununi.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at geva Bústaðir – Føroya Bústaðarfelag - eina optión uppá lendið í 2 ár.

**Fíggjarnevnd 28. september 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Einmælt samtykt.

Býráðsfundir 30. september 2015: **Einmælt samtykt.**

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Einmælt samtykt.

Býráðsfundir 30. september 2015: **Einmælt samtykt.**

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Einmælt samtykt.

Býráðsfundir 30. september 2015: **Einmælt samtykt.**

**Býráðsfundir 30. september 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**
Bústaðir hevur ynski um at kunna keypa eitt økið á 824 m$^2$, sum liggur millum matr. Nr. 1464i og Sundsvegin. Sí kortskjal 15/02355 – 12

Økið liggur framvið Sundsvegnum, og hevur kommunan verkætlan um eina møguliga rundkoyring á økinum.

Harumframt er neyðugt at taka støðu til atkomuviðurskifti v.m.

**Tilmæli.**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Hædd eigur at verða tikin fyri møguleikanum at framtíðartryggja økið soleiðis, at møguleiki verður fyri at tillaga verandi rundkoyring og at gera nýggjan busslumma sambært uppskoti 15/02355-14. Eisini eigur ein ferðslu grannskoðan at verða gjørd fyri økið, serliga við út- og innkoyringina við Mylnuna.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at ætlanin verður sambært uppskoti 15/02355-14, at ferðslu grannskoðan verður gjørd fyri økið og at málið verður beint í teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. januar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bústaðir hevur sent inn uppskot til støðumynd 15/02355-16, ið er í tráð við uppskot frá umsitingini 15/02355-14.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við uppskoti 15/02355-16.

**Tekniska nevnd 14. februar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti.**
**Tekniska nevnd 14. februar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
**Ískoyti.**

Býráðið samtykti 30. september 2015, at geva Bústaðir eina optión uppá lendið uml. 9.000m2 av matr. Nr. 1464a, í 2. ár.

Endaligu víddarmálingarnar fyriliggja ikki, men verður talan um at selja lendið til

Bústaðir upp til uml. 9.500m2 ( íroknað geiran sum liggur millum matr.nr. 1464i og vegin, sí kortskjal 15/02355-19 )

Kommunan hevur áður selt óbygt lendið til Bústaðir fyri kr. 156,- m2.

Í samband við at kommunan í 2013, seldi lendið á Óðinshædd til Bústaðir fyri kr. 156m2, fekk kommunan loyvi frá Innlendismálaráðnum, sí skjal 2002-0627/40

Innlendismálaráðið vísir millum annað til at sambært § 1 í løgtingslóg nr. 62 frá 31. mai 2010 um Húsalánsgrunn, er endamálið við Húsalánsgrunninum, at øll í Føroyum skulu hava møguleika fyri at útvega sær ein bústað, at tryggja fjølbroytni á Bústaðarmarknaðinum og at stuðla upp undir veðurlagspolitikkin við at minka um orkunýtslu í føroyska býlishópinum. Sambært § 5b kunnu kommunurnar saman við Húsalánsgrunninum utvega, reka og leiga út íbúðir, íbúðarhús og lestraríbúðir.

Innlendismálaráðið metir tí, at Tórshavnar kommuna røkir ein konkretan sakligan kommunalan áhuga við søluni av grundøkjum til Bústaðir – Føroya Bústaðarfelag.

Um kommunan selur grundøkini undir marknaðarprís, skal kommunan tryggja sær, at tann kommunali áhugin verður røktur í samband við søluna, soleiðis at grundøkini verða nýtt til tað endamál, sum er treytin fyri søluni. Kommunan skal tá í avtaluni við keypara tryggja sær, at bygt verður í samsvar við fortreytirnar í lógini um Húsalánsgrunn, m.a. at leigugjaldið verður so lágt sum møguligt, at bústaðirnir fáa álagt bústaðarskyldu, at bústaðirnir verða bygdir við atliti at orkusparing og nýtslu av alternativum orkusløgum, og at matriklarnir ikki kunnu seljast ella avhendast til onnur endamál uttan góðkenning kommununar.

**Í samband við søluna av lendi til Bústaðir setir kommunan millum annað hesar treytir í skeytið.**

Øll bygging skal vera í trá við galdandi byggisamtyktir fyri økið.
Kommunan treytar sær at bygt verður í samsvar við fortreytirnar í lógini um Húsalánsgrunn, m.a. at leigugjaldið verður so lágt sum møguligt, at bústaðirnir fáa álagt bústaðarskyldu, at bústaðirnir verða bygdir við atliti at orkusparing og nýtslu av alternativum orkusløgum, og at matriklarnir ikki kunnu seljast ella avhendast til onnur endamál uttan góðkenning kommununar.

Skeytið verður eisini áteknað servituttbindandi við eini áseting um 2 ára byggifreist frá tinglýsingardegi, og at grundstykkið kann fella aftur til kommununa móti at uppruna keypspeningurin uttan rentur verður afturgoldin. Fellur grundstykkið aftur av hesi orsøk, og keyparin hevur byrjað bygging, kann hann fáa prógvaðar útreiðslur endurgoldnar uttan rentur í tann mun, tað gjørda arbeiðið kemur seljaranum ella øðrum keypara av sama grundstykki til góðar.Allar útreiðslur í samband við møguliga afturskeyting falla til keypara. Tórshavnarkommuna verður hildin skaðaleys fyri eini og hvørjari útreiðslu í hesum sambandi.

**Tilmæli.**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at selja lendið í alt uml. 9.500m2, til Bústaðir fyri kr. 156 m2. sum er tann prísurin sum kommunan vanliga selur lendið til Bústaðir fyri.
Keyparin skal rinda fyri matrikulering, skrivan av skeyti og fyri tinglýsing umframt aðrar møguligar útreiðslur í samband við keypið.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

# 70/17 Pant í matr. nr. 1456a, Tórshavn eigarar Anna Dalsgaard, Ása, Ólavur og Tórhild Justinussen

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 24/17 | 17/00163-1 |
| 2 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 70/17 | 17/00163-1 |

**Málslýsing:**

**Viðvíkjandi matr. nr. 1456a, Tórshavn.**

Í samband við at eitt grundstykkið ( matr. nr. 1456c ) í 1982 varð frámatrikulerað trøðni matr. nr. 1456a, kravdi kommunan, at táverandi eigari av trøðni veðsetti kr. 60.000,00 til kommununa sum trygd fyri uppfylling av treytunum sambært útstykkingarætlan.

Hetta eina grundstykkið varð tá frámatrikulerað, og er sjálv útstykkingin av trøðni ikki avgreidd fyrr enn í 2014.

Sí mál nr. 14/02307, hevur kommunan góðkent útstykkingina og yvirfyri matrikulmynduleikanum, viðmælt frábýtið

Trupulleikin er nú, at upprunaligað pantið, framvegis liggur sum veð í trøðni, og kemur at fylgja við yvir á allar frábýttu lutirnar.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini, mæla fíggjarnevndini til at strikað tinglýst veð áljóðandi kr. 60.000,00 í matr. nr. 1456a, Tórshavn.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

# 71/17 Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 151/14 | 14/03408-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.06.2014 | 203/14 | 14/03408-18 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 148/14 | 14/03408-18 |
| 4 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 207/14 | 14/03408-18 |
| 5 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 22/15 | 14/03408-18 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.05.2015 | 72/15 | 14/03408-18 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2015 | 117/15 | 14/03408-18 |
| 8 Mentamálanevndin | 19.10.2015 | 209/15 | 14/03408-18 |
| 9 Tekniska nevnd | 20.10.2015 | 112/15 | 14/03408-18 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 199/15 | 14/03408-18 |
| 11 Býráðsfundur | 21.10.2015 | 173/15 | 14/03408-18 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 236/15 | 14/03408-18 |
| 13 Fíggjarnevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 14 Býráðsfundur | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 15 Mentamálanevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 16 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 12/16 | 14/03408-18 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 24/16 | 14/03408-18 |
| 18 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 52/16 | 14/03408-18 |
| 19 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 38/16 | 14/03408-18 |
| 20 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 133/16 | 14/03408-18 |
| 21 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 158/16 | 14/03408-18 |
| 22 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 128/16 | 14/03408-18 |
| 23 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 222/16 | 14/03408-18 |
| 24 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 162/16 | 14/03408-18 |
| 25 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 273/16 | 14/03408-18 |
| 26 Mentamálanevndin | 27.10.2016 | 275/16 | 14/03408-18 |
| 27 Fíggjarnevndin | 27.10.2016 | 364/16 | 14/03408-18 |
| 28 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 247/16 | 14/03408-18 |
| 29 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 367/16 | 14/03408-18 |
| 30 Mentamálanevndin | 24.11.2016 | 300/16 | 14/03408-18 |
| 31 Fíggjarnevndin | 29.11.2016 | 396/16 | 14/03408-18 |
| 32 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 297/16 | 14/03408-18 |
| 33 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 323/16 | 14/03408-18 |
| 34 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 312/16 | 14/03408-18 |
| 35 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 404/16 | 14/03408-18 |
| 36 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 44/17 | 14/03408-18 |
| 37 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 71/17 | 14/03408-18 |

## Málslýsing:

**2012-1064/17 SG**

**Fyrireika bygging av nýggjum skúla**

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur

Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021 (sí mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, verður m.a. mælt til at byggja nýggjan trý sporaðan skúla í staðin fyri Tórshavnar kommunuskúla og Venjingarskúlan. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum. Haraftrat er lagt upp til at hava tilboð til næmingar við serligum avbjóðingum.

Hesin nýggi skúlin hevur arbeiðsheitið Vesturskúli við tað, at hann ætlandi verður staðsettur í Vesturbýnum inn frá Landavegnum, har økið eisini er lagt av til at byggja ítróttahøll. Inn frá Marknagilsvegnum verður miðnámsskúladepilin granni.

Tørvur er á at gera uppskot til eitt meira útgreinað konsept bæði um samlaða virksemið í skúlanum og bygningin sjálvan. Hetta arbeiðið er at meta sum ein fyrsta fyrireiking og hugskotsgrundarlag fyri víðari politiskari viðgerð og støðutakan til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri umsitingina, skúlarnar, frítíðarskúlarnar og møguliga onnur at gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlanum at lata mentamálanevndina aftur til viðgerðar í seinasta lagi 15. juni 2012.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur latið gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlan, sí frágreiðing. Arbeiðsbólkurin hevur m.a. lýst námsfrøðiliga profilin við atliti at eitt nú ætlanini um deildarbýti, floks- og hølisbýti, samstarv millum lærarar og pedagogar, samstarv millum skúlar, serundirvísing og næmingatrivnað. Harumframt verður nomið við staðsetingina, bygningsstødd v.m.

Konseptið er í góðum samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingarnar frá skúlastýrunum (máltal 2011-0679).

Mett verður, at tilfarið, ið arbeiðsbólkurin hevur latið úr hondum, saman við álitinum um skúlabygnað og skúlabygging og viðmerkingunum frá skúlastýrunum er haldgott grundarlag fyri at fara víðari í tilgongdini at fyrireika bygging av nýggjum Vesturskúla. Næsta stigið er sostatt at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá.

Til endamálið skal fígging fáast til vega. Í sambandi við heildarætlanina fyri Kommunuskúlan eru uml. 3 mió kr. ikki brúktar. Nýggi Vesturskúlin er ein samanlegging av Kommunuskúlanum og Venjingarskúlanum, og tí verður mett, at hesir pengar kunnu játtast og flytast til nýggju skúlaætlanina fyri hesar báðar skúlar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá til nýggjan Vesturskúla í samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging, og at áður játtað upphædd kr. 3 mió frá kontu 4175 Dagføring av skúlum L41003 Kommunuskúlin høvuðsumvæling verður flutt til bygging av nýggjum Vesturskúla.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri leiðslur, lærarar og foreldur í skúlastýrunum í Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og umboðum fyri umsitingina (sí mál nr. 14/00423) hevur gjørt uppskot um bygnaðarliga samskipan og samanlegging av Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og tíðarætlan.

Á býráðsfundi 22. mai 2014 varð samtykt at broyta ætlaða talið av sporum í Vesturskúlanum soleiðis, at trý spor vera í yngru flokkunum og fimm spor í 8. og 9. flokki (sí mál nr. 14/00423).

Grundøkið við Landavegin, sum ætlanin er at byggja skúlan á, er 34.000 $m^2$, til samanberingar eru grundøkini hjá Skúlanum við Løgmannabreyt og Skúlanum á Argjahamri ávikavist 22.000 $m^2$ og 20.000 $m^2$.

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið, sum ein arbeiðsbólkur læt úr hondum í juni 2012, og nevndin er samd um, at tað uppskotið er gott grundarlag at brúka í fyrireikingini at byggja nýggja skúlan í vesturbýnum.
Á fundi mikudagin 18. juni 2014 samtykti bygginevndin at biðja um, at 1.300.000 kr., sum settar eru av til av Vesturskúla, verða játtaðar til fyrireiking og til byggiskrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 1.300.000 kr. til fyrireiking og útvegan av byggiskrá av konto 4176 Nýbygging av skúlum.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Støðan í dag.

Tøkt lendi, sum ætlanin er at byggja á:

| | | |
|---|---|---|
| Matr.nr. | 1099 | 14.660 m² |
| Matr.nr. | 1100 | 15.280 m² |
| Matr.nr. | 1102c | 5.879 m² |
| Tilsamans | | 35.819 m² |

Hesir matriklar eru allir D3-øki Almennir stovnar.

Samtykt er, at skúlin skal byggjast til 850 næmingar, og við grundarlagi í verandi skúlum við Løgmannabreyt og á Argjahamri eru umleið 14 m² fyri hvønn næming.
Nýggi skúlin skal sostatt vera 850 x 14 m² = 11.900 m² til støddar.

Neyðugt er at útvega meiri lendi, tí serstaka byggisamtyktin fyri Marknagil ásetur nettonýtslustig 0,3, sum krevur eitt grundøkið uppá 39.700 m².

Ætlanin er at nýta matr.nr. 1104d ella partar av hesum matrikli afturat. Kommunan eigur grundøkið, sum er 6.576 m² til støddar.

Soleiðis verður samlaða víddin økt úr 35.819 m² til 42.395 m².

Bygginevndin hevur á fundi 11. desember 2014 samtykt at mæla til, at matr.nr. 1104d verður lagt afturat samlaða økinum til Vesturskúlan.

Upplýsast skal, at matr.nr. 1104d er C3-øki Miðstaða- bústaðarbygging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið 1.part av byggiskránni (Byggiskrá Fyritreytir) og mælir til at góðkenna hana við tí fyrivarni, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingingini, áðrenn útbjóðað verður.

Víst verður til skjal 15/01528-2, sum er viðfest.

Sambært tíðarætlanini verða 2. og 3. partur av byggiskránni lidnir í september. 2. partur er námsfrøðilig viðurskifti og 3. partur er teknisk viðurskifti.

**Tilmæli til mentamálanevndina:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og góðkenna fyrsta part av byggiskránni.

**Ískoyti:**
Eftir at málið var fyri í mentamálanevndini, hevur fundur verið á teknisku deild við luttøku av umboðum fyri Landsverk og Rambøll um atkomuviðurskiftini til Vesturskúlan. Niðurstøðan frá fundinum var, at Rambøll skuldi koma við einum uppskoti til loysn og gera eina innkoyring frá Marknagilsvegnum ígjøgnum nevnda matr.1104d.
Mál 14-03118-22. Hjáløgdu kort sum vísa uppskot til loysn.

**Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**
Tekniski stjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og teknisku deild og nýta matr. nr. 1104d fyri at halda kravið um nettunýtslustig til byggingina og møguligan atkomuveg frá Marknagilsvegnum til Vesturskúlan.

**Mentamálanevndin 6. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til mentamála-nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 12. oktober 2015 samtykt endaliga byggiskrá fyri byggiverkætlanina Skúlin á Fløtum. Byggiskráin, ið er hjáløgd, er í trimum pørtum:

1. Fortreytir
2. Námsfrøðilig viðurskifti
3. Teknisk viðurskifti

**Grundøki**
Eitt øki í Marknagili er lagt av til Skúlan á Fløtum www.saf.fo . Økið er tilsamans 42.335 $m^2$ og er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil kunnu bygningurin/bygningarnir í mesta lagi vera 10.583 $m^2$ við tilsamans 12.700 innrættaðum $m^2$. Støddin á skúlanum verður 11.600 $m^2$ við møguleika at byggja út til tveir flokkar aftrat í 7. árgangi.

**Kostnaður**
Metta samlaða íløgan til handverkaraútreiðslur uttan meirvirðisgjald verður:
11.600 $m^2$ av gólvvídd fyri 11.600 $m^2$ x 20.000 kr.= 232.000.000 kr.

**Tíðarætlan**
Byggingin verður skipað sum ein bygging í trimum byggistigum. Sambært tíðarætlanini verður fyrsta byggistig liðugt í juli 2018, og tá flytur miðdeildin (4.- 6-fl.) inn í skúlan. Annað byggistig er til hádeildina (7.-9.fl.), og tað verður liðugt í juli 2019. Í juli 2020 verður triðja byggisstig liðugt, og tá flytur grunddeildin (0-3- fl. og frítíðarskúli) inn í skúlan.

Málið verður viðgjørt í mentamálanevndini, tekniskunevnd, byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini og í býráðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjóri og býararkitekturin mæla mentamálanevndini til at góðkenna byggiskránna og at beina málið víðari til teknisku nevnd, ið skal beina málið víðari til byggi- og býarskipanarnevndina, ið skal beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í avvarðandi nevndir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at nevndin tekur undir við byggiskránni fyri tann partin sum viðkemur vegaføringar, ferðsluviðurskiftir og leiðingar í sambandi við verkætlanina, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Timæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við byggiskránni, fyri tann partin, sum viðkemur býarskipan og staðseting, og at beina málið í býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at góðkenna byggiskránna og at beina málið í býráðið, og heitt verður samstundis á teknisku nevnd um í góðari tið at skipa øll nøktandi vega- og ferðsluviðurskifti við skúlarnar.

**Býráðsfundir 21. oktober 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti at góðkenna byggiskránna.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri Skúlan á Fløtum var útskrivað 23. oktober 2015 eftir at Tórshavnar býráð 21. oktober 2015 hevði samtykt byggiskránna fyri Skúlan.

Fýra ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey vóru:
- Elvi (Selmar Nielsen Arkitektar, Ósbjørn Jacobsen Arkitektar, LBF og SMJ)
- BIGKONTRAST (BIG-Bjarke Ingels Group, Kontrast byggilist og byggifrøði, LBF, SMJ)
- Árni Winter arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF
- MAP Arkitektar, Arkitektar 99, LBF og PB-Consult

18. desember 2015 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og var tað latið navnloynt soleiðis, at nevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

4. januar 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat ráðgevaratoymið skal fáa møguleikan at innganga avtalu um ráðgeving, projektering og eftirlit av skúlabyggingini. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um projektering og eftirlit, og at venda aftur við einum uppskoti til sáttmála.

**Mentamálanevndin 6. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. januar 2016:** Einmælt samtykt at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið: Árni Winther arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF og uppskoti teirra, Eindirnar í heildini.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur á fundi 9. februar 2016 samtykt samráðingarúrslitið frá samráðingunum hjá samráðingartoyminum (umboð frá bygginevnd og teknisku fyrisiting) við vinnandi ráðgevaratoymið í hugskotskappingini. Talan er um samtak, ið eitur Samtakið Eind Í/F (undir stovnan).

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini til at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, fílist á, at tilmælið við tilfari kom ikki fyrrenn á sjálvum fundinum og tekur ikki støðu til málið í dag.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Verkætlanin er komin so mikið áleiðis at klárt er at fara undir jørðarbeiðið. Í fyrsta lagi avgrevstur, ið m.a. skal geva betri yvirlit til víðari jørðarbeiði t.e. spreinging, grovplanering, planering vm.

Útboð hevur verið av avgrevstrinum. Kostnaðarmetingin lá millum 1,1 og 1,4 mió. kr.

2 arbeiðstakarar vóru bodnir at bjóða. Lisitatión var 3. mai 2016 kl. 14.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| P/F Articon | kr. 1.294.147 |
| H. V. Lützen | kr. 1.772.448 |

Ikki íroknað MVG.

Farast kann í holt við arbeiðið innan umleið 3 vikur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka undir við at gera sáttmála við lægsta tilboðsgeva og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Sáttmálin væntast klárur til viðgerðina í figgjarnevndini.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndni og beina málið í býráðið.

***Býráðsfundur 19. mai 2016: Einmælt samtykt.***

*Ískoyti*
*Á karminum eru fyri 2016 játtaðar 30,8 mio.kr. á stovnsnr. 4174 – Nýbygging skúlar (íløgur). Projekteringin av skúlanu er nú gott ígongd, umframt at jørðarbeiðið er um at fara í gongd. Tørvur er á áleið upphæddini til virksemi í ár.*

*Tilmæli*
*Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla at játta 30,8 mio.kr. á projektkonto L41012.*

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Eftir at fyrra útbjóðingin bleiv annulerað í summar hevur bygginevndin saman við Ráðgevarasamtakinum Eind gjøgnumgingið skipanaruppskotið vm. og gjørt ávísar tillagingar. Yvirlit sæst í hjálagda skjali.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka tillagingarnar til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
20. oktober 2016 kl. 14 var licitatión uppá bygging av nýggjum skúlabygningi til Skúlan á Fløtum.

Hesi feløg/samtøk vóru boðin at bjóða í innbodnari licitatión og teirra høvuðsboð eru:

| | |
|---|---|
| P/F MT Højgaard Føroyar við undirarbeiðstakarum | - 287.151.814 kr. |
| P/F J&K Petersen, Sp/f Húsavarðatænastan og Sp/f TG Verk við undirarbeiðstakarum (eisini nevnt: Samtakið í Havn) | - 298.955.524 kr. |
| P/F Articon og Sp/f Búsetur við undirarbeiðstakarum | - 267.809.320 kr. |

Høvuðsráðgevin Samtakið Eind Í/F hevur, eftir innanhýsis viðgerð og gjøgnumgongd av tilboðunum, saman við umboðum fyri Tórshavnar kommunu, latið tilmæli 26. oktober 2016 viðvíkjandi hvat av samtøkunum skal fáa í boði at gera eina partalagsavtalu (fasu I) og har ætlandi raka ein targetprís, sum síðani vil innibera eina endaliga partalagsavtalu (fasu II) og ein arbeiðstøkusáttmála.

Henda tilgongdin kemur ætlandi at byrja 1. november 2016 og gongur fram til í januar 2017, tá komið ætlandi verður aftur í nevndir og býráð við einum úrsliti og tilmæli.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur 26. oktober 2016 viðgjørt tilmælið frá Samtakinum Eind og umrøtt málið saman við teknisku fyrisiting. Bygginevndin tekur undir við tilmælinum frá Samtakinum Eind (sí tilmælið á nevndarportalinum).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara í partalag (fasu I) við lægsta tilboðsgeva. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. oktober 2016:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála og kostnaðarmeting verður tøkt til fundin. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiði fíggjað av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Mett verður, at samlaði íløgutørvurin til byggingina av Skúlanum á Fløtum fíggjarárið 2017 verður umleið kr. 70 mió.

Í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2017 eru settar kr. 42,075 mió av til endamálið. Í hesum sambandi er fráboðað, at írestandi fíggingin til komandi fíggjarár kr. 28 mió skal játtast sum eykajáttan í inniverandi fíggjarári av løgukarmi 5175 Musikkskúlin.

Partalagssáttmáli er undirskrivaður. Umframt avgrevsturin, sum er liðugur, verður grót- og spreingiarbeiðið byrjað í ár, og byggingin av sjálvum bygninginum byrjar ætlandi í apríl 2017.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjóri mæla til at samtykkja eykajáttan kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 24. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum við teirri viðmerking, at meirinntøkurnar fyri fíggjarárið 2016 skulu játtast til arbeiðið at byggja Musikkskúlan og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið at viðgera tvær ferðir.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála er gjørt, kostnaðarmetingin fyri arbeiðið er kr. 7.386.512 u/mvg. Harumframt koma útreiðslur til byggipláss uml. kr. 500.000 og mvg, samlaður kostnaður umleið kr 8.500.000. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiðið og játta kr. 8.500.000 av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ì sambandi við, at byggiverkætlanin verður skipað í partalagssamstarvi millum Tórshavnar kommunu, Samtakið Eind Í/F og Samtakið Articon – Búsetur Í/F, skal sbrt. partalagsskipanini skipast ein stýrisbólkur við umboðum fyri Tórshavnar kommunu og bæði samtøkini.

Bygginevndin, sum hevur virkað higartil, gongur tí út, men mælt verður til, at býráðið velur umboð í stýrisbólkin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at velja umboð í stýrisbólkin í partalagnum.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vóru Gunnvør Balle, Jákup Dam, Helena Dam á Neystabø og Heðin Mortensen.

# 72/17 Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 132/16 | 14/00218-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 31.08.2016 | 210/16 | 14/00218-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 280/16 | 14/00218-2 |
| 4 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 237/16 | 14/00218-2 |
| 5 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 243/16 | 14/00218-2 |
| 6 Mentamálanevndin | 02.11.2016 | 296/16 | 14/00218-2 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 33/17 | 14/00218-2 |
| 8 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 72/17 | 14/00218-2 |

**Málslýsing:**

**Mál nr. 14/00218 – Umbygging Býarbókasavnið heildarætlan**

Á kontu 5475 Býarbókasavnið (íløgur) fyri 2016 eru játtaðar 3.000 tkr.

Í 2014 varð fyrireikingararbeiði gjørt viðvíkjandi út- og umbygging av Býarbókasavninum (BBS). Sí hjálagt skjal 1 og skjal 2 við uppskoti til verkætlan, ið Sp/f Árni Winther Arkitektar stóðu fyri. Sí eisini hjáløgdu ársfrágreiðing og mál- og avriksavtalu hjá BBS – skjal 3 og 4.

**Ætlan og kostnaðarmeting**
Heildarætlanin varð tá mett til 37 mió. kr. íroknað innbúgv v.m. Umsitingin og BBS meta, at uppskotið sum heild er gott og kann vera grundarlagið fyri víðari viðgerð.

**Stuðul frá landinum sbrt. § 15, stk. 2 og 3 í bókasavnslógini**
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samskifti við Mentamálaráðið og Landsbókasavnið viðvíkjandi stuðli. Lógin ásetur, at landið veitir upp til 50% í studningi til bygging, um- ella uppíbygging. Neyðugt er, at landsstýrismaðurin í mentamálum góðkennir verkætlanina eftir tilmæli frá Landsbókasavninum og sum skilst eisini Landsverki. Við atliti til at fáa greiði á fíggingini er neyðugt sum skjótast at fáa sent prinsipiella umsókn til Mentamálaráðið og Landsbókasavnið, soleiðis at landið kann fyrireika játtan til endamálið í 2017-2019/20. Um støði verður tikið í § 15, stk. 3, er býtið millum kommununa og landið umleið 18,5 mió. kr. í part, og um landið rindar yvir 4 ár, so umleið 4,6 mió. kr. um árið árini 2017-2020. Við fyrivarni fyri at landið góðkennir allar útreiðslurnar!

**Bygging í stigum og aðrar fyritreytir**
Av tí at BBS framhaldandi skal virka so ótarnað sum gjørligt og við atliti til, at umbyggingin órógvar starvsfólk og viðskiftafólk sum minst, er ætlanin at fremja verkætlanina í stigum. Ein týðandi fyritreyt fyri tí er, at greiði verður á, um og nær KT-deildin og fíggjardeildin flyta úr bygninginum, tí tað vil geva betri pláss til umbyggingina.

Byggistigini eru hugsað at kunna verða framd soleiðis:

| Ár/ stig | Ætlan | Viðmerkingar |
|---|---|---|
| **2016/17** | • Kjallari innrættast og takast í nýtslu sum opin goymsla (Bøkur flytast av goymslu á 4. | *Lyfta og trappuuppgongd skulu umvælast eisini.* |

| | | |
|---|---|---|
| | hædd + Eysturskúlanum til kjallaran).<br>• Byrja at umvæla tekju, útveggir og takpall sambært ætlan.<br>• Starvsfólk flyta niður á 2. hædd út móti Sverrisgøtu/Káta Horni, har fyribils skrivstovukjarna kann vera, meðan arbeiðið fer fram.<br>• Núverandi skrivstovuhølir kunnu takast upp í útlánið á 2. hædd og geva rúm fyri bókum frá Sverrisgøtu.<br>• Byrja at umvæla og innrætta 4. hædd til barna- og ungdómsdeild. | *Kunnu bøkur úr útláninum evt flytast niður á 1. hædd, meðan arbeiðið fer fram?* |
| **2017/18** | • Framhaldandi umvæling og innrætting av 4. hædd (+ evt hølini hjá Fíggjardeild).<br>• Tá 4. hædd er liðug, ber til at flyta alt virksemið frá Barnabókasavninum av 3. hædd upp á 4. hædd.<br>• Byrja at umvæla 3. hædd sambært ætlan (+ KT-deild).<br>• | *Kjallari, 1. hædd, partur av 2. hædd og 3. hædd fullvirkin, meðan arbeiðið fer fram.* |
| **2018/19** | • Framhaldandi umvæling av 3. hædd.<br>• Tá 3. hædd er liðugt umvæld, ber til at flyta útlánið av 2. hædd upp á 3. hædd.<br>• Umvæling og innrætting av 2. hædd. + 1 nýggja lyftu og trappuuppgongd. | *4. hædd tikin í nýtslu sum barna- og ungdómsdeild, skert ella einki virksemi í útláninum á 2. hædd.*<br><br>*Skrivstovukjarna út móti Sverrisgøtu má flytast, meðan arbeiðið fer fram. Hvar? Evt. partur av 3. hædd.* |
| **2019/20** | • Umvæling og innrætting av restini av kjallara.<br>• 1. hædd liðugt umvælast og innrættast.<br>• **1. apríl 2019 fyllir BBS 50 ár.** | |

**Yvirskipað um Býarbókasavnið**
Býarbókasavnið hevur seinastu árini verið í positivari menning. Bókasavnið er ein av mest vitjaðu mentanarstovnunum í kommununi og er eisini størsta fólkabókasavn í landinum. Seinasta brúkarakanning vísir, at 65% av borgarunum í kommununi hava seinasta árið verið á gátt.[1] Hetta er væl meir enn í grannalondum okkara, har miðaltalið liggur um 50%. Eisini síggja vit ein risa vøkstur av vitjandi seinastu 5-6 árini, har talið er vaksið frá 80.000 vitjandi til at tátta í tey 140.000 í 2015. Hetta er ein vøkstur uppá 16% í 2015. Nøgdsemið er stórt millum brúkararnar, og starvsfólkið støðast og trívist væl á arbeiðsplássinum.

Positiva gongdin er ikki uttan orsøk. Hon er neyvt tengd at eini miðvísari menning av bókasavninum sum ein meiri sjónligur og atkomiligur viðspælari í miðbýarøkinum, eitt alsamt meiri nútímansgjørt bókasavn við betri og fleiri tilboðum og tænastum á høgum stigi.

1 Kanningin varð gjørd 15.03.16. Kanningina gjørdi spyr.fo v/Allani Dalsgarð.

Gongdin kann í stuttum lýsast soleiðis:

Í 2009 keypti Tórshavnar kommuna bygningin á Niels Finsensgøtu 7.[2] Samstundis varð eisini farið undir at endurnýggja og nútímansgera niðastu hædd. Í 2012 stóð veghæddin klár at taka í nýtslu. Í 2012/2013 fekk bókasavnið nýggja leiðslu, har størri dentur varð lagdur á ein meiri málrættaðan bókasavnsprofil. Millum annað fór man burtur frá “ad hoc”- leiðsluhátti til ein meiri stategiskan leiðsluhátt. Bygnaðarbroytingar vórðu framdar. Farið varð burtur frá tí flata bygnaðinum, og í staðin varð farið yvir til ein bygnað við fleiri ábyrgdarøkjum, sum eisini arbeiða uppá tvørs í toymum. Í 2014 varð eisini varaleiðari settur. Í 2015 varð avgreiðslusamskipari settur. Í 2015 fær Tórshavnar kommuna nýggjan mentamálaleiðara, har samstarvið og dialogurin millum stovn og kommunufyristing verður styrktur. Millum annað verður ein mál- og avrikssáttmáli gjørdur og undirskrivaður, har sett verður út í kortið, hvørji mál og avrik bókasavnið næsta árið skal seta sær fyri at fremja og miða ímóti.

Eitt av fremstu málum og eisini størsta avbjóðingin fyri áhaldandi menning og trivnaði á bókasavninum eru hølisviðurskiftini, sum í verandi líki forða fyri áhaldandi menning.

**Framtíðarkósin**
Umframt lógarásettu karmarnar, sum ásetur bókasøvnum at fremja upplýsing, lærdóm og mentanarligt virksemi, so hava nútímans fólkabókasøvn fingið ein broyttan leiklut í mun til áður. Bókasøvn eru ikki longur friðarligar bókagoymslur, men eru vorðin livandi og dynamisk støð, sum laga seg eftir økta og broytta bókasavnstørvinum í nútíðarsamfelagnum. Eitt stað, sum spælir ein aktivan leiklut í lokaløkinum, sum tað í størri mun enn áður er við til at revitalisera og menna. Fyrilestrar, kjak, rúm fyri læring og fordjúpilsi og nógv onnur tiltøk, sum ikki einans snúgva seg um bókaútlán, knýta seg at modernaðum bókasavnsvirksemi.

Hendan gongd hevur eisini merkt virksemið á Býarbóksavninum seinastu árini. Í dag er Býarbókasavnið eitt meiri opið og sjónligt stað, sum eftir førimuni markerar seg úteftir við regluligum tiltøkum, við at vera sjónligt í miðlunum, við eini aktivari heimasíðu og við luttøku í sosialu miðlunum. 1. januar 2015 økti bókasavnið munandi um upplatingartíðirnar. Í dag hevur bókasavnið sostatt opið hvønn dag – eisini sunnudag og gerandisdagar til seint út á kvøldið. Nógv fleiri fólk leita sær á bókasavnið og brúka tænasturnar á staðnum uttan neyðturviliga at fara avstað aftur við eini bók undir arminum.

Hetta setur onnur krøv til hølisviðurskiftini, sum komast skal nærri inná niðanfyri.

**Býarbókasavnið, verandi viðurskifti**
Í mong ár hava hølisviðurskiftini á Býarbókasavninum ikki verið nøktandi til virksemið tess. Bygningurin er 50 ára gamal, og lítið er gjørt við hann hesa tíðina. Umframt at hølini eru niðurslitin, hevur bókasavnið eisini verið plágað av lekum og blámusoppi, til ampa fyri starvs- og viðskiftafólk. Plásstrot er, bæði til bøkur, viðskiftafólk og starvsfólk.

Bókasavnið eigur umleið 75.000 bøkur o.a. tilfar. Umleið 6.000 bøkur standa á eksternari goymslu vegna plásstrot.

**Bókasavnið m$^2$:**
4. hædd 170 m$^2$ - av hesum: 14 m$^2$ skrivstovur - 40 m$^2$ bókagoymsla
3. hædd 257 m$^2$ - av hesum: 49 m$^2$ skrivstovur (38 m$^2$ avbyrgt øki vegna leka) - 15 m$^2$ bókagoymsla

---

[2] Bókasavnið hevur, síðani tað læt upp í 1969, leigað í alsamt størri pørtum av bygninginum.

2. hædd 466 $m^2$ - av hesum: 43 $m^2$ skrivstovur - 14 $m^2$ bókagoymsla
1. hædd 268 $m^2$ - av hesum: 100 $m^2$ lesistova
0. hædd uml. 20 $m^2$.
Tils. 1.161 $m^2$ - av hesum: 106 $m^2$ skrivstovur - 69 $m^2$ bókagoymsla - 100 $m^2$ lesistova

**0. hædd / Kjallarahæddin**
Niðasta hæddin hevur staðið óvirkin, men í skrivandi løtu er partur av kjallaranum væl á veg til at verða innrættaður til eina opna goymslu. Restin av kjallaranum er goymsluhøli hjá kommunalu húsaumsitingini og kaféini. Undir trappunum í kjallaranum finst avísgoymsla, umframt goymsla av ljóðútgerð.

**1. hædd / veghæddin**
Nýumvæld 2009-2011.
Høvuðsinngongd, kafé, avís- og tíðarritsdeild, avgreiðsla, sjálvavgreiðsla (afturbering og avheinting av bókum v.m.), internetteldur, framsýningarhøli, vesir. Lyfta finst á 1. hædd, sum gongur upp til 4. hædd.

**2. hædd**
Útlánið, ungdómsdeild, skrivstovur, kopirúm, teldurúm, goymslurúm.

**3. hædd**
Barnabókasavnið, barnavesir, lítil inngongd, trappuppgongd við lyftu, skrivstovuhøli (harav er innara hølið avbyrgt vegna lekar og blámusopp), lítið goymslurúm.

**4. hædd**
Skrivstova hjá býarbókavørði, fundarhøli (fyrrverandi íbúð v/ køki, baðirúmi, gongd), lítil køkur, bókagoymsla, gongd, vesi, goymsla til vaskiútgerð og annað. Ein óbrúktur takpallur.

**Komandi hølisviðurskifti**
Verandi hølir, og standurin á teimum, avmarka sum er virksemið. Umvæld og dagførd hølisviðurskrifti fara at bera í sær eitt fjølbroyttari og betri nútímansbókasavn.

Við støði í ynskjum og í samsvari við mál og visjón Býarbókasavnsins gjørdi Sp/f Árni Winther Arkitektar eitt skitsuuppskotslíknandi uppskot í 2014. Uppskotið hevur verið væl móttikið av bæði leiðslu og starvsfólki á Býarbókasavninum, eins væl og umsitingini. Uppskotið gongur eisini teimum ynskjum og treytum á møti, sum eru neyðugar til eitt vælvirkandi bókasavn. Millum annað er hædd tikin fyri broytta bókasavnsleiklutinum við m.a.

- betri lesi- og lestrarumstøðum, sum stuðla upp undir reflektión og djúphugsan
- fundar- og aktivitetsrúm, sum er multifuntionelt og fleksibult
- størri rúmd til børn og ung, eins væl og rørslutarnað
- betri goymsluviðurskifti til bøkur v.m.
- tiltaks- og fyrilestrarhøli, ið kunnu hýsa fleiri tiltøkum
- skrivstovur í eini samlaðari kjarnu, sum stuðlar upp undir arbeiðsgongdirnar

Í stuttum áttu verandi hølisviðurskifti at sæð soleiðis út:

**0. hædd / Kjallarahæddin**
Bókagoymsla og fyrilestra-/tiltakssalur. Kann eisini nýtast uttan fyri vanliga upplatingartíð.

**1. hædd / veghæddin**

Í stóran mun óbroytt, burtursæð frá rúmligari lyftu og nýggjari trappuuppgongd frá kjallara.

**2. hædd**
Bøkur o.a. tilfar til vaksin. Lesistova, lesiklivar, samrøðu- og serrúm. Starvsfólkaskrivstovur og fundarhøli kring ein felags kjarna. Lesiklivar kunnu nýtast uttan fyri vanliga upplatingartíð.

**3. hædd**
Bøkur o.a. tilfar til vaksin. Rúm fyri bókaframsýningum, teldum, kopiering, lesi- og sitiplássum.

**4. hædd**
Barna- og ungdómsdeild. Hølini kunnu deilast upp í eindir og skulu sostatt kunna hýsa fjølbroytta virkseminum á barna- og ungdómsbókasavninum, t.e. stovnsvitjanum, mammubólkum, barnafamiljum, lektiukafe, teldu- og miðlasavn, multirúm til spøl, rørslu, tiltøk og framførslur. Í tilknýti til hetta skal takpallurin eisini takast í nýtslu.
Í uppskotinum er roknað við, at hølini út móti Sverrisgøtu, har Fíggjardeildin og KT-deildin í dag halda til, verða tikin við upp í Býarbókasavnið.

**Býarbókasavnið og miðbýurin – nakrir tankar**
Seinastu árini hevur rákið verið, at bókasøvn verða hugsað inn í og brúkt sum ein týðandi liður í strategiskari býarplanlegging. Bókasavnið er ofta kjarna og miðdepil í at endurmenna og skapa lív í býarrúminum.
Býarbókasavnið liggur í hjartanum í Havnini. Verandi gomlu bygningar seta sínar avmarkingar, men veita eisini serligar møguleikar til at skapa eitt vælvirkandi og innbjóðandi býarumhvørvi. Í gørðum og smogum aftanfyri kunnu skapast nøkur nýggj og spennandi býarrúm.

Við gongugøtuni beint uttanfyri, men eisini við møguligum inngongdum/ gjøgnumgongdum umvegis Vaglið, Tórsgøtu og Sverrisgøtu, eru eisini nakrir serligir møguleikar at skapa eitt meiri livandi býarrúm og at aktivera hesi økir, sum í løtuni ikki verða brúkt. Eitt nú kundu smogur og bakgarðar verið brúktir sum sambindingarlið millum aðrar mentanarstovnar í miðbýnum: Perluna, Reinsaríið, Margarinfabrikkina, Tjóðpallin og Vaglið.

Til ber at hugsa sær, at mørkini millum bókasavn og býarrúm gjørdust meiri flótandi, at man t.d. samantvinnar innara bókasavnið við ytra býarrúmið, eitt nú við partvíst yvirdekkaðum smogum, bakgørðum, sum kunnu nýtast; ikki bert til at ganga ígjøgnum, men eisini til annað uttanduravirksemi. Sostatt kundi bókasavnið verið við til at skapa eina synergi millum ymsu stovnarnar í miðbýnum, sum kann styrkja um býin sum læringar-, mentanar- og upplivingarrúm.

**Býarbókasavnið sum høvuðs- ella meginbókasavn – nakrir ávegis tankar**
Tosað hevur verið leysliga um, at Býarbókasavnið møguliga í framtíðini kundi blivið eitt høvuðs- ella meginbókasavn fyri allar Føroyar. Í dag er hetta ein deild undir Føroya Landsbókasavni, nevnd Bókastovan, sum er ásett í Bókasavnslógini Kapittul VIII, § 21 og 22.

Stutt um høvuðsbókasavnsvirksemið:

- at samskipa keypið av føroyskum bókum og øðrum tilfari til skúla- og fólkabókasøvn.
- at skráseta, binda inn og greiða hetta tilfarið til bókasøvnini
- at fremja upplýsandi tiltøk um bókasavnstilfar.
- at skipa fyri eftirútbúgving og skeiðsvirksemi fyri starsvfólki á bókasøvnunum.

- at skipa fyri býti av bókasavnsgjaldinum (t.e gjald til føroyskar rithøvundar og týðarar, hvørs bøkur eru til taks á bókasøvnunum).

Til hetta virksemi krevjast hølir og starvsfólk.

Í skrivandi løtu er málið ógvuliga hypotetiskt, og tískil ber illa til at koma við ítøkiligum tonkum og viðmerkingum. Fyrst og fremst krevst ein broyting í verandi bókasavnslóg.
Í øllum førum ber til at staðfesta, at um so var, at Býarbókasavnið skuldi fingið eina slíka funktión afturat, hevði ein ný- og umbygging brynjað bókasavnið enn betur til at taka ímóti hesi avbjóðing. Umbyggingin skal vera framskygd og stuðla undir eina langtíðarætlan fyri Býarbókasavnið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til fyriliggjandi prinsippuppskot við atliti til, at umsókn kann í mai/juni verða latin Mentamálaráðnum og Landsbókasavninum um fígging sbrt. § 15, stk. 3 í bókasavnslógini árini 2017-2020. Samstundis fer umsitingin til fundin í oktober at fyrireika neyvari ráðlegging av verkætlan og tíðarætlan við atliti til at kunna fremja verkætlanina í stigum, herundir gerð av fasadum komandi vetur.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti:**

Í juni lat umsitingin umsókn til Landsbókasavnið og Mentamálaráðið sum samtykt á fundi í mentamálanevndini 4. mai 2016. Í skrivi frá Landsbókasavninum hevur umsitingin fingið at vita at Landsbókasavnið hevur latið tilmæli til Mentamálaráðið. Biðið er um partsinnlit í tilmæli, men er svar ikki komið enn.

Í samskifti við teknisku fyrisiting, ið virkar sum byggiharri í byggiverkætlanum hjá Tórshavnar kommunu er avgjørt at tað hevði verið ein fyrimunur fyri víðari tilgongdina at ein samlað byggiskrá fyrilág, ið nakað neyvari enn verandi tilfar nágreinar hølistørv og skrá og í hvønn mun annað virksemi við fyrimuni kann hugsast at verða hýst saman við Býarbókasavninum.

Hóskandi er at seta eina verkætlanrnevnd við umboðum fyri trivnaðarfyrisiting, teknisku fyrisiting og Býarbókasavnið. Nevndin skal verða liðug við sítt arbeiðið innan 1. november 2016.

Ein fyritreyt fyri at umbyggingin og heildarætlanin fyri Býarbókasavnið kann fremjast er at KT-deildin og Fíggjardeildin hjá Tórshavnar kommunu flytir úr bókasavnsbygninginum á Káta Horninum. Ein ætlan fyriliggur at innrætta 2. hædd í Niels Finsensgøtu 17 til at hýsa hesum báðum deildunum. Verkætlanin er mett til kr. 1.262.194, men fígging er ikki tøk.

Á løgukarminum fyri 2016 eru játtaðar kr. 3.000.000 til Býarbókasavnið. Uppskot er tí, at játtan til innrætting hjá miðfyrisitingini í Niels Finsensgøtu 17 verður fingin til vega av játtanini til Býarbókasavnið treytað av, at Býarbókasavnið kann flyta inn í hølini á Káta Horninum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:
a) at samtykkja arbeiðssetningin og geva umsitingini heimild til at útvega byggiskrá, og .
b) at flyta kr. 1.262.194 av løgukarminum fyri 2016 ætlað Býarbókasavninum til kontu 6109 Húsaumsitingin, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 31. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Umsitingin kemur á fundinum at geva status viðv. umsóknini til mentamálaráðið vm.

**Mentamálanevndin 2. november 2016:** Kunnað varð um status.

**Ískoyti:**
Tilboðini uppá umbygging av 2. hædd í Niels Finsensgøtu 17 eru 736.000 kr. hægri enn upprunaliga mett. Áðrenn arbeiði kann byrja, skal neyðug játtan vera tøk.

**Tilmæli**

Miðfyrisitingarstjórin og trivnaðarstjórin mæla til at játta 736.000 kr. til umbyggingina á konto 6109 umsiting og røkt av bygningum. Fíggja av kontum við avlop í 2016. 200 tkr. Av 1311 Miðfyrisiting, 436 tkr. av 5310 Mentanartiltøk og 100 tkr. av Vinnutiltøk.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

## 73/17 Deksbáturin Fram TN2

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 152/16 | 14/04448-33 |
| 2 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 229/16 | 14/04448-33 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 322/16 | 14/04448-33 |
| 4 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 389/16 | 14/04448-33 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 32/17 | 14/04448-33 |
| 6 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 73/17 | 14/04448-33 |

**Málslýsing:**
Loyvi um at virka fyri at keypa dekksbátin Fram, frá Søren Pram Sørensen.

**Fíggjarnevndin 6. apríl 2011:** Samtykt at taka upp samráðingar við Søren Pram Sørensen við tí fyri eyga at keypa dekksbátin Fram.

**Fíggjarnevndin 25. juli 2011:** Kunna varð um málið.

**Ískoyti:**
Báturin er bygdur í 1923. Sambært eigara, er báturin væl røktur og í góðum standi.

Fundur hevur verið við umboð fyri eigaran, ið vil selja kommununi bátin fyri kr. 700.000.

Eigarin hevur játtað at fáa tekniska meting til vega frá Mourits Mohr og eina greining frá skipaeftirlitinum.

Fyri at kunna reka bátin má hann setast á fíggjarætlan kommununnar, m.a. fyri at kunna rinda viðlíkahald, olju, legugjald, tryggingargjald og bedingseftirlit eina ferð um árið.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og miðfyrisitingarstjórin mæla til at keypa bátin fyri kr. 700.000, treytað av at tekniska metingin og greiningin frá skipaeftirlitinum eru nøktandi.

Eisini verður mælt til at játta neyðuga peningin til raksturin

Mælt verður eisini til, at stovna eitt felag, líknandi sluppvinafelagnum, at taka sær av dagliga rakstrinum.

**Fíggjarnevndin 8. september 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at keypa dekksbátin Fram.

Samtykt at játtað kr 800.000 av konto 20910 til keypið og raksturin av bátinum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 8. september 2011:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen og Jan Christiansen.
Greiddu ikki atvøðu: Rúni Djurhuus og Jákup Símun Simonsen.

**Ískoyti.**
Báturin er skrásettur í skipaskránni sum stuttleikabátur og kann ikki brúkast til vinnu.

Higartil hava Regin Torkilsson og Finnur Ludvig saman við pápa og pápabeiggjum hjá Regini tikið sær av bátinum.

Báturin hevur verið brúktur í jólamánaðinum og hevur verið við á tveimum stevnum. Millum annað í regattasiglingini fyri træskip. Harumframt hevur báturin veri opin fyri almenninginum á ólavsøku.

NámX (Evald Rasmussen) hevur ætlanir um at nýta bátin til fiskibreytina.

Um hetta skal gerast veruleiki, er neyðugt, at báturin verður góðkendur til brúkið. Kannað verður í løtuni hjá Skipasýninum, hvørji krøv verða, og kann eisini væntast, at íløgur skulu gerast í bátin.

Tað er tí trupult at áseta hvussu nógvur peningur skal til fyri at kunna reka bátin, tí tað veldst um, hvussu nógv báturin verður brúktur, og eisini til hvørjar ábøtur skulu gerast.

Rakstrarútreiðslurnar í 2012 vóru um kr. 60.000,00.

Eingin inntøka er til bátin, men hann fekk stuðul í 2012 frá Regattasiglingini.

Um NámX skal brúka bátin, verður talan um øktar útreiðslur til olju – íløgur, trygdarútgerð o.s.fr.

Enn er eingin niðurstøða gjørd hesum viðvíkjandi, men neyðugt er við eini rakstrarfígging undir øllum umstøðum.

**Tilmæli:**
Leiðarin á løgdeildini og kommunustjórin mæla til at flyta kr. 75.000,00 til rakstur og íløgur av deksbátinum Fram av konto 20910 til konto 5366, og annars at taka hædd fyri deksbátinum Fram í fíggjarætlanini 2014.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 2. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Ein áhugabólkur (umleið 4 persónar) hevur sýnt áhuga fyri at taka sær av bátinum ímóti at fáa rætt til at brúka hann sambært nærri treytum.

Løgdeildin og mentamáladeildin hava verið í samskifti við áhugabólkin um bátin og samskift við træsmið við atliti til eina støðulýsing/kanning í sambandi við neyðugar umvælingar av bátinum (sí hjálagt skjal). Træsmiðurin metir, at báturin er í ringum standi. Í løtuni tekur løgdeildin sær av bátinum saman við mentamáladeildini.

Sum sæst, er metingin (við fyrivarni), at tilfarið til umvælingar er 56 tkr. umframt MVG. Av tí at talan í stóran mun er um arbeiði, sum krevur fakkunnleika innan bátasmíð, og áhugabólkurin neyvan kann fara undir tað mesta av hesum einsamallur, er neyðugt at meta um kostnaðin fyri arbeiðsløn at gera neyðuga arbeiðið. Mett verður (við fyrivarni), at lutfallið millum tilfar og arbeiðsløn í hesum føri er millum 1 til 3 til 1 til 4, t.v.s. at samlaði kostnaðurin lættliga kann gerast einar 150 tkr. til 200 tkr. Raksturin av bátinum higartil hevur verið fíggjaður av kontu 5366 Stuðul annars. Hartil kemur so annað umvælingararbeiðið serliga innanborðs, máling o.t., ið áhugabólkur eigur at kunna taka sær av.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, løgdeildarleiðarin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini í fyrsta lagi til at taka støðu til at selja bátin og í øðrum lagi at taka støðu til, um farast skal undir víðari tilgongd at gera leiguavtalu við áhugabólkin og samstundis fara undir neyðugar umvælingar og fíggja útreiðslurnar av kontu 5366 Stuðul annars.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Samtykt at selja bátin.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at gera eina støðulýsing av bátinum, ið verður at leggja fyri aftur fíggjarnevndina.

Støðulýsing er gjørd av bátinum og hevur kommunan fingið tilboð frá Skipasmiðju uppá umvæling av bátinum.

Tilboð samlað uttan mvg. Kr. 1.396.400,00 + transport og leigu av krana.

**Tilmæli:**

Kommunustjórin mælir til at selja bátin.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, tekur ikki undir við at selja bátin men at finna áhugabólk at taka sær av bátinum, so hann kann vera partur av býarmentanini.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 4 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

Atkvøddu blankt: Tróndur Sigurdsson og Annfinn Brekkstein.

# 74/17 Fyrireikandi verkætlan at byggja eldrabústaðir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 13.02.2017 | 4/17 | 17/00586-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 30/17 | 17/00586-1 |
| 3 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 74/17 | 17/00586-1 |

**Málslýsing:**
Bæði í eldrapolitikkinum og í samgonguskjalinum hjá býráðssamgonguni verður dentur lagdur á at nøkta tørvin á bústøðum til eldri. Býráðssamgongan hevur sett sær fyri, at fáast skulu til vega tørvandi búpláss og umlættingarpláss, og at atlit eisini skal takast til, at eldru borgararnir hava tørv á ymiskum bústaðarloysnum. Í hesum sambandi skal kannast tørvurin á íbúðum, vardum bústøðum, umlættingarplássum og røktarheimsplássum, og at dentur verður lagdur á at nýhugsa og leggja upp fyri framtíðar demografiskum broytingum, hetta bæði í mun til bygging, tænastur, samstarv, vælferðartøkni v.m.

Í fjør varð gjørd frágreiðing um framtíðartørvin á búplásum til eldri (j.nr. 15/04601). Frágreiðingin lýsir, hvat ávirkar tørvin á búplássum, herundir hvat kommunan kann gera til tess at tálma tørvin á fleiri búplássum sæð í mun til demografisku broytingarnar. Harumframt verður eisini lýst, hvussu støðan hjá Tórshavnar kommunu er í mun til Norðurlond, serliga hvat lutfalsliga búplássa-kapasitetinum viðvíkur.

Niðurstøða er, at kommunan hevur lutfalsliga fleiri røktarheimsbúpláss enn norðurlendsku grannalondini, men eisini, at kommunan er væl aftanfyri í mun til at veita eldraíbúðir o.líkn. Við teim bústaðartilboðum til eldri, sum kommunan stendur fyri í dag, og tað er í stórum bert røktarbúpláss, røkkur kommunan lutfalsliga ikki eins nógvum borgarum sum t.d. danskar kommunur gera í miðal.

Harumframt sýnir demografiska framrokningin, at talið av eldri yvir 80 ár komandi árini til 2030 verður næstan tvífalt so stórur sum í 2015 – úr uml. 760 borgarum til 1.350 borgarar. Eisini aldursbólkurin 60-79 ár veksur nógv, úr uml. 3.460 til uml. 4.737, ella uml. 37%. Hesin seinni aldursbólkur má metast at vera málbólkur í mun til nýggjar íbúðarloysnir.

Hetta saman við, at tað verða lutfalsliga færri borgarar í teim yngru aldursbólkunum 0-19 ár og 20-59 ár, setir sum vera man trýst á samlaða bústaðarkapasitetin til eldraøkið hugsað breitt, tvs. bæði til tey beinleiðis røktarkrevjandi, og til tann yngra partin av pensjónistum, sum við einum meira hóskandi bústaði og við fyribyrgjandi og heilsufremjandi tilboðum kunnu búgva longri heima í íbúð. Henda demografiska støða setir eisini trýst á kommunalu tænasturnar og skipan av teimum.

Samansetingin av búplássum og bústaðartilboðum – tað veri seg røktarheimspláss, demenspláss, stutttíðarpláss til umlætting og rehabilitering v.m., vardar íbúðir, eldravinarligar leiguíbúðir, demensvinarligar íbúðir, dagtilhald og deplar sum samanrenning av tí, ið nevnt er frammanfyri – hevur eisini stóra ávírkan á, hvussu kommunan kann skipa og stýra tørvin á tænastum og tilboðum bæði stutttíðar og langtíðar, eins og um røttu fortreytirnar fyri fakligum og fíggjarligum synergieffektum eru til staðar.

Til tess krevst nýhugsan bæði í mun til, hvat bygt verður, herundir vælferðartøkni, og til skipan av rakstri og tænastum.

Ítøkiliga verður helst talan um fleiri byggiverkætlanir, størri og smærri, sum kommunan stendur fyri heilt ella lutvíst í samstarvi við t.d. Bústaðir, hetta serliga í mun til íbúðir.

Í ætlan liggur, at Bústaðir byggir eitt ávíst tal av eldraíbúðum í sambandi við Óðinshædd 2-verkætlanina. Bústaðir hevur somuleiðis víst áhuga fyri at verða partur av íbúðarbygging til eldri, sum er knýtt at røktarheimi v.m. Skipast skal formligt samstarv við Bústaðir bæði um íbúðarbygging til eldri og um rættindi hjá kommununi til at visitera borgarar, sum knýttir eru at heilsu- og umsorganartænastuni, til slíkar íbúðir.

Talan verður helst eisini um, at realiseringin av ymsu byggiverkætlanunum verður yvir fleiri ár og yvir fleiri býráðsskeið eftir eini nærri raðfesting og langtíðaríløguætlan. Partur av byggitørvinum er harumframt at endurnýggja verandi ótíðarhóskandi búpláss. Eisini skal kannast, í hvønn mun til ber at byggja út verandi røktarheim.

Býarskipanarliga skal støða takast til staðsetingarmøguleikar í sambandi við nýggja bygging. Hugsast skal eisini um tørvin uttanfyri sjálvan høvuðsstaðin.

**Skipan av fyrireikandi verkætlanartilgongd**
Til tess at menna og koma fram til endalig konseptuppskot um bústaðarloysnir bæði í mun til langtíðarætlan og ítøkiligar byggiverkætlanir at fremja komandi árini, skulu ein røð av viðurskiftum og deilmálum greinast nærri, ið eisini krevja politiskar avgerðir so hvørt.

Mett verður í fyrstu atløgu neyðugt við eini fyrireikandi verkætlanartilgongd, sum skal greina og koma við uppskoti til ítøkiligar bústaðarloysnir, og sum í størst møguligan mun liva upp til tørvin á búplássum, tað veri seg røktarbúpláss og íbúðir, og ynskini hjá borgarunum og hjá kommununi.

Partur av hesum er at fáa til vega nýggja vitan og íblástur sum grundarlag fyri nýggjum og framtíðartryggjaðum loysnum bæði í mun til bygging og optimala skipan av tænastum.

Henda fyrsta fyrireikandi verkætlanarfasan eigur at verða liðug í seinasta lagi 30. juni 2017. Tá eigur at verða greitt, hvørjar bústaðarloysnir og hvussu nógvar búeindir (stovnpláss/leiguíbúðir), ið farast skal eftir komandi árini 3-4 árini og yvir 12 ára skeiðið (ár 2030), íroknað yvirskipaðar kostnaðarmetingar.

Næsta fasan er at fáa gjørt byggiskrá/-ir til tær verkætlanir, sum byggjast skulu komandi árini, sum grundarlag fyri prosjektering og neyvari kostnaðarætlan v.m. Fyrstu byggiverktlanirnar eiga at verða komnar so langt áleiðis, at klárt er at byggja í seinnu hálvu av 2018.

Skotið verður upp, at fyrireikandi verkætlanarbólkur verður skipaður við umboðum fyri fyrisitingarnar. Bústaðir skal standa í boði at vera umboðað.

Aftrat verkætlanarbólkin verður skipaður politiskur fylgibólkur, sum er eldranevndin og borgarstjórin.
Til tess at leiða og samskipa arbeiðið og tryggja støðuga framgongd verður mett neyðugt at keypa inn verkætlanarfólk fulla tíð í fyrstu atløgu fram til 31. desember 2017. Partur av arbeiðinum hjá hesum verður at skipa samskifti við allar avvarðandi interessentar, tað veri seg býráð, leiðslur, starvsfólk, felagsskapir, fakfólk, granskarar, brúkarar og borgarar annars, eldraráðið v.m., eitt nú gjøgnum verkstovur.

Á endurskoðaðu íløguætlanini fyri 2017 eru settar kr. 3,5 mió av til kanningar, projektuppskot v.m. Mett verður, at henda fyrsta fyrireikandi tilgongdin kostar uml. kr. 1,0 mió.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at seta fyrireikandi verkætlanarbólk og politiskan fylgibólk samsvarandi omanfyri standandi, og heimila umsitingini at gera avtalu um

verkætlanarfólk. Harumframt verður mælt til at játta kr. 1 mió til fyrireikingar v.m. av íløgukarmi 2775 Eldrarøkt.

**Trivnaðarnevndin 13. februar 2017:** Samtykt at taka undir tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina. Nevndin viðmerkir, at íbúðarbygging eisini eigur at verða bjóðað út til onnur íbúðafeløg aftrat Bústaðir.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá fyrisitingini.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

# 75/17 Vatnrussjibani vm. til Svimjihøllina í Gundadali

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 127/16 | 16/01711-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 149/16 | 16/01711-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 31.08.2016 | 205/16 | 16/01711-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 286/16 | 16/01711-1 |
| 5 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 203/16 | 16/01711-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 13.02.2017 | 32/17 | 16/01711-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 31/17 | 16/01711-1 |
| 8 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 75/17 | 16/01711-1 |

**Málslýsing:**
Umsitingin arbeiðir við at fyrireika uppskot til gerð av vatnrussjibana í Svimjihøllini í Gundadali. Avtala er gjørd við Aquaplan Aps við Karsten Ask, ráðgeva, um at gera skitsuuppskot og kostnaðarmeting sum grundarlag fyri støðutakan til møguliga víðari detailprojektering og útboði.

Hjáløgd er tvey fyribils uppskot til linjuføring av russjibananum (strikutekning og 3D tekning). Sum sæst er lagt upp til í báðum førum, at linjuføringin gongur út um bygningin ovarlaga á vestursíðuni. Umsitingin kemur í næstum at meta nærri, um tað er hóskandi, tí atlit eru at taka til staðsetingina av komandi langhylsbygninginum. Ætlaða longdin á bananum er antin umleið 58 metrar ella 51,8 metrar. Í hesum uppskotunum endar banin í einum bakka. Umsitingin kemur saman við ráðgevum at viðgera fleiri møguleikar fyri linjuføringum, umframt at eisini at kanna møguleikar fyri at russjibanin heldur endar í 90 cm. hylinum í staðin fyri einum bakka. Tí er sannlíkt at verandi uppskot verða tillagað áðrenn næstu viðgerð.

At gera russjibana inniber eina rímiliga týðandi broyting og hevur árin á høllina, bæði visuelt og viðv. ljóði. Atliti til trygd og myndugleikakrøv eru eisini týðandi viðurskifti at greiða.

Ráðgevin hevur innheintað eitt tilboð frá svenskum veitara til uppskotini. Í hjálagda tilboði er prísurin (umleið 1,2 mio.kr) fyri levering av russjibana íroknað uppseting, men ikki útreiðslur til pumpur, rør, innleggingar vm. Harumframt ber til at keypa ymiskt afturat so sum tíðtaking, ljóseffektir vm., umframt at alt eftir hvør linjurføring verður vald hevur tað eisini ymsar útreiðslur við sær.

Til verkætlanina er tilknýttur sum ráðgevi Sp/f PBC Consult, ið vanliga virkar sum HVS-ráðgevi til Svimjihøllina saman við Húsaumsitingini/Teknisku fyrisiting, ið dagliga varðar av bygnings- og skipanarviðlíkahaldinum av høllini.

Í viku 19 verður verkstova har umsitingini saman við Svimjihøllini og ráðgevum kemur at fyrireika tilmæli um møguliga verkætlan/loysnir, íroknað tíðar- kostnaðarætlan, til fundin í mentamálanevndini 25. mai 2016 og síðani fíggjarnevnd og býráði.

Á býráðsfundi 19. apríl varð samtykt at játta 1.500 tkr. til vatnland. Játtanin fer til aðru viðgerð á býráðsfundi 19. mai 2016. Henda fígging er fyritreyt fyri fullføring av hesi verkætlan.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at umrøða uppskotið við atliti til, at umsitingin kemur við endaligum uppskoti til komandi fund.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Ískoyti**
Tekstur um nýggja linjuføring vm. kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
**Linjuføring og staðsetan av russjibananum**
Umsitingin hevur havt verkstovu og samskifti við ráðgevum og Svimjihøllini og er komin til at samanlagt er betri at broyta staðseting av bananum til at verða í tí eystara partinum har kavingarhylurin er. Hetta tí at betri rúm er har fyri bananum tí tað er væl hægri til loftið, umframt at í áður gjørda uppskoti fer banin 5 metrar útum vestureftir og vildi tað órógva komandi langhylin. Harumframt vil staðsetingin ikki broyta stórvegis uppá heildarinntrykki inni í høllini og samstundis geva høllini ein eyðsýndan dám uttandura. Tað hevur verið uppá tal at russjibanin endaði í økinum sunnanfyri kavingarhylin, men tað økið er hugsa avlagt til hitapottar o.l.

Í hjáløgdu tekning sæst uppskot til linjuføring nevnd AQ-22 (fylgiskjal 1), umframt renderingar, nevndar AQ-22 3D og bild1 uttandura av bananum (sí fylgiskjal 2 og 3).

Russjibanin gongur út gjøgnum galvin eystanfyri og er umleið 72,3 m. langur og endar í einum bakka. Veitingin er frá Hydro Sport í Svørríki (sí fylgiskjal 4).

**Kostnaðarmeting**
Samlaði kostnaðurin er mettur til samanlagt: Kr. 2.965.805, umframt kommunalt MVG á kr. 185.363.
Samansett av:
Útgerð/bani frá Hydro Sport:kr. 1.820.310 (SEK2.321.420)
HVS-útreiðslur íroknað ókent 20% - kr. 475.000 (sí fylgiskjal 5)
Projektering, eftirlit - HVS kr. 70.000
Bygningsútreiðslur íroknað projektering, ráðgeving, eftirlit og ókent 20% kr. 540.495 (sí fylgiskjal 6)
Nýtt tún framvið høllini og hegn kr. 60.000
MVG (kommunalt) kr. 185.363

Sp/f Preben Hansen stendur fyri projektering og eftirliti av konstruktión og Sp/f PB Consult fyri projektering og eftirliti av HVS og el. Ætlanin er at bjóða bygningsarbeiðstøkuna, HVS-

arbeiðstøkuna og el-arbeiðstøkuna út í undirhondsboði til 2 fyritøkur til hvørt faki, umframt at taka av tilboði frá Hydro Sport um veiting av bananum og uppseting av honum.

**Fígging**
Til verkætlanina eru tøkar á løgukarminum fyri 2016 tkr. 1.500. Restupphæddin á tkr. 1.652 verður skotið upp fíggjað av løgukarminum fyri 2016 fyri langhylin.

**Tíðarætlan**
Fyri at gera arbeiðið letur høllin ætlandi aftur 5. desember 2016 og verður stongd einar 3 vikur. Projektering og byggiarbeiðið á staðnum byrjar í november. Fyrivarni verður tikið fyri tíðarætlanini.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini til at innganga sáttmálar við arbeiðstakarar um tær 4 arbeiðstøkurnar. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 31. august 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Heitt verður samstundis á umsitingina um at leggja mál um hitapottar sunnanfyri svimjihøllina og russjibana til smábørn fyri nevndina á næsta fundi.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur saman við ráðgevum innheintað 2 undirhondboð uppá ávikavist HVS- og jørð-/betongarbeiðstøkurnar. Harumframt er mett at best er at fremja el-arbeiðstøkuna uppá rokning.

Til verkætlanina eru játtaðar 3.152 tkr. á projektkonto L57028.

Við innkomnu tilboðsprísunum og eftir ávísum sparingum í jørð-/betongarbeiðstøkuni, umframt óvæntaðar útreiðslur á 10%, er væntaða samlaði kostnaðurin nú umleið 3.646 tkr. Sí hjálagt yvirlit.

Veitingin av vatnrussjibananum var sett í ordra í fjør og kemur útgerðin ætlandi til landið í endanum av februar 2017.

Á løgukarminum eru tøkar umleið 6.500 tkr. til langhylsverkætlanina. Tilmælið viðv. víðari tilgongd í tí málinum verður ætlandi lagt fyri mentamálanevndina 15. feburar 2017. Mett verður at langhylsverkætlanin í fyrstu atløgu tolir at ávís minni upphædd verður flutt til hesa verkætlanina.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á Húsaumsitingini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta og flyta 550 tkr. av løgukarminum konta 5775 - Langhylur til

projektkonto L57028 Vatnrussjibani og at taka av innkomnu boðnum frá lægstu tilboðsgevum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 13. februar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

# 76/17 Tórsvøllur - vestursíðan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 59/16 | 16/00962-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 185/16 | 16/00962-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.06.2016 | 244/16 | 16/00962-1 |
| 4 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 173/16 | 16/00962-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 16.06.2016 | 193/16 | 16/00962-1 |
| 6 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 76/17 | 16/00962-1 |

**Málslýsing:**

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Útsett.

**Tórsvøllur vestursíða**
Tá Tórshavnar kommuna og Fótbóltssamband Føroya í 2010 settu sær fyri at fáa Tórsvøll til góðkent altjóða stadion, var fyrsta stig at fáa til vega eina heildarætlan, tann sonevndi masterplanurin, sum bæði viðgjørdi skipan av øllum ítróttaøkinum í Gundadali og tørvin á kravdum fasilitetum til sjálvan Tórsvøll sum landsliðsstadion til altjóða kappingar hjá UEFA og FIFA.

Viðurskifti, sum vóru sett á skrá til tess, vóru m.a.:

- At vaksa um sjálvan leikvøllin samsvarandi altjóða krøvum
- At skifta grasvøllin út við altjóða góðkent graslíkið
- At seta upp nýtt ljósannlegg samsvarandi krøvum til sjónvarping av altjóða dystum
- At yvirdekka áskoðaraplássini til tess at reisa verju fyri vindi og regni, og í hesum sambandi at betra um komfort til áskoðararnar
- At avmarka talið av áskoðarum úr 6.440 niður á uml. 5.000
- At reisa nýggjan bygning á suðursíðuni, ið kann brúkast til nógv ymisk endamál bæði ítróttarliga, vinnuliga og umsitingarliga
- At skipa stadion við nýggjum inn- og útgongdum, ið lúka altjóða krøv

Útyggingarstigini hava í høvuðsheitum verið hesi:

- Nýtt ljósannlegg 2011
- Grasvøllur skiftur til graslíki 2012
- Suðurtribunan tikin niður og nýggjur bygningur bygdur 2013 – er m.a. høvuðsinngongd til Tórsvøll, umsitingarhøli hjá FSF, og 900 áskoðarapláss undir taki og nýggjum setrum
- Eystara skýlið bygt 2014-2015 – tak yvir áskoðarapláss, nýggj setur, vesi og búðir. Eystara skýlið er bundið saman við bygninginum og áskoðaraplássini á suðurendanum.

**Vestara skýlið**

Vestara skýlið er framhald av heildarætlanini, har áskoðaraplássini verða dagførd og koma undir tak. Vesturskýlið verður eins og eysturskýlið bygt saman við bygninginum á suðurendanum og skapar sostatt samanhangandi form sum hestaskógvur. Tá vesturskýlið er bygt, er tað samært heildarætlanini bert torgið frammanfyri Tórsvølli, sum er eftir.

Verkætlanin við vesturskýlinum fevnir eisini um útbygging av gamla FSF-húsinum bæði norður- og suðureftir sum liður í, at Tórsvøllur skal røkka ásetingini um “Category 4” leikvøllir, ið er ásetingin fyri leikvøllir til altjóða landsdystir. Í løtuni er Tórsvøllur ein “Category 3” leikvøllur. Til tess at røkka hesum, skulu umklæðingin til spælarar og dómarar betrast, eins og umstøður til dopingkanningar og læknarúm. Umstøður til tíðindafólkini og VIP eru heldur ikki nøktandi.

Hesir nýggju fermetrarnir hava tann vinning umframt, at umklæðingarrúm, vesir og tey almennu økini kunnu eisini brúkast til tiltøk, sum eru í Gundadali, serliga á Niðara vølli, sum harvið fær høliskarmar til taks, ið ikki eru dag.

Á ovastu hædd eru góðir møguleikar fyri fleirnýtsluhølum, eitt nú gisting í sambandi við landsliðsvenjingar ella skúla, skrivstovur og kravdar VIP-fasilitetir í sambandi við landsdystir. Til ber at byggja 200 nýggj áskoðarapláss her, so at samlaði áskoðarakapasiteturin á vestursíðuni verður uml. 1.730.

Í stuttum fevnir útbyggingin um hesi høli:

- Veghædd – høli til vaktarhaldið, 2 umklæðingarrúm til dómarar, dopingrúm, 2 nútíðar umklæðingarrúm til liðini, høli til tíðindafundir, mixed zone (fjølmiðlar/leikarar), sum harumframt er foreldralounge móti niðaravølli
- 1. hædd – vesi, arbeiðsrúm hjá tíðindafólkuj
- 2. hædd – VIP høli, sølubúðir
- 3. hædd – sonevndar skybox til fleirnýtsluendamál, vaktarrúm

Útbyggingin loysir eisini trupulleikan við inngongdum, har áskoðarar í dag mugu inn á vøllin fyri at koma til áskoðaraplássini. Sum heild fer útbyggingin at lætta munandi um fyriskipan av dystum, kappingum og tiltøkum á Tórsvølli. Tey síðstu áskoðaraplássini, gestir og tíðindafólk koma eisini undir tak. Og ikki minst, at Tórsvøllur verður endaliga liðugur og kann verða ein stoltleiki fyri bæði høvuðsstaðin og landið.

Verkætlanaruppskotið er í mai 2016 lagt fyri UEFA at góðkenna.

Ynskið hjá FSF hevur verið, at útbyggingin skuldi verða liðug í september 2018, tá nýggja kappingin Nations League, sum UEFA skipar fyri, fer av bakkastokki. Hesa tíðarætlan ber ikki til at røkka, nú so langt er útliðið, men mett verður, at til ber at skipa byggingina soleiðis, at dystir kunnu fyrskipast kortini.

Hendan kappingin verður samstundis sum vanligu EM og HM-undankappingarnar. Hetta kemur eisini at økja um virksemið á Tórsvølli, har tað í miðal fara at vera 5 A-landsliðskappingardystir um árið. Spælt verður tá alt árið, tvs. eisini um veturin, har tað eisini er møguligt við øðrum smærri millumlandakappingum.

Útbyggingin gevur eisini nýggjar og betri møguleikar fyri øðrum virksemi á Tórsvølli, serstakliga størri tiltøk og stadionkonsertir.

**Samstarv**
Eins og øll tey undanfarnu útbyggingarstigini síðan 2010, er ætlanin at skipa arbeiðið við vesturskýlinum í samstarvi við FSF eisini fíggjarliga.

Gjørt er uppskot til samstarvsavtalu við støði í avtalunum fyri hini útbyggingarstigini.

Sambært uppskotinum til avtalu verður lagt upp, at byggingi verður skipað í partalagi. Fyribilskostnaðarmeting fyri alt útbyggingarstigið er kr. 98 mió. Lagt er upp til, at hvør parturin rindar helvtina av kostnaðinum, tvs. 50/50, og at gjøldini hjá hvørjum parti fella soleiðis:

2016: FSF kr. 5 mió, TK kr. 5 mió.
2017: FSF kr. 24 mió, TK kr. 8,75 mió
2018: FSF kr. 24 mió, TK kr. 8,75 mió
2019: FSF kr. 5 mió, TK kr. 8,75 mió
2020: TK rindar FSF kr. 8,75 mió
2021: TK rindar FSF kr. 9 mió

FSF hevur góðkent henda leist. Til ber ikki at staðfesta endaliga byggiskostnaðin fyrr enn eftir útboð.

Tíðarætlan yvirskipað:
- Juli-desember 2016 – projektering
- Januar 2017 – útboð
- Februar 2017 – uppstartur og partalag
- Februar-desember 2017 – stig 1: fundamentir, stuðlamúrar, lendisarbeiði, betong, vegur og stál
- Januar-august 2018 – stig 2: Stál, stálsperrur og polycarbonate
- August 2018-august 2019 – stig 3: Komplettering, innleggingar og stólar.

Í avtaluuppskotinum verður, sum omanfyri nevnt, lagt upp til bygging av vestursíðuni í partalagssamstarvi. Harumframt, at skipanin við stýrisbólki millum TK og FSF um Tórsvallar-bygginina verður at halda fram, á sama hátt høvuðsráðgevin.

Til tess at fáa fyrireikað, prosjekterað og bjóða arbeiðið út verður mett neyðugt við játtan frá kommununi uppá kr. 5 mió í 2016 og samsvarandi kr. 5 mió frá FSF.

Sambært dagførdu íløguætlanini fyri 2016 eru settar kr. 5 mió av til Tórsvøll.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at samtykkja uppskot til samstarvsavtalu við FSF um at gera yvirdekking yvir tribunir á vestarasíðu á Tórsvølli og út- og umbygging av verandi bygningi har. Mælt verður eisini til at játta kr. 5 mió av íløguætlanini 2027 5775 Ítróttaranlegg til fyrireiking, projekting og útboð.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Útsett.

**Mentamálanevndin 16. juni 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Sigrun Mohr og Halla Samulensen, samtykti at taka undir við fyriliggjandi avtalu millum TK og FSF, við teirri treyt, at tær upphæddirnar sum eru nevndar í avtaluni eru

endaligar fyri TK, eisini um verkætlanin verður dýrari, men at útreiðslubýtið verður 50/50 um verkætlanin verður bíligari enn mett.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur ikki undir við avtaluni vegna ov stóran iva um veruliga byggikostnaðin fyri hetta byggistigið.

**Ískoyti:**

Sambært fyriliggjandi uppskoti til avtalu millum TK og FSF fella gjøldini hjá hvørjum parti soleiðis í sambandi við verkætlanina:

2016: FSF 5 mió kr, TK 5,0 mió kr.
2017: FSF 26,25 mió kr, TK 5,0 mió kr.
2018: FSF 26,25 mió kr, TK 6,0 mió kr.
2019: FSF 7,25 mió kr, TK 6,0 mió kr.
2020: TK rindar FSF 6,5 mió kr.
2021: TK rindar FSF 6,5 mió kr.
2022: TK rindar FSF 7,0 mió kr.
2023: TK rindar FSF 7,0 mió kr.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2016:** Ein meiriluti Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, samtykti at taka undir við mentamálanevndini treytað av, at ognar- og ábyrgdarbýtið millum TK og FSF á vestursíðuni verður tikið upp til nærri støðutakan. Málið beint í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, vísir til sína støðutakan í mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri, og tveimum ímóti at taka undir við tilmælilnum frá meirilutanum í fíggjarnevndini. Ein býráðslimur greiddi ikki atkvøðu.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og  Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu: Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

Jógvan Arge greiddi ikki atkvøðu.

**Ískoyti**:

Ymsu byggistigini á Tórsvølli farnu 6-7 árini eru gjørd í samstarvi millum kommununa og Fótbóltssambandið. Í sambandi við undanfarnu byggingar hava umboð fyri býráðið verið tilnevnd í stýrisbólk, har eisini umboð fyri Fótbóltssambandið sita. Sambært avtaluni við Fótbóltssambandið um vestursíðuna er ætlanin, at byggingin verður skipað í partalagi.

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin og tekniski stjóran mæla til at tilnevna tvey umboð fyri býráðið í stýrisbólkin fyri byggingina av Tórsvølli.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Annika Olsen, Bogi Andreasen og Heðin Mortensen.

## 77/17 Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 83/15 | 15/01400-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 148/16 | 15/01400-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 225/16 | 15/01400-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 174/16 | 15/01400-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 70/16 | 15/01400-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 14.06.2016 | 179/16 | 15/01400-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.06.2016 | 46/16 | 15/01400-1 |
| 8 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 163/16 | 15/01400-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 314/16 | 15/01400-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 402/16 | 15/01400-1 |
| 11 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 329/16 | 15/01400-1 |
| 12 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 46/17 | 15/01400-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 15.03.2017 | 39/17 | 15/01400-1 |
| 14 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 77/17 | 15/01400-1 |

**Málslýsing**:
Til tess skjótt at fáa gongd á at betra umstøðurnar til almenna svimjing og kappingarsvimjing í høvuðsstaðarøkinum, verður bygginevndin til 50 m svimjihyl tikin av, og í staðin verður serstøk nevnd við tilvísing til fíggjarnevndina sett at gera allar neyðugar fyrireikingar til bygging av svimjihøll, herundir at:

- Gera neyva tørvslýsing av nýggjari svimjihøll til almenna svimjing og kappingarsvimjing, herundir lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum
- Gera uppskot til staðseting av nýggjari høll
- Gera byggiskrá til verkætlan, herundir hølistørv, teknisk krøv og orkukrøv
- Gera kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri bygging
- Gera rakstrarætlan, t.e. roknað meting um árligar rakstrarkostnaðir
- Gera uppskot til fígging, herundir møguleikar at fáa til vega fígging frá uttanhýsis pørtum

Serstaka nevndin fyri bygging av svimjihøll verður mannað við politiskum umboðum og umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting. Fíggjarnevndin setir nevndina, sum í minsta lagi 2. hvønn mánaða leggur statusfrágreiðing fyri mentamálanevndina og fíggjarnevndina, ið skal góðkenna arbeiðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at seta serstaka nevnd undir fíggjarnevndini at fyrireika nýggja svimjihøll við omanfyristandandi arbeiðssetningi og at velja Elin Lindenskov og Annfinn Brekkstein í nevndina.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 23. mai 2016 samtykt byggiskrá fyri byggiverkætlanina. Byggiskráin er hjáløgd sum fylgiskjal 1 og svarar hon uppá settu spurningarnar og punktini.

Tó viðv. spurninginum um lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum, er at viðmerkja:

Tórshavnar kommuna hevur fylgjandi svimjihallir:
1). Svimjihøllin í Kollafjarðar skúla.
Verður brúkt bæði til skúlar og stovnar og er opin fyri almenninginum fleiri dagar um vikuna og alt skúlaárið. Høllin tænir einum lokalum endamáli burturav og er ikki upplagt at broyta nakað tí viðvíkjandi. Høllin er í góðum standi.

2). Svimjihøllin í eindini á Argjavegi hjá Skúlanum á Fløtum (gl. Argja Skúla). Verður brúkt burturav til skúlabrúks. Framtíðin er nógv tengd at, hvussu verður við eindini á Argjavegi tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020. Uppskotini, ið hava verið nevnd eru til annað kommunalt endamál, so sum innan eldraøkið og hevur Nám X eisini verið nevnt, tó so at í løtuni verður arbeitt út frá, at Nám X fer inn í Handilsskúlabygningin. Alt eftir hvat framtíðar endamálið verður, skal støða takast til, um hylurin framhaldandi skal verða í brúki, ella hølið verður brúkt til annað endamál. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin. Høllin er í góðum standi.

3). Svimjihøllin í Hesti. Verður vanliga brúkt summarmánaðirnar. Ikki nøkur ætlan fyribils um nakra broyting. Høllin er í hampiligum standi.

4). Svimjihøllin í Eysturskúlanum. Hylurin verður brúktur til skúlabrúks umframt til kvøldskúla og aðra undirvísing. Mælt verður til at halda fram við honum óbroytt. Er serliga áhugaverd til ymiskar sertørvir, umframt skúlabrúks. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin, ið annars er í góðum standi.

5). Svimjihøllin í Gundadali. Er nógv brúkt til alskyns endamál.

Undangóðkenning av ráðgevaratoymum
Umsitingin er í holt við at fyrireika undangóðkenning av ráðgevaratoymum til eina møguliga hugskotskapping, sum ætlandi fer í gongd um miðjan juni og gongur fram til oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja
byggiskránna og at beina málið í býráðið, umvegis byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Útsett.

**Ískoyti**
Sbrt. Býráðssamtykt 23. apríl 2015 er talan um eina serstaka nevnd, sum vísir til fíggjarnevndina. Av teirri orsøk verður viðgerðin av byggiskránni at byrja í fíggjarnevndini, sum so beinir málið víðari til aðrar nevndir, áðrenn endaliga viðgerð í fíggjarnevndini og hareftir býráðsviðgerð.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at samtykkja byggiskránna og at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni og beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina.

**Tekniska nevnd 13. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri langhyl í Gundadal var útskrivað í august 2016, eftir at Tórshavnar býráð 16. juni 2016 hevði samtykt byggiskránna fyri langhyl í Gundadali.

Trý ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey eru:
- Toymið Ósbjørn Jacobsen Ark.
- Toymið SNA Ark.
- Toymið Árni Winther Ark.

23. november 2016 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og vóru tey latin navnloynt soleiðis, at dómsnevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

2. desember 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat uppskot skal vinna hugkappingina og fáa møguleika at innganga møguliga avtalu um projektering vm. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

Hetta mál er tengt at máli 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm., ið eisini er til viðgerðar í løtuni.

Á løgukonto 5775 L5610 eru umleið 7.000 tkr. tøkar til verkætlanina. Ætlanin er í næstum at fara undir nærri greiningar og samráðingar við vinnandi hugskotið og koma aftur til nevndarviðgerð við nærri greining av heildarkostnaði, tíðarætlan, útboðsleisti og fíggjarætlan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, mentamálaleiðari og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini um vinnandi hugskotið og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um møguliga projektering, umframt gerð av tíðarætlan, útboðsleisti, fíggjarætlan vm. og venda aftur til nevndina við einum uppskoti. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Mælt verður til at skipa bygginevnd í sambandi við nýggja langhylin samsvarandi vanligu mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur 2 limir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mælir býráðnum til at velja tveir limir í bygginevndina fyri nýggjum langhyli.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Bergun Kass og Heðin Mortensen.

# 78/17 Forkanningar : Nýtt tyrvingarpláss (2003-2242)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.06.2016 | 40/16 | 16/02171-45 |
| 2 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 219/16 | 16/02171-45 |
| 3 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 208/16 | 16/02171-45 |
| 4 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 54/17 | 16/02171-45 |
| 5 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 78/17 | 16/02171-45 |

**Málslýsing:**
Víst verður til mál 2003-0915 um tyrvingarplássið í Húsahaga. Tyrvingarplássið í Húsahaga verður fult um fá ár, og neyðugt er við drúgvum fyrireikingum, áðrenn annað øki kann takast í nýtslu sum tyrvingarpláss.

Umsitingin hevur í hesum sambandi, saman við ráðgevandi verkfrøðingunum sp/f Martin E. Leo, gjørt eina forkanning, ið er ætlað at vera grundarlag undir eini verkætlan um nýtt tyrvingarpláss, j.nr. 200302242-3-SG.

Í forkanningini verða nevndir ymsir møguleikar fyri nýggjum tyrvingarplássi, t.d. grótbrotini á Glyvursnesi, í Hundsarabotni og á Sundi.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**
Út frá kanningini verður mett, at skilabest er at arbeiða víðari við tveimum møguleikum, ávíkavist Glyvursnesi og Hundsarabotni. Eisini eigur at verða kannað um og í hvønn mun IRF er sinnað at samstarva við Tórshavnar kommunu um nýtt tyrvingarpláss.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at neyvari kanningar verða gjørdar av ávíkavist Glyvursnesi og Hundsarabotni sum tyrvingarpláss, herundir kostnaðarmetingar av neyðugum íløgum og rakstrarútreiðslum, at leggja fyri nevndina.

Tekniski stjórin mælir samstundis til at avsettar verða kr. 500.000,00 til projektering.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 9. desember 2003:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum.

Eisini samtykt at umsitingin útgreinar tørvin á betri reinsiútbúnað enn tað, ið nú verður brúkt, og kostnaðin av hesum.

**Ískoyti:**
Ráðgevandi verkfrøðingafelagið sp/f Martin E. Leo hava saman við donsku ráðg. verkfr. fyritøkuni Rambøll A/S, gjørt nærri kanningar (Notat, dagfest 15. apríl 2004, j. nr. 200302242-8). Hesi pláss eru tikin við í kanningina:

1 Grótbrotið á Glyvursnesi
2 Grótbrotið í Hundsarabotni
3 Útbygging í Húsahaganum.

Í hesum sambandi er gjørda arbeiðið grundað á hesi viðurskifti:

4 Ávirkan á landslag og bústaðir.
5 Ávirkan á áir og firðir.
6 Nýtsla av økinum og náttúrutilfeingi.
7 Atkomuviðurskifti og flutningsfrástøða.

T.v.s. at tað í fyrsta umfari ikki beinleiðis verður tikin støða til plásstørv, rakstrarútreiðslur, funktión, reinsiatgerð, fyribils kostnaðarmeting v.m.. Tó bendir alt á sambært forkanningini, at viðv. plásstørvi, er Glyvursnes eisini best egnaða staðið.

Niðurstøðan í kanningini er, at eitt tyrvingarpláss, sum bæði tekniskt og umhvørvisliga verður mett at vera ein tíðarhóskandi loysn, við fyrimuni kann staðsetast í grótbrotinum á Glyvursnesi.

Vísandi til forkanning og kanningar, sum eru gjørdar á teimum nevndu støðunum saman við Rambøll A/S, mælir ráðgevandi verkfrøðingafelagið Sp/F Martin E. Leo til, at nýggja tyrvingarøkið verður í grótbrotinum á Glyvursnesi.

**Tilmæli:**
*Vísandi til umrøddu kanning og tilmæli frá ráðgevunum, mælir tekniski stjórin til, at grótbrotið á Glyvursnesi verður valt til nýtt tyrvingarpláss. Víðari verður mælt til at gera projektuppskot við tekniskari/búskaparligari greining av:*
8 Ruskmongdum/livitíð
9 Innrætting av økinum
10 Val av geologiskari verju
11 Uppsamling og reinsing av frárenning frá økinum
12 Gerð av kostnaðarmeting og tíðarætlan

*Eisini verður mælt til:*
at søkt verður um prinsipiella umhvørvisgóðkenning av økinum, tá ið neyðugt umsóknartilfar fyriliggur.
at kannað verður um friðingarmyndugleikarnir skulu geva loyvi sambært náttúrufriðingarlógini og um so er, at søkt verður um loyvi.
at heitt verður á fíggjarnevndina um at útvega lendi.
at heitt verður á byggi- og býarskipanarnevndina um at gera neyðugu broytingarnar í byggisamtyktini og at avseta økið til tyrvingarpláss.
at heitt verður á teknisku nevnd um at dagføra vegasambandi soleiðis, at tað verður hóskandi til regluliga tunga ferðslu.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. mai 2004:** Nevndin samtykti at umsitingin kannar møguleikan fyri at finna annað øki til tyrvingarpláss enn Glyvursnes.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við Ráðgevandi verkfrøðingafelagnum sp/f Martin E. Leo og Rambøll kanna aðrar møguleikar fyri tyrvingarplássi. Í hesum umfari eru hesi støð kannað:
13 Grótbrotið á Sundi.
14 Økið sunnan fyri Glyvursnes, í Glyvurshaganum.
15 Økið við gomlu sildaverkssmiðjuna, sunnan fyri Velbastað.
16 Grótbrotið á Glyvursnesi – enn einaferð.
17 Fossdalur norðan fyri Velbastað.

Niðurstøðan er, at av teimum higartil kannaðu økjunum er Grótbrotið á Glyvursnesi bæði umhvørvisliga, tekniskt og tá hugsað verður um nýtslutíðina best egnaða øki. Víst verður annars til niðurstøðuna og raðfestingina í hjálagda notati.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin heldur fast um tilmælið til seinasta fundin hin 19. mai 2004.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 23. juni 2004**: Ein meiriluti, Høgni Mikkelsen, Schumann Hjaltalin og Tórfinn Smith, samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum.

Ein minniluti, Beate L. Samuelsen, tók ikki undir við tilmælinum.

Ein annar minniluti, Hildur Eyðunsdóttir, krevur málið fyri býráðið.

**Býráðið 2. september 2004:** Atkvøtt var um minnilutatilmælið frá Beate L. Samuelsen um at beina málið í heilsu- og umhvørvisnevndina sum var samtykt við 9-1 atkvøðum.

Fyri atkvøddu Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Schumann Hjaltalin, Høgni Mikkelsen, Jákup S. Joensen, Heðin Mortensen, Jan Christiansen, Elin Lindenskov og Hildur Eyðunsdóttir. Ímóti atkvøddi Leivur Hansen.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 9. september 2004:** Umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Ole Michaelsen frá Rambøll, ið er serkønur innan tyrvingarpláss, og sum saman við Sp/F Martin E. Leo hevur gjørt forkanningarnar í málinum, hevur framløgu um evnið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 3. februar 2005:** Kunnað var um málið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 14. september 2006:** Nevndin samtykti at heita á umsitingina um at útvega ítøkiligari upplýsingar fyri útvegan og rakstur av tyrvingarplássi á Sundi samanborið við tyrvingarpláss á Glyvursnesi og at umsitingin kannar møguleika fyri íbinding í landsvegin á Sundi at leggja fyri nevndina á næstkomandi fundi.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur saman við ráðgeva útvegað fleiri upplýsingar fyri útvegan og rakstur av tyrvingarplássi á Sundi samanborið við tyrvingarpláss á Glyvursnesi.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 7. desember 2006:** Ein minniluti, Beate L. Samuelsen og Marin Katrina Frýdal, mælir til at nýta økið á Sundi til tyrvingarpláss.

Ein annar minniluti, Jan Christiansen, mælir til at nýta økið á Glyvursnesi til tyrvingarpláss og vísir til tilmælið frá tekniska stjóranum til fundin í nevndini tann 19. mai 2004.

Ein triði minniluti, Katrin Dahl Jakobsen og Hildur Eyðunsdóttir, tekur støðu á býráðsfundi.

Ein samd nevnd mælir til at beina málið í byggi-og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. desember 2006:** Nevndin samtykti at kanna aðrar møguleikar fyri staðseting av tyrvingarplássi at leggja fyri nevndina á komandi fundi.

**Tekniska nevnd 13. desember 2006:** Málið tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur sambært nevndarsamtykt frá 11. des. 2006 kannað aðrar møguleikar fyri staðseting av tyrvingarplássi. Notat fyriliggur í málinum, sum tekur útgangsstøði í nýggjum tyrvingarplássi á økinum við Lambafelli.

Býarverkfrøðingurin kemur at greiða frá uppskotinum og kemur við tilmæli til fundin.

**Tilmæli:**
*Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at Glyvursnes bæði fíggjarliga, umhvørvisliga og í mun til livitíð er skilabesta loysnin, og vísa tí til tilmælið til fundin 19. mai 2004, ið er soljóðandi:*

*Vísandi til umrøddu kanning og tilmæli frá ráðgevunum, mælir tekniski stjórin til, at grótbrotið á Glyvursnesi verður valt til nýtt tyrvingarpláss. Víðari verður mælt til at gera projektuppskot við tekniskari/búskaparligari greining av:*

18 Ruskmongdum/livitíð.
19 Innrætting av økinum.
20 Val av geologiskari verju.
21 Uppsamling og reinsing av frárenning frá økinum.
22 Gerð av kostnaðarmeting og tíðarætlan.

*Eisini verður mælt til:*

- at søkt verður um prinsipiella umhvørvisgóðkenning av økinum, tá ið neyðugt umsóknartilfar fyriliggur.
- at kannað verður um friðingarmyndugleikarnir skulu geva loyvi sambært náttúrufriðingarlógini og um so er, at søkt verður um loyvi.
- at heitt verður á fíggjarnevndina um at útvega lendi.
- at heitt verður á byggi- og býarskipanarnevndina um at gera neyðugu broytingarnar í byggisamtyktini og at avseta økið til tyrvingarpláss.
- at heitt verður á teknisku nevnd um at dagføra vegasambandi soleiðis, at tað verður hóskandi til regluliga tunga ferðslu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 5. februar 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein meiriluti, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Bjarti Mohr og Leivur Hansen, samtykti at taka undir við tilmælinum og mæla í hesum viðfangi staðiliga til at skundað verður undir Glyvursvegin og brúnna úm Sandá.

Ein minniluti: Sjúrður Olsen, tekur ikki undir við ætlanini, soleingi nýggj brúgv og

Glyvursvegurin ikki er gjørd.

**Tilmæli:**
*Vísandi til tilmælið og til samtyktina í byggi- og býarskipanarnevndini 5. februar 2007 mæla kommunustjórin, tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin til, at fíggjarnevndin:*

1 *ger avtalu við Búnaðarstovuna og festaran um útvegan ella leigu av lendinum*
2 *áleggur teknisku umsitingini at bjóða út prosjekteringsarbeiðið fyri sjálvt tyrvingarplássið millum føroyskar og útlendskar ráðgevarar at leggja fyri nevndina aftur*
3 *játtar pening til forprosjekt fyri tyrvingarplássið - fyribils mett til kr. 700.000 at fíggja av íløgum fyri 2007*
4 at heitt verður á fíggjarnevndina um at játtað pening til dagføring av vegasambandi, soleiðis at tað verður hóskandi til regluliga tunga ferðslu - fyribils mett til kr. 1.000.000, at fíggja av íløgum fyri 2007

**Fíggjarnevndin 16. februar 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Eisini samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 1.700.000 av íløgum.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 20. februar 2007:** Kunnað varð um málið.

**Býráðið 22. februar 2007:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Bjarti Mohr, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Beate L. Samuelsen og Sjúrður Olsen.

**Tilmæli:**
Vísandi til at tað krevur ov nógva umsitingarliga orku at fyrireika útbjóðingartilfar til ráðgeva smb. punkt 2 í omanfyri standandi tilmæli, mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til, at heitt verður á ráðgevandi fyritøkuna Rambøll um at gera byggiskrá og projekteringsarbeiðið fyri tyrvingarplássið.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 19. juni 2007:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum, og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá heilsu- og umhvørvisnevndini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Bjarti Mohr, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Beate L. Samuelsen og Sjúrður Olsen

**Ískoyti:**
Bygginevnd varð vald í 2008 og sótu hesi í nevndini: Elin Lindenskov, Jan Christiansen, Annika Berg (seinni Súni Christiansen), Boði Haraldson, Kári Finnsson og Tina Johannesen.

Bygginevndin heitti 25. november í 2010 á leiðsluna um at fáa ognarviðurskiftini í rættlag og samstundis avgjørdi bygginevndin at leggja arbeiðið niður fyribils, til ognarviðurskiftini vóru komin upp á pláss.

Heilsu- og umhvørvisnevndin hevði málið aftur til viðgerðar í 2010, har nevndin tann 23. november samtykti (j.nr. 14/00380-28): Vísandi til at málið er av alstórum týdningi og hevur skund, samtykti nevndin at heita á borgarstjóran, um at taka málið upp við Innlendismálaráðið beinanvegin, fyri at fáa greiðu á ognarviðurskiftunum í grótbrotinum.

Tilfar sum gjørt í sambandi við fremjan av ætlanini er m.a.:
1. Skitsuprojekt, dagfest februar 2008 frá Rambøll
2. Miljøvurdering, dagfest mars 2010 frá Rambøll
3. Projekt av "kloakk út á sjógv", frá PB Consult

Ognarviðurskiftini eru enn ikki komin upp á pláss.

Seinastu árini er nógv tilfar koyrt inn á økið, serliga er tað tilfar frá arbeiðinum at gera Glyvursvegin, sum fyllir nógv. Hetta broytir fortreytirnar fyri tí arbeiðinum sum er gjørt, serliga viðvíkjandi skipan av økinum.

Verandi tyrvingarpláss í Húsahaganum er um at verða fult, soleiðis at kommunan innan stutta tíð skal hava útvegað annað tyrvingarpláss.

Neyðugt verður eisini at gera vegasambandi til øki á Glyvursnesi soleiðis, at tað er egnað til tunga ferðslu.

Viðmerkjast skal, at aðrar ætlanir hava verið við økinum á Glyvursnesi, herundir golfvøllurin, men eru hesar ikki tiknar við í hesa málslýsing.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á kommunalu brennistøðini og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til:
- at kommunan beinanvegin tekur stig til at fáa ognarviðurskiftini upp á pláss, soleiðis at tyrvingarpláss kann gerast í grótbrotinum á Glyvursnesi
- at bygginevnd verður sett.
- at kannað verður hvønn týdning tað hevur fyri ætlanina, at nýtt grótbrot skal gerast í sambandi við nýggju havnaútbyggingina.
- at verandi projekttilfar o.a. verður dagført og tillagað verandi støðu, herundir eisini neyðug myndugleikaloyvi.
- at tað sum er eftir av játtaðum íløgum til nýtt tyrvingarpláss, íalt kr. 800.000, verður nýtt til dagføring av projekttilfari o.a.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at atlit verða tikin til ætlanina at leggja ein golfvøll á økinum. Málið verður beint í fíggjarnevndina í sambandi við ognarviðurskiftini.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum viðv. ognarviðurskiftunum.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin og tekniski stjóri mæla býráðnum til at velja bygginevnd til tyrvingarplássið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Einmælt samtykt at velja Sigrun Mohr og Marin Katrinu Frýdal í bygginevndina.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at heilsu og umhvørvisnevndin er umskipað, skulu nýggj umboð veljast í bygginevndina.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja tveir limir í bygginevndina.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Turið Horn og Heðin Mortensen.

# 79/17
# Átak parkeringspolitikkur - Parkeringsloyvir til íbúgvar í miðbýnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 04.05.2016 | 51/16 | 16/01724-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 01.06.2016 | 62/16 | 16/01724-1 |
| 3 Tekniska nevnd | 30.08.2016 | 83/16 | 16/01724-1 |
| 4 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 232/16 | 16/01724-1 |
| 5 Ferðslunevndin | 22.09.2016 | 42/16 | 16/01724-1 |
| 6 Tekniska nevnd | 11.10.2016 | 101/16 | 16/01724-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 40/17 | 16/01724-1 |
| 8 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 79/17 | 16/01724-1 |
| 9 Tekniska nevnd | 14.03.2017 | 21/17 | 16/01724-1 |

**Málslýsing:**
Kommunan hevur við parkeringspolitikkinum samtykt at veita íbúgvum, sum búgva innanfyri parkeringssonuna og ikki hava møguleika at parkera á egnum bústaði, parkeringsloyvi.

Treytir til tann, sum søkir (loyvishavara):

- skal vera privatpersónur
- skal hava bústað innanfyri umrøddu parkeringssonu, og bústaðurin hevur ikki parkeringsmøguleikar*
- skal vera eigari av bilinum, sum søkir parkeringsloyvi, og bilurin skal vera skrásettur á bústaðnum
- bilurin skal vera undir 3500 kg
- *Um kostnaðurin fyri at gera parkeringspláss á egnum bústaði hjá loyvishavara kann gerast fyri uml, upp til 50.000,-, verður umsóknin ikki játtað.

Tað verður bert 1 parkeringsloyvi útskrivað pr. bústað.

Um eigarin av bilinum ikki er eigari av húsinum, skal hann hava samtykki frá eigaranum av húsinum.

Á borgarafundi á Reinsarínum 18.04.2016, við heitinum parkeringsviðuskiftir í miðbýnum, var góð undirtøka at fáa parkeringsloyvisskipanina setta í verk.

Arbeiðsuppgávur:

1. Kunning til tey sum koma í sonuna
2. Reglugerð
3. Kunning á Heimasíðuni
4. Møguligur kostnaður
5. Atgongd til møguliga gjaldskipan
6. Uppsetan av talgildum umsóknarskjali

7. Innanhýsis mannagongdir og kunnleiki til parkeringsloyvir, starvsfólk í snarskivuni
8. Innanhýsis mannagongdir og kunnleiki til parkeringsloyvir, starvsfólk á Teknisku fyrisiting
9. Faldari
10. Orðing av svarskrivi, við parkeringsloyvi (við skelti at seta í rútin)
11. Orðing av svarskrivi, til tey sum ikki uppfylla treytirna
12. Keypa plastlummar til parkeringsloyvi
13. Kærumøguleikar
14. Atgongd frá Akstovuni.

Ì sambandi við at áseta gjald fyri parkeringsloyvini, so er at siga, at tað er umráðandi at hava fyri eygað, at kommunan hevur eina skyldu at halda seg til prinsippið, um at gjaldið skal ”hvíla í sær sjálvum” – hvørki meira ella minni. Um ikki lógarheimild fyriliggur fyri at krevja gjøld, skal kommunan halda seg til prinsippið um, at gjaldið skal hvíla í sær sjálvum. Hetta merkir, at kommunan skal halda seg til kostprísin, tað má hvørki takast meiri fyri loyvini, enn tað kostar at veita tey og heldur ikki minni.

Tá vit kenna neyva grundarlagið fyri skipanini, og sostatt ikki vita hvussu nógvir borgarar fara at gera gagn burturúr skipanini, so verður neyðugt at seta ein fyribils kostnað. Mett verður, at veiting og umsiting av parkeringsloyvunum kemur at kosta um tær 800 kr. árliga fyri hvørt loyvi. Hesin kostnaðurin má síðani eftirmetast, tá skipanin er komin at virka, og í seinasta lagi um eitt ár, fyri at tryggja okkum at rætta gjaldið verður kravt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at seta parkeringsloyvisskipanina í verk skjótast.

**Tekniska nevnd 04. mai 2016:** Málið umrøtt og verður viðgjørt aftur á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Parkeringsloyvir geva rætt til at parkera á øllum parkeringsbásum við tíðarsonuni 2 t og 8 t, í miðbýarsonuni (sona 1), sí kort nr. 16/01724-4, óavmarkaða tíð.

**Tekniska nevnd 01. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um at geva borgarunum rætt til at parkera á øllum parkeringsbásum við tíðarsonuni 2 t og 8 t, í miðbýarsonuni sambært korti nr. 16/01724-4. Nevndin ynskir at sonan til parkeringsloyvi skal økjast til m.a. at fevna um Rabarbukvarterið og Undir Pisuvarða/Tinghúsvegur at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur kannað, hvussu nógvir bilar eru skrásettir, hvussu privatu og almennu parkerings umstøðurnar eru í Rabarbukvarterinum, undir Pisuvarða og á Tinghúsvegnum.

Um parkeringssonan verður víðkað mál nr.: 16/01727 og parkeringsloyvir eisini skulu umfata íbúgvar í nevnda øki viðførir tað:

- Uppmerkjan av uml. 50 nýggjum parkeringsbásum
- Uppsetan av nýggjum skeltum
- Størri arbeiðsøki hjá parkeringsvørðum

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin samtykkir at veita íbúgvum í verandi sonu parkeringsloyvir. Og tá mál nr. 16/01727, Víðkan av sonuni er avgreitt, at víðka loyvisveitanina eisini at fevna um íbúgvarnar í Rabarbukvarterinum, undir Pisuvarða og á Tinghúsvegnum.

**Tekniska nevnd 30. august 2016:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrun Mohr og Helena D. á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum, tó so at víðkanin av sonuni verður framd í seinasta lagi 1. januar 2017.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, vísir til samtyktina í teknisku nevnd 1. juni 2016, at sonan til parkeringsloyvi umfatar eisini Rabarbukvarterið og undir Pisuvarða/Tinghúsvegur, ið eisini fáa parkeringsloyvi beinanveg og krevur málið fyri býráðið.

Ein annar minniluti, Bogi Andreasen, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Sjúrður Olsen, um at beina málið í ferðslunevndina, ið fall við 6 atkvøðum fyri og 6 ímóti

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr og Halla Samuelsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Tróndur Sigurðsson.

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá Annfinn Brekkstein, um at beina málið í teknisku nevnd og í ferðslunevndina til ummælis, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 5 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Helena Dam á Neystabø, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr og Halla Samuelsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Tróndur Sigurðsson.

**Ferðslunevndin 22. september 2016:** Kunnað varð um uppskot til parkeringsætlan at lata parkeringsloyvir til íbúgvar í miðbýnum. Samtykt varð at taka undir við parkeringsætlanini, tó við teirri treyt at sonuøkið verður víðkað sambært uppskotinum, áðrenn skipanin verður sett í verk. Orsøkin fyri hesum er, at nevndin metir at parkeringstrýstið verður ov stórt á Rabarbukvarterið og undir Pisuvarða/Tinghúsvegur um hesi ikki verða tikin við frá byrjan.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt ein nágreiniliga kanning av, hvat kostnaðurin er av at gera víðkaðu parkeringssonuna búna til parkeringsloyvir.

Talan er um uppmerking av 100 parkeringsbásum og hartil bílegging, útskifting, grevstur, uppsetan og flytan av skeltum. Samlaði kostnaðurin fyri hettar arbeiði verður mettur til 220.750 kr.
Peningur til omanfyri standandi arbeiði, er ikki tøkur á teknisku deild í 2016.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at tekniska nevnd samtykkir, at umsitingin fer undir, at veita íbúgvum í verandi miðbýarsonu parkeringsloyvir í 2016, og at víðka parkeringssonuna fyrst í komandi ári, og harvið veita íbúgvum í hesum øki parkeringsloyvir tá.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Útsett.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevndin heitti á umsitingina, á síðsta fíggjarnevnarfundi 22. februar 2017, um at gera eitt tilmæli, um hvussu miðbýar parkeringssonan kundi bítast í fleiri økir, so parkeringsloyvini fyri hvønn loyvishavara, ikki vóru galdandi í allari miðbýarsonuni, men bert í nærumhvørvinum av bústaðnum hjá loyvishavaranum.

Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot, har verandi miðbýar parkeringssonan verður býtt í 3 økir, við hvør sínum liti. Høvuðsvegirnir, sum skilja parkeringsøkini eru Áarvegur, Mylnugøta og Niels Finsens gøta.

Sí Kort til fíggjarnevndarfund 02.03.2017

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Tikið av skrá.

## 80/17 Keyp av lendi til Á-handil við Landavegin

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 14.02.2017 | 12/17 | 17/00345-2 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.02.2017 | 34/17 | 17/00345-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 39/17 | 17/00345-2 |
| 4 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 80/17 | 17/00345-2 |

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Tórshavnar Kommuna hevur 22. januar 2017 móttikið umsókn frá Ragnar Zachariasen, frá Zeta arkitektum, vegna P/f Poul Hansen, um keyp av uml. 110 $m^2$ av lendi frá matr 1046a, frá Tórshavna Kommunu, á Geitagerði, í sambandi við útbyggingarætlan av matvøruhandlinum Á við Landavegin og víðkan av parkeringsøki teirra.

Lendið, sum P/f Poul Hansen ynskir at keypa, er vegastubbi, sum liggur millum verandi Á handil matr.1046af, matr. 1046ak og matr. 1046ae, sum P/f Poul Hansen eisini er eigari av. Sí tekningar 17-00345-1 A3 Mappa.

Í undirlendinum er kloakkføring, sum møguliga skal umleggjast í sambandi við útbyggingina av bygninginum og gerð av parkeringsøkinum. Útreiðslur av møguligari umlegging skal P/F Poul Hansen bera kostnaðin av. Henda umlegging umfatar eisini leiðingar frá matr. 1046ah.

Fyri at selja lendið, skulu matr. 1046af, 1046ak og 1046a leggjast saman í ein matrikul.

**Ásetingar úr byggisamtyktini:**
§ 5. Ásetingar fyri umráðspartarnar A1 í3. Grundumráði. Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, ......

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til, at Tórshavnar kommuna selur P/f Poul Hansen nevnda matr. 1046a og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 14. februar 2017:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal, Bergun Kass og Tróndir Sigurðsson, samtykti at taka undir við tilmælinum, treytað av at ferðsluviðurskiftini í økinum verða loyst, soleiðis at ferðslutrygdin verður nøktandi í mun til øktu ferðsluna í økinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, tekur undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. februar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í teknisku nevnd.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

# 81/17 Tórshavnar Musikkskúli - staðseting av musikkskúlanum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.03.2014 | 54/14 | 15/01335-38 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.04.2014 | 65/14 | 15/01335-38 |
| 3 Býráðsfundur | 22.05.2014 | 117/14 | 15/01335-38 |
| 4 Mentamálanevndin | 22.05.2014 | 126/14 | 15/01335-38 |
| 5 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 206/14 | 15/01335-38 |
| 6 Tekniska nevnd | 23.06.2014 | 219/14 | 15/01335-38 |
| 7 Ferðslunevndin | 18.09.2014 | 65/14 | 15/01335-38 |
| 8 Ferðslunevndin | 26.09.2014 | 67/14 | 15/01335-38 |
| 9 Tekniska nevnd | 08.10.2014 | 240/14 | 15/01335-38 |
| 10 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 209/14 | 15/01335-38 |
| 11 Fíggjarnevndin | 22.10.2014 | 276/14 | 15/01335-38 |
| 12 Ferðslunevndin | 28.10.2014 | 76/14 | 15/01335-38 |
| 13 Tekniska nevnd | 05.11.2014 | 260/14 | 15/01335-38 |
| 14 Mentamálanevndin | 05.11.2014 | 218/14 | 15/01335-38 |
| 15 Fíggjarnevndin | 12.11.2014 | 305/14 | 15/01335-38 |
| 16 Býráðsfundur | 20.11.2014 | 227/14 | 15/01335-38 |
| 17 Mentamálanevndin | 07.04.2015 | 63/15 | 15/01335-38 |
| 18 Fíggjarnevndin | 18.05.2015 | 114/15 | 15/01335-38 |
| 19 Mentamálanevndin | 16.03.2016 | 79/16 | 15/01335-38 |
| 20 Fíggjarnevndin | 17.03.2016 | 120/16 | 15/01335-38 |
| 21 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 96/16 | 15/01335-38 |
| 22 Býráðsfundur | 23.08.2016 | 199/16 | 15/01335-38 |
| 23 Mentamálanevndin | 24.11.2016 | 299/16 | 15/01335-38 |
| 24 Fíggjarnevndin | 29.11.2016 | 397/16 | 15/01335-38 |
| 25 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 296/16 | 15/01335-38 |
| 26 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 313/16 | 15/01335-38 |
| 27 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 403/16 | 15/01335-38 |
| 28 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 325/16 | 15/01335-38 |
| 29 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 45/17 | 15/01335-38 |
| 30 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 81/17 | 15/01335-38 |
| 31 Mentamálanevndin | 15.03.2017 | 52/17 | 15/01335-38 |

**Málslýsing:**
Tórshavnar Musikkskúla tørvar betri hølisumstøður. Nevndin fyri Musikkskúlan hevur áhaldandi gjørt vart við hendan spurningin, og býráðið hevur javnan havt málið til umrøðu.

Nú er ætlanin at taka málið uppaftur. Í hesum umfarinum verður miðað eftir at fyrireika ætlanir at útvega Musikkskúlanum hølir, sum eru ætlað til endamálið, og at gera av, hvar hesi hølir skula vera.

Áhugin fyri at fáa frálæru í Musikkskúlanum er ovurstórur, og ikki er gjørligt at ganga øllum umsóknum á møti. Hetta er m.a. ein spurningur um, hvørja rakstrarjáttan skúlin hevur. Sum er rinda Mentamálaráðið og kommunan raksturin.

Musikkskúlin húsast í dag í mongum ymsum hølum kring um í býnum. Miðstøðin á Frúutrøð er ein gamal barnaskúli, sum hjálpt er uppá, men sum ikki gevur nøktandi umstøður.

Til tess at fáa gongd á fyrireikingar til at útvega Tórshavnar Musikkskúla tíðarhóskandi karmar verður mælt til at játta pening at fara undir neyðugt fyrireikingararbeiði.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 500.000 av kontu 1041-90-41002, Læknamiðstøð í Hoyvík, til staðseting/fyrireiking av musikkskúla, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 2. desember 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fyrireikingararbeiðið higartil hevur fevnt um møguliga staðseting av nýggjum Musikkskúla og lýsing av hølistørvi.

Samskiftið hevur verið við Norðurlandahúsið um staðseting á økinum eystan fyri Norðurlandahúsið á fløtuni í Sortudýki. Norðurlandahúsið tekur væl undir við hesi staðseting, sum tó ikki skal ganga Norðurlandahúsinum ov nær.

Samskiftið hevur eisini verið við Musikkskúlan – bæði leiðara, umboð fyri lærarar og umboð fyri musikkskúlanevndina – um hølistørvin eins og um krøv til slíkan nýbygning sum heild. Skúlin hevur sent umsitingini meting um dagførdan hølistørv.

Til tess at koma meira ítøkiliga víðari skal avtala gerast við ráðgeva um at fáa gjørt dagførda byggiskrá og skitsuuppskot, sum lýsir ymsar loysnir bæði viðvíkjandi staðseting, skapi og byggilistarligum hugskoti. Fyrireikingararbeiðið er grundarlag fyri viðgerð og avgerð um endalig staðseting og víðari tilgongd. Játtan er til endamálið. Setast skal eisini ein bygginevnd.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at sett verður bygginevnd fyri nýggjum Musikkskúla, og at gjørd verður ráðgevaraavtala um byggiskrá, skitsuuppskot v.m.

**Mentamálanevndin 2. juni 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 24. juni 2010:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen, Elin Lindenskov, Levi Mørk, Maria Hammer Olsen, Annfinn Brekkstein, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Gunnar Mohr

Í bygginevndina vórðu valdir Jógvan Arge og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Fyrireikingararbeiðið er nú komið so mikið áleiðis, at byggiskrá skal gerast. Byggiskráin skal lýsa byggiætlanina, herundir rúmskrá, fermetrar og ymisk funktiónskrøv. Sambært politisk-fyrisitingarligu mannagongdini fyri verkætlanir fíggjaðar av íløgum, skal faknevndin biðja um byggiskrá, sum bygginevndin síðani útvegar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at biðja bygginevndina útvega byggiskrá, og at tað í hesum sambandi verður játtað kr. 200.000 til endamálið av íløgukontu 5175.

**Mentamálanevndin 9. februar 2011:** Mayfinn Norðoy, arkitektur, greiddi frá projektinum.

Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játtað kr. 200.000 til endamálið av íløgukonto 5175.
**Býráðið 24. februar 2011:** Einmælt samtykt.
**Ískoyti:**
Á fundi 1. juni 2011 samtykti bygginevndin formliga at senda byggi- og býarskipanarnevndini um mentamálanevndina umbøn um at viðgera og góðkenna staðseting av nýggjum Musikkskúla á matrikklarnar 1453a, 1410d (lutur I) og 1409 (lutur I), eigari Tórshavnar kommuna, samsvarandi skitsuuppskoti.

Umbønin hjá bygginevndini skal síggjast í ljósinum av, at arbeiðið við skitsuuppskoti og byggiskrá er um at verða liðugt. Bygginevndin hevur alla tíðina arbeitt við staðseting eystanfyri Norðurlandahúsið á fløtuni í Sortudýki. Bygginevndin hevur mett at henda staðseting er væl egnað til Musikkskúla, tí hetta liggur væl fyri í mun til stóru ferðsluæðrirnar, og at Musikkskúlin og Norðurlandahúsið sum nærmastu grannar fara at fáa gagn av hvørjum øðrum serliga í mun til konsertvirksemi og høli.

Sambært galdandi mannagongd fyri verkætlanir fíggjaðar av íløgum, skal byggi- og býarskipanarnevndin góðkenna staðseting, eftir at avvarðandi faknevnd hevur góðkent byggiskránna.

Staðsetingin og byggiskráin eru ikki viðgjørd av umsitingini á Byggi- og býarskipanardeildini undan hesum fundinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. juni 2011:** Málið varð útsett.

**Mentamálanevndin 15. juni 2011:** Samtykt at taka undir við bygginevndini og beina málið víðari í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2011**: Tikið av skrá.

**Býráðið 16. juni 2011:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið byggiskránna og mælir til at góðkenna hana við fyrivarni fyri, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingini áðrenn útbjóðing.

Bygginevndin mælir somuleiðis til at taka upp samráðingar um høvuðsráðgeva og um prosjektering, at undirráðgevingin verður boðin út, og at játtaðar verða kr. 3.800.000 av íløgujáttanini fyri 2011 á kontu 5175 til prosjektering.

Sambært galdandi mannagongd fyri íløguverkætlanir skal tekniska nevnd viðgera og góðkenna tekniska partin. Mentamálanevndin hevur 15. juni 2011 sambært somu mannagongd beint málið um at góðkenna staðseting til byggi- og býarskipanarnevndina. Sambært kommunustýrisskipani § 11, 2. petti skal tilmæli um íløgur til býráðið ganga um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

Í hesum sambandi er at viðmerkja, at samlaði byggikostnaðurin sambært byggiskránni er ikki játtaður og framgongur heldur ikki fult út í mun til langtíðaríløguætlanina árini 2011-2014, og at ikki kann farast undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við bygginevndini, og at taka upp samráðingar við Kontrast um høvuðsráðgeva og um prosjektering. Undirráðgevingin verður boðin út.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla harumframt til at beina tekniska partin fyri teknisku nevnd at viðgera og góðkenna, og at beina tilmælið um at játta kr. 3.800.000 til prosjektering av kontu 5175 í býráðið um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 21. juni 2011:** Nevndin: Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen, Jákup Símun Simonsen og Annfinn Brekkstein tekur undir við tilmælinum, tó tekur Annfinn Brekkstein støðu til spurningin um samráðingar um høvuðsráðgeva á seinni fundi.

**Ískoyti:**
Staðsetingin av nýggjum musikkskúla eystanfyri Norðurlandahúsið, er í byggiskránni grundgivin soleiðis:

*"Staðsetingin er vald útfrá verandi funktiónum í økinum við Kringvarpið og Norðurlandahúsið. Eitt mentunarøki sum við einum musikkskúla afturat sær fer at skapa synergi og eitt spinn off sum verður føroyskum tónleiki at frama.*

*Hølisviðurskiftini í hesum trimum húsum koma at komplementera hvørt annað – bæði í sambandi við tónleikatiltøk og gerandisdag. Ùtvarpshúsið og Norðurlandahúsið hava eisini eina hitaskipan sum musikkskúlin ómakaleyst kann knýta seg uppí."*

Grundøkið fevnir um 3 matriklar og er umleið 9499 m² til støddar:

Matr. nr. 1453a,
Eigari er Tórshavnar Kommuna
Støddin er 7016 m2

Matr nr. 1410d (lutur 1)
Eigari er Tórshavnar kommuna
Støddin er 1726 m2

Matr nr. 1409 (Lutur 1)

Eigari er Tórshavnar kommuna
Støddin er 757 m2

Økið er í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu lagt út sum C2-øki, Opin miðstaðarbygging, við hesi áseting: *"Umráðisparturin er í síni heild lagdur til miðstaðarendamál, serstakliga ætlað stovnum, framsýningarhøllum, samkomuhúsum, tónleikahøllum og øðrum mentunarligum stovnum og tílíkum og til tænastuvirksemi, ið hava samband við hesi, skrivstovur, matstovur o.t."*

Byggistigið má ikki fara upp um 0,25 og nettonýtslustigið ikki upp um 0,3.

Býarskipanarumsitingin hevur ikki havt staðsetingarspurningin til ummælis áðrenn byggiskráin er gjørd liðug. Býarskipanarumsitingin hevur ikki viðgjørt staðsetingina undan hesi nevndarviðgerð. Býarskipanarumsitingin ger tí vart við, at aðrar staðsetingar, har slíkt virksemi eisini kundi ligið væl saman við øðrum mentunarligum og/ella undirvísingarvirksemi, sosum Marknagil, Skálatrøð, Vestara Bryggja v.fl. ikki hava verið viðgjørdar av umsitingini. Uttan hesa viðgerð, kann býarskipanarumsitingin sostatt bert vísa til undanfarna álit um staðseting av musikkskúla, sum býráðið áður hevur viðgjørt.

Viðv. tekniska partinum er sambært byggiskránni upplýst fylgjandi:

***"Parkering og atkoma***
*Vísandi til gjøgnumstreymnin av fólki til og frá skúlanum er umráðandi, at aktoman, av- og áseting og parkeringsviðurskiftini eru nøktandi. Nýggju atkomu og parkeringsviðurskiftini verða soleiðis skipað, at hetta verður lagt yvirav innkoyring til Inn, Tórsbreyt og Kurlu. Pláss verður til uml. 40-50 bilastøðlar. Eisini er møguleiki fyri at gera parkeringshús við "grønum plássi" omaná staðsett upp ímóti ringvegnum. Gøta sambindur ferðslu hjá gangandi millum Sundsvegin og Ringvegin. Mentunarligt rekrativt øki verður skipað, hylur við tilknýti til verandi á- Hugsað er um møguleika fyri t.d. uttandura tónleikatiltøkum.*

*Nógv av- og áseting er knýtt at bygninginum, umframt at nógv trýst er í økinum frammanundan- við ferðslu til m.a. Norðurlandahúsið, Inn, Yndi, Kurlu og Tórsbreyt. Hetta skal havast í huga tá atkomuviðuskiftini vera loyst."*

***Tekniskar veitingar***
*Bindast skal í verandi kommunalar vatn- og kloakkskipanir. Kloakk og aðrar leiðingar í jørð verður partur av skipanaruppskotinum"*

Plan- og rakstrardeildin hevur ikki havt tekniska partin til ummælis áðrenn byggiskráin er gjørd liðug. Plan- og rakstrardeildin ger tí vart við, at ætlaninar sambært byggiskránni viðv. ferðsluloysnum, parkeringstørvi, tekniskum veitingum v.m. ikki eru umrøddar við deildina frammanundan. Vísandi til nógva framførsluvirksemi, sum ætlanin er at hava í bygninginum sambært byggiskránni, og nógva framførsluvirksemi í økinum annars (Norðurlandahúsið og Kringvarpið), tekur plan- og rakstrardeildin fyrivarni fyri, at treytir verða settar í samband við byggimálsviðgerð, um fullfíggjaða ferðsluloysn og nøktandi tal av parkeringsplássum í mun til ætlaða virksemi.

Sambært kommunustýrisskipani § 11, 2. petti skal tilmæli um íløgur til býráðið ganga um byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

Í hesum sambandi er at viðmerkja, at samlaði byggikostnaðurin sambært byggiskránni er ikki játtaður og framgongur heldur ikki fult út í mun til langtíðaríløguætlanina árini 2011-2014, og at ikki kann farast undir eitt arbeiði, fyrr enn neyðug játtan er tøk.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. juni 2011:** Nevndin samtykti at góðkenna uppskotið til staðseting sambært byggiskránni, og at viðmæla at játta kr. 3.800.000 til projektering av kontu 5175, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 21. juni 2011:** Nevndin samtykti at arbeitt verður víðari við fyriliggjandi uppskoti og vísir á fyrivarni fyri, at treytir verða settar í sambandi við byggimálsviðgerð um fullfíggjaða ferðsluloysn og nøktandi tal av parkeringsplássum í mun til ætlaða virksemið. Samtykt at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2011:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 3.800.000 til projektering av konto 5175.

**Býráðið 23. juni 2011:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2011:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2011:** Útsett.

**Ískoyti:**
Høvuðsráðgevasáttmálin:
Samráðst er við S/pf. Kontrast um sáttmála fyri høvuðsráðgeving, prosjekteringsleiðslu og serráðgeving (akustikk, bruni). Samlaða arkitektráðgevaratilboðið er kr. 2.963.419 v/mvg.

Undirráðgevingin:
Verkfrøðingaráðgevingin uppá berandi konstruktiónir, EL-prosjekt og HVS varð boðin út 10. oktober 2011 við freist at geva tilboð tann 14. oktober 2011.

Hesir fingu í boði at bjóða: P/f. LBF, Sp/f. KJ-Elráð, P/f. SMJ, P/f. HMP, Sp/f. PB Consult og Sp/f. M. Leo.

Tilboð komu inn frá Inn komu P/f. LBF, Sp/f. KJ-Elráð, P/f. SMJ og P/f. HMP. Sp/f. M. Leo ynskti ikki at bjóða. Sp/f. PB Consult hevur gjørt vart við, at teir vegna feriu ikki varnaðust útbjóðingina fyrr enn eftir svarfreistina, og hava biðið um at útseta svarfreistina.

Í útbjóðingarbrævinum varð víst á, at fylgjandi viðurskiftir verða tikin við í metingini av einstaka tilboðnum. Vektingin er líka deild yvir øll punktini:

- Samsýning fyri ráðgevingina
- Bygnaður av virki ráðgevans á hesi uppgávu
- Royndir og førleikar hjá virki og prosjektverkfrøðingi og øðrum persónum

Hesi tilboð eru komin inn:

| **Berandi konstruktiónir** | **P/f. LBF** | **P/f. HMP** |
|---|---|---|
| 1. Ráðgeving | kr. 945.355 | kr. 500.000 |
| 2. Fakeftirlit | kr. 204.100 | kr. 200.000 |

| | | |
|---|---|---|
| **Samanlagt** | **kr. 1.149.455** | **kr. 700.000** |
| | | |
| Fyrivarni | Byggitíð 18 mðr. | |

| **EL** | **P/f. LBF** | **Sp/f. K.J. El-ráð** |
|---|---|---|
| 1. Ráðgeving | kr. 397.396 | kr. 396.000 |
| 2. Fakeftirlit | kr. 115.000 | kr. 118.000 |
| **Samanlagt** | **kr. 512.396** | **kr. 514.000** |

| **HVS** | **P/f. SMJ** |
|---|---|
| 1. Ráðgeving | kr. 649.400 |
| 2. Fakeftirlit | kr. 347.500 |
| **Samanlagt** | **kr. 996.900** |
| | |
| Fyrivarni | Byggitíð 12 mðr. |

Við støði í heildarmeting mæla trivnaðarstjórin og tekniski stjórin til at geva umsitingini heimild at fara í samráðingar og gera sáttmála við:

- P/f. HMP um ráðgeving og fakeftirlit viðvíkjandi berandi konstruktiónum
- P/f. LBF um ráðgeving og fakeftirlit viðvíkjandi EL
- P/f. SMJ um ráðgeving og fakeftirlit viðvíkjandi HVS

<u>Fígging</u>:
Lægstu tilboðini fyri ávikavist høvuðsráðgeving og undirráðgeving eru í alt kr. kr. 5.310.796 v/mvg. Harumframt skal roknast við kr. 100.000 til innanhýsis prosjektumsiting og kr. 100.000 til útlegg og ókent.

Samlaður fíggjartørvur til prosjektering er sostatt kr. 5.515.796 v/mvg. Játtaðar eru kr. 3.800.000 til prosjektering, tvs., at tørvur er á írestandi fígging kr. 1.715.796.

**Ískoyti:**
Bygginevndin viðgjørdi málið á fundi 27. oktober 2011. Ein meiriluti í bygginevndini, Jógvan Arge, Annfinn Brekkstein, Jóan Petur Hentze og Heri Olsen, heitir á mentamálanevndina um at útvega írestandi fíggingina til prosjektering vísandi til, at tilboðini fyri prosjekteringina samanlaggt eru uml. kr. 1.650.000 hægri enn játtaða upphæddin.

Somuleiðis verður mælt til, at umsitingin fær heimild at fara í samráðingar og gera sáttmála við teir í ískoytinum nevndu ráðgevarar.

Jákup Egholm Hansen boðaði frá, at hann er ikki partur av tilmælinum vísandi til, at hann í skrivi til borgarstjóran 7. oktober 2011 hevur biðið um at verða loystur úr bygginevndini.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælunum hjá bygginevndini um at útvega írestandi fíggingina til prosjektering, og at umsitingin fær heimild at fara í samráðingar og gera sáttmála við nevndu ráðgevarar.

**Mentamálanevndin 27. oktober 2011:** Nevndin samtykti at heita á bygginevndina um sum fyrsta stig nú at útvega ummæli/loyvi frá skógfriðingarnevndini til byggiætlanina í Sortudíki at leggja fyri nevndina aftur sum skjótast.

**Ískoyti:**
Kommunan sendi áheitan til skógfriðingarnevndina um viðmerkingar til ætlanina at byggja musikkskúla í Sortudíki. Skógfriðingarnevndin ger í svari vart við, at talan er um óhepna gongd, um opna, grøna lendið millum Norðurlandahúsið og Sundsvegin so við og við verður umskipað til bygt øki. Skógfriðingarnevndin vísir á jaliga týdningin í býarskipanarligum høpi av at varðveita grøna geiran úr Gundadali, um Sortudíki og Ternurygg niðan í Hoydalarnar. Skógfriðingarnevndin mælir kommununi at skipa økið t.d. millum Berjabrekku, Norðara ringveg, Villingardalsvegin og Sundsvegin í serstakari byggisamtykt, áðrenn støða verður tikin til staðseting av nýggjum Musikkskúlabygningi. Skógfriðingarnevndin sendi svarið til yvirfriðingarnevndina.

Eftir samskifti við yvirfriðingarnevndina hevur kommunan sent náttúrúfriðingarnevndini fyri Streymoyar sýslu formliga áheitan um frávik frá § 2, stk. 2 punkt 2) í náttúrufriðingarlógini, har byggjast skal nærri enn 300 m frá teimum viðalundum, ið Føroya viðalundanevnd hevur um hendi. Víst varð í hesum sambandi m.a. á, at sambært góðkendu almennu byggisamtyktini er talan um C2 øki, har aðrar útbyggingar hava verið í sama øki, uttan at viðurskifti, sum hava týdning í mun til náttúrufriðingarlógina, hava verið umrødd í sambandi við hesi byggimálini. Talan er serliga um Norðurlandahúsið og Kringvarpið.

Náttúrufriðingarnevndin fyri Streymoyar sýslu og Yvirfriðingarnevndin hava nú svarað áheitanini játtandi. Í gerðabók Streymoyar Sýslu Náttúrufriðingarnevnd frá fundi 25. juni 2012 stendur m.a.:

"Nevndin viðgjørdi málið og er samd um at viðmæla umsóknini og at gera frávik frá § 2, stk. 2 nr. 2. Á økinum standa frammanundan Norðurlandahúsið og Kringvarp Føroya, og eru fleiri útbyggingar gjørdar síðan ta upprunaligu byggingina av hesum bygningum.

Mett var tí, at placeringin av einum Musikkskúla á sama øki var ein natúrligur partur av ætlanini hjá Tórshavnar Kommunu, og vil Náttúrufriðingarnevndin fyri Streymoyar Sýslu tí geva sítt loyvi til nevndu bygging.

Nevndin metti heldur ikki, at henda bygging kom at gera nakað inntriv í opna grøna lendið frá Boðanesi um Hoydalar, Ternurygg og niðan til nýggja sambindingarvegin undir Vatnaskørðum, sum Skógfriðingarnevndin vil vera við. Bygningurin kemur ikki at skemma í náttúruni, tvørturímóti er hetta ein sera nútímans og snotiligur bygningur, sum kemur at prýða um í landslagnum."

Á fundi 26. juni 2012 staðfesti Yvirfriðingarnevndin avgerðina hjá Náttúrufriðingar-nevndini fyri Streymoyar Sýslu við tí fyrivarni, at "... der ikke modtages anke inden ankefristens udløb den 24. juli 2012.

Mett verður, at málið og tilmælið, sum varð lagt fyri mentamálanevndina 27. oktober 2011, um at útvega írestandi fíggingina til prosjektering, og at umsitingin fær heimild at fara í samráðingar og gera sáttmála við omanfyri nevndu ráðgevarar tí kann takast upp aftur til støðutakan.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, vísandi til tilmæli til fund í mentamálanevndini 27. oktober 2011, at útvega írestandi fíggingina til prosjektering v.m. og játta kr. 1.715.796,- av kontu 5175 Musikkskúlin (Løgujáttan), og at umsitingin fær heimild at fara í samráðingar og gera sáttmála við nevndu ráðgevar.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012**: Einmælt samtykt.

**Bygginevndin og mentamálanevndin 15. januar 2013:** Skipanaruppskotið framlagt. Heitt verður á ráðgevararnar um at fáa kannað undirlendið og fáa til vega neyvari kostnaðarmeting av planeringini sum skjótast. Bygningurin í skipanaruppskotinum er størri enn í byggiskránni, eins og kostnaðurin hægri. Biðið verður um lýsing av, hvør munurin er.

**Fíggjarnevndin 16. januar 2013:** Útsett.

Nevndarlimur hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Tekniska nevnd 27. februar 2013: Útsett.**

**Tekniska nevnd 18. mars 2013: Málið umrøtt.**

**Ískoyti:**
Kontrast hevur latið gera nýggja kostnaðarmeting av handverkaraútreiðslunum. Hildið verður fast við fermetratalið 2.163 í gólvvídd til tess ikki at fáa ov smá undirvísingarhøli. Hinvegin er staðfest ikki neyðugt við sjálvvirkandi brandávaringarskipan (ABA), sum gevur eina sparing uppá kr. 500.000. Aðrar sparingar eru eisini.

Graviroyndirnar hava staðfest ein eykakostnað til grevstur og fyllu uppá kr. 2.500.000 treytað av, at grót verður fingið til vega uttan kostnað. Harumframt er eykakostnaður fyri skifer klæðing kr. 1.800.000.

Handverkaraútreiðslurnar sambært nýggju kostnaðarmetingini eru kr. 42.650.000 íroknað 12% óvist. Hetta skal samanberast við, at kostnaðarmetingin frá 2011 roknaði við kr. 41.800.000. Við eykakostnaðinum fyri grevstur og fyllu og skifer klæðing verða samlaðu handverkaraútreiðslurnar kr. 46.949.040.

Á fundi 11. mars 2013 samtykti bygginevndin at mæla til, at prosjekteringsarbeiðið heldur fram innanfyri karmin í nýggju kostnaðarmetingini uppá kr. 46.949.040.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Samtykt at heita á bygginevndina um sum skjótast at nágreina, við atliti til at byggjast skal fyri í mesta lagi 55 mió. kr.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur havt fund 3. juni 2013, har tillagað skipanaruppskot dagfest 31. mai 2013 varð viðgjørt.

Við støði í samtyktini hjá mentamálanevndini fingu ráðgevararnir boð um eitt tillagað skipanaruppskot fyri upphædd í mesta lagi kr. 39 mió í handverkaraútreiðslum. Bygginevndin varð síðan gjørd varug við, at handverkaraútreiðslurnar sambært ráðgevaraavtaluni er kr. 41,8 mió.

Bygginevndin hevur um tpost 17.-18 mai 2013 viðgjørt støðuna og avgjørt at biðja um eitt tillagað skipanaruppskot fyri upphæddina samsvarandi ráðgevaraavtaluni kr. 41,8 mió í handverkaraútreiðslum.

Sambært skipanaruppskotinum, har støðið er ein bygging uppá 2.042 bruttofermetrar, verða handverkaraútreiðslurnar kr. 41,6 mió íroknað eyka grevstur og fylling, kravd parkeringspláss og skiferklædning av eternit. Ráðgevin kannar loysn við eternit-skifer nærri.

Gjørd er sparing á leið kr. 700.000 í mun til einari optimalari akustik-loysn. Bygginevndin viðmerkti í hesum sambandi, at ein musikkskúli skal hava optimal ljóðviðurskifti, og at ráðgevin í víðari prosjekteringini tekur hædd fyri hesum.

Bygginevndin samtykti skipanaruppskotið at fara víðari til forprosjektering og at senda mentamálanevndini uppskotið til góðkenningar.

**Mentamálanevndin 5. juni 2013:** Nevndin samtykti at góðkenna skipanaruppskotið.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur á fundi 7. oktober 2013 viðgjørt ymsar spurningar, sum ráðgevararnir og tekniska fyrisitingin hava umrøtt í sambandi við prosjekteringsarbeiðið, og sum hava týdning at fáa avklárað tekniskt og fíggjarliga.

Spurningur er um staðseting av skúlanum á økinum, herundir um skipan av vegatkomu frá Sundsvegnum og parkeringsplássinum eisini við atliti at parkeringsplássinum hjá Norðurlandahúsinum, og yvirflatuvatnviðurskifti, har tað er umráðandi at taka hædd fyri, at stórar nøgdir av vatni fara tvørtur ígjøgnum byggiøkið til skúlan.

Í hesum sambandi verður mett fyrimunur fyri verkætlanina, at ognin matr.nr. 1453b verður keypt og tikin niður. Hetta gevur møguleika at flyta part av skúlanum av ánni og alla bygginginа longur burtur frá Norðurlandahúsinum, og at skipa vegatkomu og parkeringsplássið betri eisini við atliti at dagføringini av Sundsvegnum annars.

Bygginevndin samtykti at beina spurningin um møguleikan, at kommunan ognar sær nevndu ogn og at leggja grundøkið aftrat byggiverkætlanini til Musikkskúlan, til mentamálanevndina at taka støðu til.

**Mentamálanevndin 9. oktober 2013:** Nevndin samtykti at taka málið uppaftur á næsta fundi. Til fundin skal fyriliggja neyv útgreining av avleiðingum og kostnaði v.m., um ognin ikki verður keypt.

**Mentamálanevndin 21. oktober 2013:** Útsett til næsta fund.

**Bygginevndin 31. oktober 2013:** Umsitingin hevur gjørt nýggja kostnaðarmeting grundað á innkomna prosjektuppskotið. Staðfestast kann, at munandi príshækkingar eru í handverkaraútreiðslunum.

Ráðgevin hevur eisini lýst fyrimunir og vansar við atliti til ferðslu, parkering og skipan av økinum. Bygginevndin staðfestir, at ein loysn, har ognin matr. nr. 1453b verður keypt at taka niður, er frá einum fakligum sjónarmiði best fyri samlaðu loysnina.

Av tí at kostnaðurin er omanfyri ásetta fíggjarkarmin, beinir bygginevndin málið í mentamálanevndina at taka støðu til nýggju kostnaðarmetingarnar, hvør loysn til skipan av økinum skal veljast, og til val av tilfari til klædning.

Eisini skal støða takast til, um framhald av prosjekteringini fyribils skal bíða, til politiska viðgerðin av omanfyri standandi er avgreidd.

**Mentamálanevndin 6. november 2013:** Bogi Andreasen var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

Jákup Egholm Hansen, tekniski stjórin, gjøgnumgekk nýggju kostnaðarmetingina hjá bygginevndini.

Niðurstøðan varð at málið eigur at fáa eina skjóta politiska viðgerð.

**Mentamálanevndin 10. desember 2013:** Samtykt at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at hækka íløgukarmin til handverkaraútreiðslur til 48,6 mió samsvarandi kostnaðarmeting dagfest 25. oktober 2013 og bjóða arbeiðið út, tá forprosjekt fyriliggur.

**Fíggjarnevndin 11. desember 2013:** Samtykt at hækka íløgukarmin til samanlagt kr. 67,125 mió. (handverkaraútreiðslur í mesta lagi kr. 48,6 mió.) og at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión í fakentreprisu, tá høvuðsprosjekt fyriliggur og at beina málið í býráðið.

**Býráðið fyri læstum hurðum 12. desember 2013:** Einmælt samtykt.

- Nevndarlimur ynskir málið á skrá.

**Mentamálanevndin 6. mars 2014:** Málið varð umrøtt.

Sigrun Mohr var ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Málið um staðseting av Musikkskúlanum verður tikið upp til nýggja viðgerð. Víst er á aðrar staðsetingarmøguleikar í Havn enn í Sortudíki, eisini við í størstan mun at brúka verandi prosjekt.

**Mentamálanevndin 22. mai 2014:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Bogi Andreasen, heitir á býráðið um at broyta staðsetingina av Musikkskúlanum til Landavegin, matr.nr. 917.

Ein minniluti, Jógvan Arge og Halla Samuelsen, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Atkvøtt varð um broytingaruppskot frá Jógvan Arge, um at býráðið samtykkir at staðfesta ta staðseting, sum býráðið áður hevur samtykt fyri musikkskúlan, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Rúni Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, og Heðin Mortensen

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli í mentamálanevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ráðgevin hevur arbeitt við nýggju staðsetingini av Musikkskúlanum á matr. nr. 917, og við atkomuviðurskiftum og parkering. Uppskot verður lagt fyri nevndina til viðgerðar.

Staðsetingin reisir spurningar um fígging av vegagerðini í samband við bygningina.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Útsett.

**Ískoyti:**
Bygginevndin fyri nýggjum Musikkskúla hevur á fundi 19. juni 2014 viðgjørt uppskot til disponering av grundøkinum, herundir atkomuviðurskifti bæði til sjálvan skúlan og víðari til aðra bygging í økinum seinni (ítróttarhøll og fólkaskúli), parkering og staðseting av sjálvum bygninginum.

Nevndin tekur í høvuðsheitum undir við uppskotinum til staðseting og økisdisponering. Nevndin viðmerkir, at í mun til vegatkomu til bygningin skal tryggjast, at nokk av plássi er til at byggja ítróttahøll á grannastykkinum omanfyri. Í mun til vindviðurskifti varð møguleikin, at snara bygningin nakað, nevndur, ella at hetta verður loyst á annan hátt við teirri staðseting, bygningurin sambært uppskotinum nú hevur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til prinsippiella góðkenning av staðsetingini, atkomu- og parkeringsviðurskiftunum og skipan av økinum annars.

**Tekniska nevnd 23. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Gjørt er uppskot til fyribils vegatkomu frá Landavegnum sum alternativ til endaligu atkomuna frá Hans Andriasar gøtu, sum bygginevndin á undanfarna fundi samtykti, og sum tekniska nevnd hevur samtykt 23. juni 2014. Í hesum liggur, at endaliga vegatkoman til alt økið, har komandi Vesturskúli eisini skal byggjast, er verkætlan fyri seg. Bygginevndin var samd um at gera fyribils atkomuveg til musikkskúlan frá Landavegnum nú, og at endalig vegaføring ikki er við í hesi verkætlan.

**Ferðslunevndin 18. september 2014:** Útsett.

**Ferðslunevndin 26. september 2014:** Uppskotið frá bygginevndini var umrøtt. Mett verður at tað er neyðugt at fáa útvegað ítøkiligari upplýsingar, at leggja fyri nevndina aftur, um virksemið á økinum og hvat tað viðførir av ferðslutrýsti, soleiðis at ein meting kann gerast av

ferðslutekniskum loysnum fyri alt økið kring skúladepilin sambært framskrivaðum ferðsluútrokningum.

Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 8. oktober 2014:** Kunnað varð um málið. Málið verður tikið uppaftur á næsta fundi.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevnd 22. oktober 2014:** Borgarstjórin greiddi frá málinum.

**Ferðslunevndin 28. oktober 2014:** Vísandi til væntað økt ferðslutrýst á økinum m.a. við Landavegin, mælir ferðslunevndin til at taka undir við ætlanini hjá bygginevndini fyri musikkskúlan sum eina fyribilsloysn. Nevndin vísir tó á, at ein endalig loysn á ferðsluviðurskiftunum kring musikkskúlan eigur at verða gjørd við atliti til øki til busslummar á Landavegnum, áðrenn miðnámsskúlin í Marknagili verður tikin í nýtslu.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur í samtykt 22. oktober 2014 at mæla mentamálanevndini til at taka uppaftur áður gjørda samtykt um útbjóðingarhátt, so at arbeiðið verður boðið út í høvuðsentreprisu.

**Tilmæli:**
Tekniska fyrisiting mælir til at bjóða arbeiðið út í innbodnaðari høvuðsarbeiðstøku.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við ferðslunevndini.

**Tekniska nevnd 5. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 05. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá teknisku fyrisiting at bjóða arbeiðið út í innbodnaðari høvuðsarbeiðstøku og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 12. november 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsarbeiðstøku og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 20. november 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Bygginevndin fyri nýggjum Musikkskúla hevur á fundi 30. mars 2015 mælt til, at hesir 6 verða bodnir inn til heildararbeiðstøku:

1. Articon
2. J & K Petersen
3. Búsetur
4. Húsavarðatænastan
5. TG-Verk
6. MT Højgaard

og at beina málið í mentamálanevndina.

**Mentamálanevndin 07. april 2015:** Samtykt at taka undir við ískoytinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. maj 2015:** Samykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Bygginevndin fyri nýggjum musikkskúla hevur umbiðið broytt prosjekt til tess at bøta um teir manglar, sum mett var, at upprunaprosjektið hevði í mun til orkesturhølið, umsiting v.m.

Ráðgevin hevur latið gera uppskot til broytt prosjekt, har orkesturhølið er vaksið við 226 bruttofermetrum og høvuðsbygningurin við 210 bruttofermetrum, samlað øking 436 bruttofermetrar. Sambært uppskotinum er samlaða byggingin 2.599 bruttofermetrar.

Orkesturhølið er víðkað og broytt, so at pallplássið er 9x18 m umframt aðrar backstage hentleikar. Orkesturhølið rúmar nú uml. 348 áhoyrarum.

Tidnan í høvuðsbygningingum er gjørd størri, somuleiðis skarðið. Hetta gevur størri høli til umsiting og lærarar á báðum hæddum og omaná tidnuni, rúmligari inngongdir og foyer. Eisini goymslurnar gerast fleiri.

Sambært kostnaðarmeting verða HVÚ kr. XX mió.

Bygginevndin hevur á fundi 9. mars 2016 samtykt at bjóða dagførda projektið út í høvuðsarbeiðstøku og at hækka íløgukarmin fyri HVÚ til kr. XX mió.

**Mentamálanevndin 16. mars 2016:** Samtykt at taka undir við bygginevndini og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur fyri læstum hurðum 17. mars 2016:** Einmælt samtykt

**Býráðsfundur 17. mars 2016:** Kunna varð um, at býráðið fyri læstum hurðum einmælt hevði samtykt at bjóða projekti út í høvuðsarbeiðstøku við ásettum íløgukarmi.

**Mentamálanevndin 10. april 2014:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**

Málið um staðseting av Musikkskúlanum verður tikið upp til nýggja viðgerð. Víst er á aðrar staðsetingarmøguleikar í Havn enn í Sortudíki, eisini við í størstan mun at brúka verandi prosjekt.

**Mentamálanevndin 22. mai 2014:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Bogi Andreasen, heitir á býráðið um at broyta staðsetingina av Musikkskúlanum til Landavegin, matr.nr. 917.

Ein minniluti, Jógvan Arge og Halla Samuelsen, tekur støðu á býráðsfundi.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Atkvøtt varð um broytingaruppskot frá Jógvan Arge, um at býráðið samtykkir at staðfesta ta staðseting, sum býráðið áður hevur samtykt fyri musikkskúlan, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 8 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Rúni Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, og Heðin Mortensen

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli í mentamálanevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ráðgevin hevur arbeitt við nýggju staðsetingini av Musikkskúlanum á matr. nr. 917, og við atkomuviðurskiftum og parkering. Uppskot verður lagt fyri nevndina til viðgerðar.

Staðsetingin reisir spurningar um fígging av vegagerðini í samband við bygingina.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Útsett.

**Ískoyti:**
Bygginevndin fyri nýggjum Musikkskúla hevur á fundi 19. juni 2014 viðgjørt uppskot til disponering av grundøkinum, herundir atkomuviðurskifti bæði til sjálvan skúlan og víðari til aðra bygging í økinum seinni (ítróttarhøll og fólkaskúli), parkering og staðseting av sjálvum bygninginum.

Nevndin tekur í høvuðsheitum undir við uppskotinum til staðseting og økisdisponering. Nevndin viðmerkir, at í mun til vegatkomu til bygningin skal tryggjast, at nokk av plássi er til at byggja ítróttahøll á grannastykkinum omanfyri. Í mun til vindviðurskifti varð møguleikin, at snara bygningin nakað, nevndur, ella at hetta verður loyst á annan hátt við teirri staðseting, bygningurin sambært uppskotinum nú hevur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til prinsippiella góðkenning av staðsetingini, atkomu- og parkeringsviðurskiftunum og skipan av økinum annars.

**Tekniska nevnd 23. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Gjørt er uppskot til fyribils vegatkomu frá Landavegnum sum alternativ til endaligu atkomuna frá Hans Andriasar gøtu, sum bygginevndin á undanfarna fundi samtykti, og sum tekniska nevnd hevur samtykt 23. juni 2014. Í hesum liggur, at endaliga vegatkoman til alt økið, har

komandi Vesturskúli eisini skal byggjast, er verkætlan fyri seg. Bygginevndin var samd um at gera fyribils atkomuveg til musikkskúlan frá Landavegnum nú, og at endalig vegaføring ikki er við í hesi verkætlan.

**Ferðslunevndin 18. september 2014:** Útsett.

**Ferðslunevndin 26. september 2014:** Uppskotið frá bygginevndini var umrøtt. Mett verður at tað er neyðugt at fáa útvegað ítøkiligari upplýsingar, at leggja fyri nevndina aftur, um virksemið á økinum og hvat tað viðførir av ferðslutrýsti, soleiðis at ein meting kann gerast av ferðslutekniskum loysnum fyri alt økið kring skúladepilin sambært framskrivaðum ferðsluútrokningum.

Kunnað verður um málið.

**Tekniska nevnd 8. oktober 2014:** Kunnað varð um málið. Málið verður tikið uppaftur á næsta fundi.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevnd 22. oktober 2014:** Borgarstjórin greiddi frá málinum.

**Ferðslunevndin 28. oktober 2014:** Vísandi til væntað økt ferðslutrýst á økinum m.a. við Landavegin, mælir ferðslunevndin til at taka undir við ætlanini hjá bygginevndini fyri musikkskúlan sum eina fyribilsloysn. Nevndin vísir tó á, at ein endalig loysn á ferðsluviðurskiftunum kring musikkskúlan eigur at verða gjørd við atliti til øki til busslummar á Landavegnum, áðrenn miðnámsskúlin í Marknagili verður tikin í nýtslu.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur í samtykt 22. oktober 2014 at mæla mentamálanevndini til at taka uppaftur áður gjørda samtykt um útbjóðingarhátt, so at arbeiðið verður boðið út í høvuðsentreprisu.

**Tilmæli:**
Tekniska fyrisiting mælir til at bjóða arbeiðið út í innbodnaðari høvuðsarbeiðstøku.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við ferðslunevndini.

**Tekniska nevnd 5. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Mentamálanevndin 05. november 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá teknisku fyrisiting at bjóða arbeiðið út í innbodnaðari høvuðsarbeiðstøku og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 12. november 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsarbeiðstøku og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 20. november 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Bygginevndin fyri nýggjum Musikkskúla hevur á fundi 30. mars 2015 mælt til, at hesir 6 verða bodnir inn til heildararbeiðstøku:

7. Articon
8. J & K Petersen
9. Búsetur
10. Húsavarðatænastan
11. TG-Verk
12. MT Højgaard

og at beina málið í mentamálanevndina.

**Mentamálanevndin 07. april 2015:** Samtykt at taka undir við ískoytinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. maj 2015:** Samykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Bygginevndin fyri nýggjum musikkskúla hevur umbiðið broytt prosjekt til tess at bøta um teir manglar, sum mett var, at upprunaprosjektið hevði í mun til orkesturhølið, umsiting v.m.

Ráðgevin hevur latið gera uppskot til broytt prosjekt, har orkesturhølið er vaksið við 226 bruttofermetrum og høvuðsbygningurin við 210 bruttofermetrum, samlað øking 436 bruttofermetrar. Sambært uppskotinum er samlaða byggingin 2.599 bruttofermetrar.

Orkesturhølið er víðkað og broytt, so at pallplássið er 9x18 m umframt aðrar backstage hentleikar. Orkesturhølið rúmar nú uml. 348 áhoyrarum.

Tidnan í høvuðsbygningingum er gjørd størri, somuleiðis skarðið. Hetta gevur størri høli til umsiting og lærarar á báðum hæddum og omaná tidnuni, rúmligari inngongdir og foyer. Eisini goymslurnar gerast fleiri.

Sambært kostnaðarmeting verða HVÚ kr. XX mió.

Bygginevndin hevur á fundi 9. mars 2016 samtykt at bjóða dagførda projektið út í høvuðsarbeiðstøku og at hækka íløgukarmin fyri HVÚ til kr. XX mió.

**Mentamálanevndin 16. mars 2016:** Samtykt at taka undir við bygginevndini og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.
**Ískoyti:**
**Útbjóðing av Musikkskúlanum.**

Annfinn Brekkstein bað um at fáa málið á skrá við atliti til at loyva fyritøkuni Sp/f Eysturlon at luttaka í sambandi við, at ætlanin er at bjóða arbeiðið at byggja Musikkskúlan út.

**Býráðsfundur 23. august 2016:** Samtykt at taka undir við, at Sp/f Eysturlon kann bjóða upp á arbeiðið at byggja Musikkskúlan, treytað av, at umsitingin metir fyritøkuna vera føra fyri átaka sær arbeiðið.

**Ískoyti**
Samtyktar játtanir inn á løgujáttanina L51002 í alt síðan 2009 eru kr. 6.216.000. Bókað nýtsla hesi árini pr. ultimo oktober 2016 er kr. 7.535.661, ið gevur eina meirnýtslu uppá kr. 1.334.830. Harumframt skal roknast projektumsiting kr. 40.000, samlað kr. 1.374.830. Meirnýtslan verður at fíggja av løgukarminum 5175 Musikkskúlin, har játtan er tøk.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 1.400.000 av løgukarminum 5175 Musikkskúlin til løgukontu L51002 Musikkskúlin útvegan av hølum.

**Mentamálanevndin 24. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina

**Fíggjarnevndin 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Hin 25. november 2016 var lisitatión fyri byggingini av nýggjum musikkskúla. Sjey fyritøkur vórðu bodnar at bjóða, og inn komu fimm tilboð. Úrslitið av lisitatiónini var hetta:

| | |
|---|---|
| Húsavarðatænastan | kr. 63.881.746,54 |
| MT Højgaard | kr. 68.412.026 |
| Búsetur | kr. 69.902.472 |
| TG Verk | kr. 72.999.193 |
| J&K Petersen/Eysturlon | kr. 76.898.007 |

Kostnaðarmetingin ljóðaði uppá kr. 60.000.000. Talan er um handverkaraútreiðslur (HVÚ).

Kontrast og ráðgevaratoymið hava eftirmett tilboðini. Øll tilboð lúka útboðstreytirnar. Niðurstøðan er, at samanumtikið fyri øll fak er tilboðið hjá Húsavarðatænastuni, sum hevði lægsta tilboð, sera gott. Mælt verður til, at sáttmálasamráðingar verða við Húsavarðatænastuna.

Byggitíðarskeiðið er ætlandi 21 mðr.

Bygginevndin hevur á fundi 5. desember 2016 einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá ráðgevanum og at beina málið í mentamálanevndina.

Fyrisitingin viðmerkir, at fígging til at byggja musikkskúlan er ikki tøk í íløgujáttanini. Mett verður, at til ber ikki at fara í ítøkiligar sáttmálasamráðingar um arbeiðstøku á hesum

grundarlagi. Kannað eigur at verða, um lægsti tilboðsgevi Húsavarðatænatan vil standa við tilboðið til fíggingin er avklárað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at útvega samlaða fígging til byggiverkætlanina fyrst, áðrenn farið verður undir sáttmálasamráðingar við lægsta tilboðsgeva Húsavarðatænastan.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Nevndin samtykti at fara undir sáttmálasamráðingar við lægsta tilboðsgevaran og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at fara undir sáttmálasamráðingar við lægsta tilboðsgevaran, og samstundis vísir fíggjarnevndin á samtyktina um meirinntøkur í sambandi við figgjarætlanina 2017.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Boga Andreasen, um at útvega samlaða fígging til byggiverkætlanina fyrst, áðrenn farið verður undir sáttmálasamráðingar við lægsta tilboðsgeva Húsavarðatænastan, ið fall við einari atkvøðu fyri og og 9 ímóti.

Fyri atkvøddi:
Bogi Andreasen.

Ímóti atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein og Jógvan Arge.

Greiddu ikki atkvøðu:
Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Síðan varð atkvøtt tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð einmæltsamtykt.

**Ískoyti**:
Mælt verður til at skipa bygginevndina fyri nýggjum musikkskúla samsvarandi vanligu mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur tveir limir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at velja tveir limir í bygginevndina til musikkskúlan.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Marin Katrina Frídal og Heðin Mortensen.

# 82/17 Víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 16.06.2014 | 28/14 | 14/00896-7 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.06.2014 | 166/14 | 14/00896-7 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 139/14 | 14/00896-7 |
| 4 Vinnunevndin | 12.01.2015 | 3/15 | 14/00896-7 |
| 5 Vinnunevndin | 20.01.2015 | 4/15 | 14/00896-7 |
| 6 Fíggjarnevndin | 21.01.2015 | 24/15 | 14/00896-7 |
| 7 Býráðsfundur | 29.01.2015 | 18/15 | 14/00896-7 |
| 8 Vinnunevndin | 20.04.2015 | 11/15 | 14/00896-7 |
| 9 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 72/15 | 14/00896-7 |
| 10 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 29.04.2015 | 35/15 | 14/00896-7 |
| 11 Vinnunevndin | 18.05.2015 | 12/15 | 14/00896-7 |
| 12 Vinnunevndin | 24.09.2015 | 29/15 | 14/00896-7 |
| 13 Vinnunevndin | 12.10.2015 | 36/15 | 14/00896-7 |
| 14 Vinnunevndin | 14.10.2015 | 37/15 | 14/00896-7 |
| 15 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 249/15 | 14/00896-7 |
| 16 Býráðsfundur | 29.10.2015 | 180/15 | 14/00896-7 |
| 17 Vinnunevndin | 17.12.2015 | 48/15 | 14/00896-7 |
| 18 Vinnunevndin | 29.12.2015 | 49/15 | 14/00896-7 |
| 19 Vinnunevndin | 07.03.2016 | 8/16 | 14/00896-7 |
| 20 Vinnunevndin | 01.08.2016 | 27/16 | 14/00896-7 |
| 21 Fíggjarnevndin | 04.08.2016 | 252/16 | 14/00896-7 |
| 22 Býráðsfundur | 04.08.2016 | 196/16 | 14/00896-7 |
| 23 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 393/16 | 14/00896-7 |
| 24 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 82/17 | 14/00896-7 |

## Málslýsing:

**Víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki.**
Seinasta stóra havnaútbyggingin í Tórshavn, var liðug í 1997, tá tann uttasti parturin av molanum varð breiðkaður. Hendan útbyggingin bleiv gjørd í tøkum tíma, tí bingjuflutningurin er støðugt vaksin síðani.

Síðani útbyggingina í Tórshavn í 1997, er havnarlagið í Kollafirði munandi útbygt. Útbyggingarnar í Kollafirði og á Oyrareingjum hava skapt nógv virksemi. Tørvurin á størri útbyggingum er ikki akuttur í løtuni, men hann kann vísa seg seinni.

Undantikið tað, sum verður uppskipað á Oyrareingjum, kemur allur innflutningur til Føroyar, sum kemur við bingjum og trailarum, um bryggjuna í Tórshavn. At bingjuhavnin liggur í Tórshavn ger, at flutningurin til nógv tann størsta partin av forbrúkarunum er stuttur.

Verðandi umstøður á Eystaru bryggju eru langt frá optimalar, tí:

- **Dýpið fram við Eystara mola og innsiglingin er ov lítið**. Hetta viðførir at tá verðandi bingjuskip liggja við bryggju, er neyðugt at leggja fendarar millum skipið og bryggjuna. Hetta er ikki nøktandi, og ger tað ómøguligt at fáa størri bingjuskip til bryggju, enn tey verðandi.

Alt fleiri ferðamannaskip, sum sigla á okkara leiðum, kunnu ikki koma til bryggju, tí dýpið er ov lítið.
- **Kajplássið, serliga um summarið, er sera avmarkað.** Hetta merkir at vit ikki kunnu avgreiða ferðamannaskipini og bingjuskipini samstundis, og tað er ómøgulig at vaksa um møguligt annað virksemi.
- **Økið til bingjur og trailarar er ov lítið.** At økið til bingjur og trailarar er ov lítið, viðførir at arbeiðsgongdin ikki er nøktandi og tað blíva alt ov nógvar flytingar.
- **Økið til pakkhús o.a. er ov lítið.** Fyri ikki at minka um verðandi bingjuøki, ber ikki til at byggja goymslubygningar o.a. sum tørvur er á til havnavirksemið.
- **Økið til avgreiðslu av ferðafólki og bilum er ov lítið.** Tað er ov lítið pláss at avgreiða ferðafólk og bilar, serliga um summarið. Ein víðkan av havnaøkinum, hevði gjørt tað møguligt at umskipa økið rundan um farstøðina, soleiðis at betri pláss var til tey ferðandi.

Einasti møguleiki at betra munandi um umstøðurnar á Eystaru bryggu í Tórshavn, er at leingja molan á Skansabryggjuni, og at víðka verðandi øki suðureftir og eystureftir.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum:** Mælt verður til:
- at býráðið velur 2 býráðslimir í bygginevndina
- at bygginevndin ger byggiprogram.
- beinanvegin at seta í verk árinskanning, hydrauliskar kanningar og at fáa til vega neyðug loyvir.
- at kanningar og fyrireikingar, upp til 3 mió. verða goldnar av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn.

**Vinnunevndin 30. mai 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 30. mai 2013:** Einmælt samtykt at taka undir við vinnunevndini.

**Býráðið fyri læstum hurðum 30. mai 2013:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at beina málið í teknisku nevnd, ið fall við einari atkvøðu fyri og 9 ímóti.

Fyri atkvøddi: Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Elin Lindenskov, Hela Dam á Neystabø og Jákup Dam

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.
Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Elin Lindenskov, Hela Dam á Neystabø og Jákup Dam

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal

At enda varð atkvøtt um tilmæli frá Heðin Mortensen, um at velja Sjúrður Olsen og Tróndur Sigurdsson í bygginevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Jákup Dam.

Greiddu ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal og Elin Lindenskov.

**Bygginevndin hevur havt 10 fundir, og hevur hesar viðmerkingar:**

**Grótbrot:** Grótið til uppfyllingina, sum er umleið 80.000 $m^2$ verður tikið á sama stað sum til seinastu havnaútbyggingina, við at víðka verðandi grótbrot á Glyvursnesi suðureftir.
Yvirfriðingarnevndin hevur góðkent, at grótbrotið verður víðkað.
Avtala um gróttøku er ikki gjørd við Búnaðarstovuna enn.

**Aldusimuleringar:** DHI hevur gjørt aldusimuleringar av, hvussu kyrt tað verður í tí nýggju- og verðandi havnini , tá útbyggingin er liðug. Kanningarnar vísa, at kyrran í tí nýggju havnini verður umleið tann sama, sum tað er í verðandi havn í dag. Kanningin vísir eisini, at aftan á ýtbyggingina, verður tað munandi kyrrari í verðandi havn.
Útbyggingin hevur eisini ein positiva ávirkan á Álaker og Argir, serliga á landnyrðingi.

**Grótkast:** Fyri at kunna taka støðu til hvussu sjálvt grótkastið skal byggjast , eru ávegis kanningar gjørdar hjá DHI.
Ávegis kanningarnar vísa, at tann norðari parturin av grótkastinum skal vera nakað hægri enn verðandi moli.
Fyri at fáa endaliga staðfest, hvussu uppbyggingin av molanum skal verða, er neyðugt at gera eina modelroynd, sum verður liðug í september 2014.

**Sandagerð:** Kanningar vísa, at útbyggingin ikki hevur nevniverduga ávirkan á sandin í Sandágerði.

**Havnalagið:** Fyri at fáa skapið á havnalagnum at hóska so væl til landslagið sum til ber, er nógv orka, saman við arkitekti, brúkt upp á at fáa tað rætta skapið.
Uppskotið er ein samlað víðkan av havnalagnum upp á umleið 163.000 $m^2$, við einari atløgusíðu upp á umleið 700 m

**Skansin:** Fyri at fáa eina so góða loysn sum til ber, hevur verið samskift við Fornminnisnevndina.
Tað hevur verið týdningarmikið, at umhvørvið rundan um Skansan, aftan á útbyggingina, skal verða eitt trivnaðarøki.
Nýggja havnalagið er umleið 50 m leyst av fjøruni undir Skansanum, har møguleiki er at leggja smábátar.

**Friðingarmyndugleikar:** Yvirfriðingarnevndin hevur á fundi 10. juni 2014 samtykt at geva loyvi til útbyggingina.

**Árinskanning:** Tá bygt verður so út á sjógv, er neyðugt at gera eina árinskanning. Hetta er ein umfatandi kanning, sum lýsir hvørja ávirkan útbyggingin hevur á umhvørvið.
Rambøl hevur gjørt kanningina, sum aftaná at býráðið hevur samtykt tað, verður send til umhvørvisstovuna.
Tað er Umhvørvisstovan sum endaliga góðkennir ætlanina.

**Broyting av byggisamtykt:** Neyðugt verður at víðka verðandi byggisamtykt til eisini at fevna um nýggja havnalagið. Uppskot um hetta, eigur sum skjótast at verða lagt fyri nevnd.

**Framhaldandi fyrireiking:** Fyri at kunna gera tær endaligu fyrireikingarnar áðrenn støða verður tikin til at projektera, er neyðugt at gera modelroynd av nýggja molanum.
Eisini er neyðugt at gera byggiprogram.

Tað eru áður jattaðar 3 mió til fyrireikingar. Neyðugt er at játta 1 mió. afturat, soleiðis at møguligt er gera modelroyndina og byggiprogrammið.
Hetta arbeiðið eigur at verða liðugt í oktober.

**Tilmæli:**
Havnameistarin og bygginevndin mæla til at samtykkja, at VVM kanningin verður send til Umhvørvisstovuna til góðkenningar, tá hon er liðug.

Mælt verður eisini til at játta 1 mió. av íløgukarminum hjá Tórshavnar havn til fyrireiking og ger av byggiprogrammi.

**Vinnunevndin 16. juni 2014:** Samtykt taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Marin Katrinu Frýdal, um at beina málið í teknisku nevnd, fall við 3 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu: Marin Katrina Frýdal, Jógvan Arge og Jákup Dam

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen

Greiddu ikki atkvøðu: Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø og Sigrún Mohr,

Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og 1 ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen, Jógvan Arge og Jákup Dam

Ímóti atkvøddu: Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
**Støðulýsing**
**Árinskanningin,** hevur verið til hoyring. Viðmerkingar til hoyringsskrivini verða í løtuni viðgjørd. Tá viðgerðin er liðug, verður hon løgd fyri býráðið, og eftirfylgjandi send til Umhvørvisstovuna til endaliga góðkenning.

**Modelroyndin,** sum vísir hvussu grótkastið skal uppbyggjast er liðug.

**Byggiprogrammið** er gjørt.

Um arbeiðið skal kunna bjóðast út í 2015, má projekteringin byrja nú. Uppskot til avtalu um projektering er gjørt við LBF, soleiðis at arbeiðið kann bjóðast út í innbodnari lisitatión.

**Tilmæli:** Havnarmeistarin og bygginevndin mæla til at samtykkja uppskot til byggiprogram.

Eisini verður mælt til at játta 6 mió. kr. til projektering og forkanningar.

**Vinnunevndin 12. januar 2015:** Útsett.

**Vinnunevndin 20. januar 2015:** Ein meiriluti: Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Bjørghild Djurhuus tekur undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum, men mælir til at samtykkja, at aðrir møguleikar fyri víðkaðari góðshavn í kommununi verða gjølla kannaðir við atliti at kostnaði og umstøðum annars, áðrenn byggiskrá verður samtykt og peningur játtaður til at projektera ætlaðu útbygginina av Skansabryggjuni og Eystara havnarøki í Havn. Víst verður til framløgd skitsuuppskot d.d. um havnarbygging á Sundi.

**Fíggjarnevnd 21. januar 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, tekur undir við meirilutanum í vinnunevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir býráðnum til at taka undir við minnilutanum.

**Býráðsfundir 29. januar 2015:** Fyrst varð atkvøtt um minnilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 10 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Rúni Djurhuus, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Ímóti atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

**Ískoyti:**

Árinskanningin lá frammi til hoyringar í tíðarskeiðinum frá 26. juni til 19. september 2014, og inn komu 7 hoyringsskriv.
Ein samlað viðmerking til hoyringsskrivini er gjørd í ”hvidbog”, sum saman við árinskanningini verður send til Umhvørvisstovuna til endaliga góðkenning.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at taka undir við viðmerkingunum í ”hvidbog” og at senda hesar til Umhvørvisstovuna til endaliga góðkenning.

**Vinnunevndin 20. april 2015:** Ein meiriluti **:** Sjúrður Olsen, tróndur Sigurðsson, og Annfinn Brekksteintekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum, men vísir til minnilutatilmælið frá vinnunevndini 20. januar 2015.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Heðin Mortensen, um at taka undir við vinnunevndini og at senda málið í náttúru- og umhvørvisnevndina, áðrenn málið verður sent Umhvørvisstovuni, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddi ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Uppskot til serstaka byggisamtykt er gjørd fyri økið (okkara j.nr. 15/00833), og liggur uppskotið alment frammi í 6 vikur til fyrst í juni, síðani skulu møguligar innkomnar viðmerkingar viðgerast.
Uppskotið til byggisamtykt liggur á heimasíðuni hjá kommununi.

Skjøl:
14/03771-13 VVM umhvørvisárinsmeting
14/03771-14 Samandráttur av VVM umhvørvisárinsmeting
14/03771-6 Kort yvir kloakkir
14/03771-9 Viðmerkingar frá náttúru- og umhvørvisdeildini
**Náttúru- og umhvørvisnevndin 29. apríl 2015:** Málið umrøtt.

**Vinnunevndin 18. mai 2015:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Býráðið samtykti á fundi tann 29. januar 2015, at játta pening til projektering.
Forprojekt er gjørt.

Fyri at kunna taka avgerð um, hvørjir arbeiðstakarar hava førleika at gera arbeiðið, er fragast at hava eina undangóðkenning.
Tað tekur tíð at hava eina undangóðkenning.

Í tilfarinum til undangóðkenning eigur at verða kunnað um, hvussu stóran prosentpart av kostnaðinum arbeiðstakarin skal seta sum bankatrygd. Í ABF er ásett, at arbeiðstakarin skal seta eina trygd upp á 15%.

Tað er ikki óvanligt í okkara grannalondum, at trygdin er 10% og minni. Ein annar leistur er, at trygdin verður ásett til 10% og at 5% av hvørjari umbøn verður eftirhildin.Um krav um trygd er ov høgt, kann tað blíva trupult hjá føroyskum arbeiðstakarum at bjóða.

**Tilmæli frá havnarmeistaranum og bygginevndini:**
 Mælt verður til:
- at góðkenna forprojektið.
- at lýsa til almenna undangóðkenning.
- at arbeiðstakarin skal seta ein bankatrygd upp á 10% av sáttmálaupphæddini og at 5% av hvørjari umbøn verður eftirhildin.

**Vinnunevndin 24. september 2015:**
Eini meiriluti: Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrún Mohr mælir til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum.

**Vinnunevndin 24. september 2015:**
Eini meiriluti: Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrún Mohr mælir til at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Málið hevur nú í longri tíð verið í Yvirfriðingarnevndini og Býarskipanarnevnd Landsins, uttan at nøkur avgerð verður tikin. Orsøkin til hetta tykist fyrst og fremst at vera árinið ætlanin hevur á útsýnið frá Skansanum.

Fyri at fáa gongd á málið er politisk avgerð tikin um, at minka ætlanina.

Tann broytta ætlanin førir við sær, at útfyllingin frammanfyri Skansan verður tikin burtur og økið minkar við 70.000 m$^2$.

Broytta ætlanin ger, at øll ferðslan til havnarøkið verður leidd eftir verðandi til- og frákoyring.

Broytingin viðførir eisini, at økið til pakkhús og avgreiðslu minkar munandi. Fyri at bøta um hetta, ber til at vaksa útbyggingina vestureftir við 15.000 m$^2$.

Broytta ætlanin og óvantaðar kanniningar av botninum gera, at neyðugt er at játta 1 mió. kr afturat til projektering.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at tillaga projektið sambært nýggju ætlanini, og at játta 1 mió. afturat til projektering.

**Vinnunevndin 12. oktober 2015:** Útsett.

**Vinnunevndin 14. oktober 2015:**

Ein meiriluti: Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Bjørghild Djurhuus tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen, taka undir við vinnunevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundir 29. oktober 2015:** Tjóðveldi legði fram soljóðandi broytingaruppskot:
Minnilutin ásannar, at nýggja ætlanin er øðrvísi enn tann fyrra, men so leingi Yvirfriðingarnevndin ikki hevur tikið støðu til loyvið til nýggju ætlaninina, mælir minnilutin frá at játta fleiri pengar til at projektera ætlaðu havnaútbyggingina.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Tjóðveldi, ið fall við trimum atkvøðum fyri og 9 ímóti. Ein býráðslimur greiddi ikki atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Halla Samuelsen, Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein og Bogi Andreasen.

Elin Lindenskov greiddi ikki atkvøðu.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri og trimum ímóti. Ein býráðslimur greiddi ikki atkvøðu.

Tey, ið atkvøddu fyri, vóru: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Sigrun Mohr, Halla Samuelsen, Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein og Bogi Andreasen.

Tey, ið atkvøddu ímóti, vóru: Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam.

Elin Lindenskov greiddi ikki atkvøðu.

**Ískoyti:**
Lýst hevur verið til undangóðkenning av at bjóða upp á arbeiðið.
Átta ymisk feløg/samtøk ynsktu at verða við, og lótu tilfar inn.

**Tilmæli:**
Havnarmeisarin og bygginevndin mæla til at bjóða fylgjandi feløgum og samtøkum at geva tilboð upp á arbeiðið:
Feløg: J& K Petersen, MT Højgaard.
Samtøk: Articon & Aarsleff, TG Verk & Suðurverk, Munck & JV-OHL, LNS & LNS Saga.

**Vinnunevndin 17. desember 2015:**
Ein meiriluti: Sjurður Olsen, Annfinn Brekkstein og Bjørghild Djurjuus tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum vísandi til at Yvirfriðingarnevndin ikki hevur tikið støðu til nýggju ætlanina.

**Ískoyti:**

Í fráboðan frá Yvirfriðingarnevndini, dagfest 23. desember 2015, verður sagt, at nevndin á fundi tann 14. desember 2015 hevur tikið avgerð um, at grótkastið undir Skansanum skal flytast góðar 30 m suðureftir. Hetta merkir at uppskotið, sum bleiv samtykt á býráðsfundi 29 oktober 2015, minkar við umleið 10.000 m$^2$.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at tillaga projektið sambært avgerðini hjá Yvirfriðingarnevndini, og at bjóða arbeiðið út.

**Vinnunevndin 29. desember 2015:**
Ein meiriluti: Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti: Jákup Dam tekur ikki undir við tilmælinum, vísandi til at ongin dagførd byggiskrá fyriliggur til nógv broytta uppskotið og tí eru nógvar óvissur.

**Ískoyti:**
Á fundi í vinnunevndini tann 24. september 2015 bleiv samtykt, at arbeiðstakarin skal seta ein bankatrygd upp á 10% av sáttmálaupphæddini og at 5% av hvørjari umbøn verður eftirhildin.
Ráðgevin heldur, at ásetingin um at afturhalda 5% av hvørjari umbøn, eigur at verða strikað. Grundgevingin er, at ein lutfalsliga lítil partur av kostnaðinum er levering av tilfari, og at tað er tyngjandi fyri gjaldførið, serliga hjá teimum smærru fyritøkunum, at 5% av hvørjari umbøn verður afturhildið.

**Tilmæli frá bygginevndini:** Mælt verður til at arbeiðstakarin skal seta eina bankatrygd upp á 10% av sáttmálaupphæddini, og at ásetingin um at 5% av hvørjari umbøn verður afturhildin, verður strikað.

**Vinnunevndin 07. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini.
Eisini samtykt, at føroyskir sáttmálar eru galdandi fyri útbjóðingina.

**Vinnunevndin 07. mars 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá bygginevndini.
Eisini samtykt, at føroyskir sáttmálar eru galdandi fyri útbjóðingina.

**Ískoyti:**
Licitatiónin var tann 22/3- 2016, kl. 13.30. Inn komu 5 tilboð:

Tilboð A og B eru fyri bryggju við ávikavist 15 m og13 m dýpi.

| | Tilboð | Upphædd |
|---|---|---|
| J & K Petersen | A | 386.826.599 |
| | B | 371.641.338 |
| Samt. Articon & Aarsleff | A | 448.758.725 |

| | | |
|---|---|---|
| | B | 425.843.654 |
| MT Højgaard | A | 593.872.000 |
| | B | 572.000.000 |
| Samt. TG Verk & Suðurverk | A | 793.864.643 |
| | B | 770.129.797 |
| Samt. LNS Saga & LNS | A | 505.219.402 |
| | B | 488.709.925 |

Lisitatiónsprokokol og innstilling er gjørd j.nr. 14/00896-39

Uppskot til avtalu er gjørt við Búnaðarstovuna og bóndan um at keypa 91.979 $m^2$ av lendi á Glyvursnesi til gróttøku. Tá liðugt er at taka grót, er Tórshavnar kommuna eigari av grótbrotinum, og kann brúka hetta til annað endamál.
Avtalað er eisini, at ein vegur skal gerast oman fyri grótbrotið fyri at sleppa til avgrevstur frá grótbrotinum. Vegurin verður liggjandi aftan á at liðugt er at taka grót.
Eisini er avtala gjørd fyri ampar, sum bóndin hevur av arbeiðinum, og at møguligt annað virksemi kemur í grótbrotið, sum liggur í haganum.
Samlaður kostnaður fyri keyp av lendi, mist vetrarbit og ampar er tilsamans kr. 8.958.516 sí j.nr. 14/00896-40

Fíggjarlig viðurskiftir:
Sambært uppgerð j.nr.14/00896-41 er samlaði kostnaðurin fyri arbeiðið 465 mió. kr.
Arbeiðið skal fíggjast av íløgum fyri Tórshavnar havn í 2016, 2017, 2018 og 2019.
Láni tørvurin er 300 mió. kr.
Bæði útlendskir og føroyskir fíggingarstovnar hava givið tilboð upp á lán.
Ein hóskandi afturgjaldsprofilur fyri Tórshavnar havn er 20 ár. Nú rentan er lág, er tað helst rættast at gera avtalu um fasta rentu fyri 250 mió fyri tey fyrstu 15 árini, og variabla rentu fyri 50 mió. Hetta ger, at vit kenna útreiðslurnar øll tey fyrstu árini áðrenn lánið er niðurgoldið, og at møguleiki er at niðurgjalda lánið við tí variablu rentuni skjótari enn ætlað.
Tilboð er komið upp á lán, við nevnda profili. Tað fæst áleið eins bílig fígging í Føroyum sum uttanlands.
Tá eins bílig fígging fæst í Føroyum í mun til uttanlands, er tað helst rættast at taka av tí føroyska tilboðnum, sum eisini ger prosessina og samskifti munandi lættari. sí j. nr 14/00896-42

**Tilmæli:** Bygginevndin og havnarmeistarin mæla til,
- at játta 465 mió. kr av íløgum fyri Tórshavnar havn í 2016, 2017, 2018 og 2019.
- at taka av tilboð A frá P/F J.& K. Petersen, og at gera byggisáttmála.
- at taka undir við uppskoti um avtalu við Búnaðarstovuna og bóndan um grót av Glyvursnesi

Havnarmeistarin mælir eisini til at gera lániavtalu um 250 mió við fastari rentu, og 50 mió við variablari rentu. Lánini verða avdrigin yvir 20 ár.

**Vinnunevndin 01. august 2016:** Ein meiriluti, Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Bjørghild Djurhuus, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur ikki undir við tilmælinum og vísir til viðmerkingarnar á vinnunevndarfundi 29. desember 2015.

**Fíggjarnevndin 04. august 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein tekur undir við vinnunevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur undir við Jákup Dam í vinnunevndini. Jógvan Arge vísir býráðnum á, at ongin lýsing er løgd fram av árinunum, sum íløgan og tann stóra lántøkan hava á búskap kommununar.

**Býráðsfundur 04. august 2016:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Tjóðveldi, um at útseta avgerðina um at útbyggja Skansabryggjuna, til nýtt býráð hevur tikið við 1. januar 2017, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Ímóti atkvøddu:
Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen

Greiddi ikki atkvøðu:
Halla Samuelsen

Síðan varð atkvøtt um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Jan Christiansen og Sjúrður Olsen

Ímóti atkvøddu:
Marin Katrina Frýdal.

Greiddu ikki atkvøðu:
Jógvan Arge og Jákup Dam.

**Ískoyti:**
Avgerð bleiv tikin á býráðnum tann 4. august 2016, um at upptaka lán upp á 250 mió. til eina fasta rentu.
Avtalan um fasta rentu fylgir rentumarknaðinum, og var tá 1,74 %.

Endaliga lánsavtalan var klár til undirskrivingar 2. nov. 2016.

Síðani samtyktina í býráðnum, er swappurin hækkaður spakuliga uppeftir, serliga aftan á amerikanska forsetavalið.

Um lánið verður undirskrivað nú, er tann fasta rentan pr. 15.11.2016 , 2,1%

Øll tekin eru til, at rentan framhaldandi hækkar.

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til, at lánið verður tikið beinanvegin.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Val av bygginevnd til havnaútbyggingina.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Boði Andreasen, Bergun Kass og Heðin Mortensen.

# 83/17 Uppskot til broyting av almennu byggisamtyktini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.11.2016 | 272/16 | 16/04149-2 |
| 2 Býráðsfundur | 16.11.2016 | 291/16 | 16/04149-2 |
| 3 Kaldbaksnevndin | 19.01.2017 | 1/17 | 16/04149-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 24.01.2017 | 20/17 | 16/04149-2 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.02.2017 | 38/17 | 16/04149-2 |
| 6 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 83/17 | 16/04149-2 |

**Málslýsing:**
Vinnunevndin samtykti á fundi 31. oktober 2016 at taka ímóti gróti frá Eysturoyar tunlinum og fylla upp eystan fyri verandi bryggju á Sundi (j.nr. 16/01798).

Áðrenn havnarøkið á Sundi verður víðkað, er neyðugt at broyta almennu byggisamtyktina.

Býarskipanardeildin hevur gjørt kortskjøl við uppskoti um hvussu almenna byggisamtyktin eigur at verða broytt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at góðkenna uppskotið til broyting av almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu samsvarandi kortskjølum, dagf. 11.11.2016 og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 16. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Kaldbaksnevndin 19. januar 2017:** Málið varð framlagt. Kaldbaksnevndin er ónøgd við, at tey enn eina ferð ikki eru kunnað um tað, sum fyriferst á Kaldbaksfirði.

**Ískoyti:**
Eftir at samtykta broytingin av almennu byggisamtyktini fyri økið sunnan fyri havnaøkið á Sundi varð kunngjørd og løgd fram til hoyringar, hevur kommunan fingið handað mótmælisskriv frá borgarum í Kaldbak. Sí skjal nr. 16/04149-11.

20. januar 2017 hevur kommunan fingið handað mótmælisskriv frá borgarum í Kaldbak, har tey mótmæla, at havnarøkið á Sundi verður víðkað uml. 450 m eystureftir og uml. 100 m út á sjógv, tilsamans umleið 50.000 $m^2$. Tey føra fram, at økið, sum talan er um at fylla út við gróti, er eitt vakurt og serstakt náttúruøki, og meta tey, at økið er fevnt av §6, stk. 2 í løgtingslóg um náttúrufriðing.

Tey vísa somuleiðis á, at tá vegur varð gjørdur til Kaldbaks síðst í 70'unum, varð øll fjøran kring Kaldbaksfjørð "ofrað" til hetta endamál, og at økið, sum ætlaða broytingin í almennu byggisamtyktini fevnir um, er síðsta strekki av fjøru, sum gongur heilt oman á sjógv inni á Sundi.

Umsitingin metir ikki, at talan er um eitt serstakt náttúruøki av tí at tað liggur upp at vinnuøki við virkjum í umhvørvisflokki 4-6, og hevur økið tískil longu mist tað náttúruvirði, tað einaferð

hevði. Fyri at síggja umhvørvisflokkingina fyri B1 økið í almennu byggisamtyktini, sí skjal 16/04149-12.

Ætlaða broytingin liggur í einum øki, sum bleiv broytt frá einum B9 øki til eitt B1 øki í 2006, sí journal nr. 2005-0457-1 og 2. Sostatt hevur økið ligið sum B9 øki í almennu byggisamtyktini longri enn hetta. Tá broytingin varð framd í 2006, vóru eingi mótmæli frá borgarum í Kaldbak.

Grundgevingin fyri at umsitingin á fyrsta sinni metti tað vera ráðiligt at fara undir hesa broyting av byggisamtyktini eisini at umfata sjógvin, er tí at tað hevur víst seg, at stórur eftirspurningur er á vinnuøkjum í Tórshavnar kommunu – serliga vinnuøkjum móti sjógvi. Økið á Sundi, norðanfyri økið sum broytingin fevnir um, er longu vinnuøki, og av tí at verandi økið er í brúk, metir umsitingin, at ráðiligt er at taka av møguleikanum at vaksa um økið.

Enn er eingin ítøkilig ætlan um nýtslu av økinum, men fleiri hava víst áhuga í at leggja virksemi sítt í økinum, har ímillum Brennistøðin, Brandskúlin, Kosangas, Biogas o.o. Felags fyri hesar vinnur er, at fyrimunir eru við at staðseta tær tætt við sjógvin. Um hesi skulu leggja virksemið í økinum er neyðugt at víðka um vinnuøkið, av tí at tað ikki er pláss fyri teimum í verandi vinnuøki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at halda fast við ætlaðu broytingina av almennu byggisamtyktini fyri økið sunnan fyri havnaøkið á Sundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 24. januar 2017:** Útsett.

**Ískoyti:**
Málið varð útsett á seinasta fundi, og tí verður víst til seinasta ískoytið í samb. við mótmælisskrivið frá borgarum í Kaldbak.

Síðani seinasta fund í byggi- og býarskipanarnevndini hevur umsiting fingið nakrar viðkomandi upplýsingar afturat:

1. Tórshavnar kommuna hevur fingið bræv frá Yvirfriðingarnevndini, har biðið verður um at fáa viðmerkingar til mótmælið frá borgarunum í Kaldbak, umframt viðmerkingar til eitt nýtt uppskot til, hvat grótið úr Eysturoyartunlinum kann nýtast til. Sí skjal j.nr. 16/04149-21 Bræv frá Yvirfriðingarnevndini.

   Viðmerkingarnar til Yvirfriðingarnevndina vóru tær somu, sum er lýst í ískoytinum omanfyri. Nevniliga, at kommunan ikki metir, at økið er náttúruvakurt, orsakað av at tað liggur beint við vinnuøkið á Sundi, at økið hevur ligið sum vinnuøki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu í fleiri ár, umframt at tørvur er á fleiri vinnuøkjum í kommununi.

   Streymoyar sýslu náttúrufriðingarnevnd hevur fingið eitt uppskot frá P/F Eysturoyar- og Sandoyartunlinum til eina alternativa loysn til at sleppa av við tilfarið úr tunlinum, nú klaga er komin til Tórshavnar kommunu frá Kaldbaksfólki um havnarútbyggingina á Sundi.

   Uppskotið hjá P/F Eysturoyar- og Sandoyartunlinum er at sleppa av við tilfarið við at fylla upp omanfyri tunnilsmunnan og at fylla 3 gil upp á Hjalla.

Náttúrfriðingarnevndin viðgjørdi uppskotið á fundi 1. februar 2017 og var samd um at halda fast við ætlanina inni á Sundi av tí at hon metti, at Tórshavnar kommuna soleiðis fær mest burtur úr tilfarinum, og av tí at hon metti, at tað var eitt ov stórt inntriv í náttúrina at fylla tey 3 gilini. Sí skjal 16/04149-20 kort av gilum.

Umsitingin í Tórshavnar kommunu er samd við Náttúrufriðingarnevdnini og metir, at best hevði verið, at nýtt tilfarið úr Eysturoyartunlinum til at útbyggja vinnuøkið á Sundi. Um Yvirfriðingarnevndin tekur avgerð um at loyva at fylla gilini upp, ynskir Tórshavnar kommuna at ein neyvari viðgerð av málinum verður gjørd, umframt at fleiri kanningar og lýsingar av økinum verða gjørdar. Somuleiðis ynskir Tórshavnar kommuna at verða við í hesi tilgongd.

Sí viðmerkingar til Yvirfriðingarnevndina í skjal 16/04149-23.

Viðmerkjast skal, at uppafturtøkan í Yvirfriðingarnevndini hevur ikki steðgandi virknað á málsviðgerðina í Tórshavnar kommunu.

2. Fyribils støðulýsing viðvíkjandi plantum og fuglum við Toftavatn, við Sjógv og inni á Sundi gjørd í samband við Eysturoyartunnilin. Sí skjal nr. 16/04149-19 Árinskanning av Skálafjarðartunlinum.

   Viðvíkjandi økinum á Sundi varð í støðulýsingini mett, at margfeldið í økinum er stórt. 6 fuglasløg eiga í økinum, æðuungar eru fram við landinum og 108 ymisk plantusløg eru í økinum, harav 3 eru bólkaði sum sera sjáldsom. Lýsingin fevnir tó um eitt stórt øki á Sundi, og staðfest er ikki, hvar í økinum teir ymsu vøkstrirnir eru. Tó er staðfest, at ein av teimum trimum sera sjáldsomu plantunum er í økinum millum verandi vinnuøki og Kaldbaksvegin, og liggur sostatt ikki í tí økinum, sum verður mest ávirkað av útbyggingini. Økið, sum verður mest ávirkað av útbyggingini er lýst at vera skiftandi frá at vera fjørukent við smáum blettum av sandi og gróti til bera hellu og stórt grót, umframt ódyrkað lendi, ið verða nýtt til seyðabit og sum slóttulendi.

3. Árinsmeting og góðkenning í sambandi við útfylling fram við landi eystan fyri havnarøkið á Sundi.

   Eftir umbøn frá Umhvørvisstovuni hevur Tórshavnar havn gjørt eina kanning av botninum saman við eini lívfrøðiligari fakligari meting av plantum og djórum, sum eru at síggja í økinum. Sí skjal 16/04149-18 Árinsmeting og góðkenning.

   Niðurstøðan í kanningini er:

   *Úrslitið av kanningunum vísir, at økið kann lýsast við fýra búlendissløgum (habitatum), sum øll eru rættiliga vanlig í Føroyum. Búlendini verða flokkað sum, "Stórtari við reyðtara á nakað vardum kletti", "Grovur blandaður sandur", "Infralittoral mórukendur sandur" og Circalittoral sandkend móra.*

   *Fiskaslagið, dvørgastubbi (Lebetus guilleti) er staðfest fyri fyrstu ferð í Føroyum. Hetta lítla stubbaslagið er óivað mangan yvirsæð, tí tað er so óásýniligt. Tískil er slagið ikki við á reyðlistanum hjá IUCN2, hóast lutvís fáar staðfestingar eru av dvørgastubba yvirhøvur. Smb. útbreiðslukortinum hjá IUCN, er hendan staðfesting tann norðasta nakrantíð.*

Umhvørvisstovan metir sostatt ikki, at ætlaða útfyllingin út á sjógv fer at hava munandi ávirkan á náttúru og umhvørvi.

Ynski um at varðveita áarósan millum verandi havnarøkið og uppfyllingina við at gera uppfyllingina leysa frá verandi havnarøki við brúgv tvørturum, tykist ikki at gagna havnarøkinum. At ímynda sær, at hetta verður eitt trivnaðarøki, har fólk koma at standa og fiska sjósíl er ógvuliga ósannlíkt, hetta tí at økið kemur at verða merkt av at tað er eitt vinnuøki, umframt at verður nýggja økið leyst frá verandi havnraøki, verður hetta ein avmarking av økinum og minkar hetta um nýtslumøguleikarnar. Harumframt hevur hendan loysnin somuleiðis fíggjarligar avleiðingar við sær. Umsitingin metir sostatt ikki, at hendan loysnin kemur at gagna endamálinum við at víðka um havnarøkið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at halda fast við ætlaðu broytingina av almennu byggisamtyktini fyri økið eystan fyri havnarøkið á Sundi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. februar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Atkvøddu blankt: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

# 84/17 Broyting av ásetingum fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.02.2017 | 36/17 | 17/00371-1 |
| 2 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 84/17 | 17/00371-1 |

**Málslýsing:**
Sambært ásetingunum fyri umráðispartarnar A1 í 3. Grundumráði, skulu grundstykkini vera í minsta lagi 500 m². Tá bygging verður framd eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 m², tó í minsta lagi 400 m² fyri stakhús og 300 m² fyri hvønn partin av einum tvíhúsum ella raðhúsum. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil.

Verandi ásetingar fyri A1 øki í 3. Grundumráði í almennu byggisamtyktini, viðvíkjandi minstu stødd av grundstykkjum, tekur ikki hædd fyri dáminum í økjum sum heild. Í fleiri gomlum býarpørtum í Tórshavn eru grundstykkir, ið eru minni enn ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu loyva. M.a. kann nevnast, at í Rabarbukvarterinum eru flestu grundstykkini millum 150 m² - 200 m² til støddar.

Fyri at gera tað møguligt at varðveita dámin í gomlum býarpørtum í Tórshavnar kommunu verður skotið upp, at soljóðandi ískoyti verður lagt til § 5., pkt. 2:

- 2. Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 m². Tá byggingin verður framd eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 m², tó í minsta lagi 400 m² fyri stakhús og 300 m² fyri hvønn partin av einum tvíhúsum ella raðhúsum. Ein partur av teirra minstuvídd kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil.

  Í samband við eitt natúrliga avmarkað øki, har flestu grundstykkini eru minni enn ásetingarnar í pkt. 2 loyva, kann byggivaldið geva serloyvi til at víkja frá ásettu støddini á grundstykkjunum. Hetta fyri at varðveita dámin í økinum.

  Viðmerking:Ásetingin verður nýtt, tá talan er um grundstykki í gomlum býarpørtum, m.a. Rabarbukvarterið, Tinghúsvegurin og Villumsgøta.

Hetta samsvarar eisini miðbýarætlanini hjá Tórshavnar kommunu við at tætta miðbýin, og fáa fleiri fólk at búseta seg í honum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at soljóðandi ískoyti verður lagt til § 5, pkt.2:

> Í samband við eitt natúrliga avmarkað øki, har flestu grundstykkini eru minni enn ásetingarnar í pkt. 2 loyva, kann byggivaldið geva serloyvi til at víkja frá ásettu støddini á grundstykkjunum. Hetta fyri at varðveita dámin í økinum.
>
> Viðmerking: Ásetingin verður nýtt, tá talan er um grundstykki í gomlum býarpørtum, m.a. Rabarbukvarterið, Tinghúsvegurin og Villumsgøta.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. februar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

# 85/17 Bygginevndin fyri Hoyvíkar kirkju- kirkjugarður í Hoyvík (2007-2036)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2014 | 54/14 | 14/00772-13 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.01.2015 | 2/15 | 14/00772-13 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2015 | 14/15 | 14/00772-13 |
| 4 Býráðsfundur | 26.02.2015 | 37/15 | 14/00772-13 |
| 5 Tekniska nevnd | 04.03.2015 | 32/15 | 14/00772-13 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.11.2015 | 243/15 | 14/00772-13 |
| 7 Fíggjarnevndin | 02.12.2015 | 312/15 | 14/00772-13 |
| 8 Býráðsfundur | 10.12.2015 | 245/15 | 14/00772-13 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 04.03.2016 | 74/16 | 14/00772-13 |
| 10 Fíggjarnevndin | 09.03.2016 | 105/16 | 14/00772-13 |
| 11 Býráðsfundur | 17.03.2016 | 75/16 | 14/00772-13 |
| 12 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2016 | 105/16 | 14/00772-13 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.04.2016 | 126/16 | 14/00772-13 |
| 14 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 175/16 | 14/00772-13 |
| 15 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 144/16 | 14/00772-13 |
| 16 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2016 | 171/16 | 14/00772-13 |
| 17 Byggi- og býarskipanarnevndin | 14.06.2016 | 178/16 | 14/00772-13 |
| 18 Fíggjarnevndin | 16.06.2016 | 240/16 | 14/00772-13 |
| 19 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 187/16 | 14/00772-13 |
| 20 Býráðsfundur | 26.07.2016 | 193/16 | 14/00772-13 |
| 21 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.02.2017 | 32/17 | 14/00772-13 |
| 22 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 36/17 | 14/00772-13 |
| 23 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 85/17 | 14/00772-13 |

**Lýsing av málinum:**

Í sambandi við fyrispurningar um nýggjan kirkjugarð í Hóyvík, hevur umsitingin gjørt uppskot til staðseting fyrr ávíst 5 ymiskar staðsetingarmøguleikar (j. nr. 2007-2037/4). Arbeitt hevur verið víðari við at kannað um eisini aðrir staðsetingarmøguleikar eru, og verður hervið víst á eitt økið afturat. Økið sum talan er um, liggur oman fyri sambindingarvegin millum Inni á Gøtu og framtíðar innkomuvegin til Tórshavn, sum framhald av Dalinum Langa.

**Byggisamtyktin:**
Verandi serstaka byggisamtykt fyri hetta økið varð gjørd í sambandi við býarpartin Stórutjørn. Stórur partur av økinum er D2 og har, sum hetta endar eystureftir, stingur ein kíli av 4. grundumráði, hagi, seg inn millum D2 og A3 bústaðarøkið Inni á Gøtu.

**Økiseyðkenni:**
Norður-suðurgangandi dalskap við norðurendan av Dalinum Langa. Dalurin ella lægdin liggur nakað burtur frá Sambindingarvegnum (Klingran) og eru góðir møguleikar at staðseta bygningar og parkeringsøki skamt frá vegnum. Í lívd av eysturhallandi skráa liggur vesturhallandi slætti við stórbærum útsýni norðureftir móti Sundalagnum og tí vakra Skálafirði.

**Nærøkini:**

Økið liggur vart og er ikki áloypandi í lendinum, millum 5 og 20 metur hægri enn bústaðarøkið Inni á Gøtu, og partvís afturundir lítla heygnum millum bæði økini.

**Víðkanarmøguleikar:**
Samlað økisvídd er 25.000 m², og góður møguleiki er at byrja við 3.500 - 5000 m² í lægdini undir brekkuni, fyri síðan at víðka norðureftir.

**Atkomuviðurskifti:**
Tætt við sambindingarveg, ið kann leiða nógva bilferðslu. Siðvenjan at ganga í gravarfylgi er komin til eitt vegamót, men eru her møguleikar, tí í beinari linju eru 950 m til kirkju og samkomuhús ígjøgnum fríøkið Dalurin Langi. Til sammetingar er beina leiðin millum Dómkirkjuna og kirkjugarðin við Velbastaðvegin 1250 m.

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Ongin fígging er avsett til nýggjan kirkjugarð í Hoyvík. Útvegan av kirkjugarði í Hoyvík er ikki átrokandi, við tað at verandi kirkjugarður í Tórshavn hava nøktandi pláss enn.

**Niðurstøða.**
1. Kirkjugarður á hesum stað vil ikki ávirka verandi býarbygging.
2. Tað er av týdningi at kirkjugarðurin kann víðkast.
3. Kirkjugarðurin kann vera partur av frílendisætlan fyri býarbygging í Hoyvíkshaganum.
4. Siðvenja er at leggja kirkjugarðar uttanfyri býir og bygd øki, fyri síðan at býurin nærkast og at enda fevnir um økið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at nevndin tekur støðu til staðsetingarmøguleikar út frá fyriliggjandi uppskotum, og um arbeiðast skal víðari við málinum, og um so er, at játtað pening til fyrireikingar, herundir kanningar og projektering av skitsuuppskotinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 8. februar 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við staðsetingini, sambært kortskjali dagfest 03.02.2010.

Formaðurin hevur ynskt málið á skrá til ummælis

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. juni 2012:** Kunnað var um málið.

**Ískoyti:**
Um arbeiðast skal víðari við málinum, kann víðari gongdin í málinum verða:
1. Keyp av lendi
   Keyp av lendi 25.000 $m^2$ av matr. 135ed Hoyvíkshagi 3,5 mill.
2. Gerð av forprojekti
   Gera forprojekt til myndugleikaviðgerð
3. Borgarakunning
   Hava kunningarfund fyri borgarunum í Hoyvík
4. Myndugleikagóðkenning, friðingarnevndir, Føroya Stift
   Náttúru- og yvirfriðingarnevndarloyvi og loyvi frá Føroya Stift, kunngerð um kirkjugarðar.
5. Projektering/útbjóðingartilfar og útbjóðing
   At bjóða út til tvey projekterandi feløg at projektera, gera útbjóðingartilfar, bjóða út og hava lisitatión
6. Tíðarætlan

Tíðarætlan keyp av lendi medio 2015, loyvir ultimo 2015, projektering og útbjóðing medio 2016 arbeiði kann byrja aftaná summarfrítíðina 2016.

Peningur er tøkur á karminum 6575 fyri 2014, men onki er játtað, til víðari arbeiði við málinum. Eingin fíggjarkarmur er avsettur á íløgum 2015.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir nevndini til at taka støðu til, um verkætlanin skal setast í verk eftir leistinum sum skotin er upp, og um neyðugur fíggjarkarmur skal játtast til verkætlanina komandi ár, fyri 2016.
Verður avgjørt at arbeiða víðari við málinum, skal málið til teknisku nevnd til viðgerðar og fíggjarnevndina til samtyktar at leggja fyri býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2014:** Kunnað varð um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. januar 2015:** Útsett til komandi fund, tá tað verður lýst og framlagt í sambandi við staðsetingina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2015:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við staðsetingini, sambært kortskjali dagfest 03.02.2010.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur støðu á seinni fundi.

Helena D. á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 26. februar 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Jógvan Arge.

Greiddi ikki atkvøðu: Jan Christiansen.

**Tekniska nevnd 04. mars 2015**: Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt kravfestingar til málið um kirkjugarðin í Hoyvík, sí hjálagda skjal. Fyrsta byggistig fevnir um gerð av lendi til 320 gravir, at skipa atkomuveg og parkeringspláss til 72 bilar, at byggja lítið arbeiðshús til amboð og uppihald. Umframt at garðurin skal girðast inni.

Kravfestingarnar siga, hvussu nýggi kirkjugarðurin ynskist skipaður. Kravfestingarnar eru grundskjal undir uppskoti til skipan, projektering, myndugleikagóðkenning/Føroya Stift, friðingarviðgerð, og til løgdeildina at fyriskipa og fremja keyp av lendi frá Búnaðarstovuni. Ætlan er at bjóða projekteringina út í innboðnari lisitasjón. Tilboðini verða løgd fyri nevnd aftur, tá tey eru innkomin.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við kravfestingarskjølunum, at bjóða projekteringina út, og at beina málið til løgdeildina at keypa lendi.
Mælt verður eisini til at játta kr. 500.000,- av karminum á konto 6275 Kirkjugarðar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. november 2015: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Fíggjarnevndin 02. december 2015: Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at beina málið í býráðið.**

Heðin Mortensen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 10. desember 2015**: Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Kirkjugarðurin í Hoyvík hevur verið úti í kapping, har tvær ráðgevarafyritøkur vórðu bidnar um at koma við einum skipanaruppskotið til nýggjan kirkjugarð í Hoyvík, umframt tilboði upp á ráðgevarakostnað fyri 1. byggistig. Skipanaruppskotið varð vektað við 25% og ráðgevarakostnaðurin varð vektaður við 75%.

Fríggjadagin 26. februar 2016 komu undirhondsboðini frá tveimum ráðgevarafyritøkum inn.

Kostnaðarstøðið fyri ráðgevingina av 1. byggistigi var høgt og var eisini stórur munur millum tey tvey tilboðini, sum vórðu latin inn. Harumframt vóru kostnaðarmetingarnar fyri bygging av byggistigunum eisini høgar, og sostatt metti dómsnevndin, mannað av umsitingini, at vegna høga kostnaðarstøði, er ikki ynski at taka av nøkrum av tilboðunum, men heldur lata Býarskipan arbeiða víðari við verkætlanini, at gera skipanaruppskot, projekt og føra verkætlanina fram til útbjóðingar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at samsýna bjóðarunum kr. 25.000 í part fyri luttøkuna, og at býarskipan arbeiðir víðari, at gera skipanaruppskot, projekt og føra verkætlanina fram til útbjóðingar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 04. mars 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Býráðsfundur 17. mars 2016: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
Arbeitt verður við skipan av kirkjugarðinum. Býararkitekturin kemur at greiða frá tilgongdini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2016: Kunnað varð um málið.**

**Ískoyti:**
Býarskipanardeildin hevur gjørt uppskot til Kirkjugarðin í Hoyvík, sí viðheftu skjøl (14/00772-38, 1,2,3,4)

Í fyrsta byggistigi er pláss fyri umleið 380 gravum. Afturat tí er pláss fyri barnagravum, urnugravum og felagsøki við plássi til starvsfólk. 1. stig fevnir eisini um arbeiðsveg frá Klingruni inn á arbeiðsøkið, umframt útgrevstur til parkeringspláss. Umsitingin metir, at atkomuvegur og parkeringspláss eiga at vera ein sjálvstøðug teknisk verkætlan.

Skotið verður upp í fyrsta lagi at bjóða 1. byggistig út í undirhondsboð. Í útbjóðingini verða hesi arbeiði gjørd:

*Flytan og niðurtøka av verandi stiki/hegni*
*Arbeiðsvegur inn á kirkjugarðsøkið frá Klingruni*
*Avgrevstur og burturbeining av tilfari av 1. byggistigi*
*Avvatning*
*Møgulig spreinging*

Tá øll neyðug loyvi frá myndugleikum, keyp av lendi og broyting av byggisamtykt er fingin til vega, verður útbjóðingartilfarið sent út til 2 arbeiðstakarar. Arbeiðstakararnir, ið eftir ætlan sleppa at bjóða, vera:
P/F Hansen & Jakobsen
Sp/f Hellisdal
Byrjað verður eftir ætlan 1. juni, og hetta arbeiðið er mett at taka 5 mánaðir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla til at bjóða 1. byggistig út í undirhondsboð eftir omanfyri standandi lýsing.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. apríl 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

**Ískoyti.**
Løgdeildin hevur kannað møguleikarnar fyri at keypa lendið frá Búnaðarstovuni.
Festarin er hoyrdur og eru allir formalitetir í samband við avlýsing av tinglýstum, leigusáttmála og deklaratión á ognini eisini avgreiddir.

Búnaðarstovan hevur sent kommununi eina fyribils tilsøgn, keypsprísur 2.311.500,00.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at keypa lendið fyri 2,4 mill. kr. sum verður fíggjað av íløgukarminum 2016 á 6575 kirkjugarðar.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.**

**Býráðsfundur 19. mai 2016: Einmælt samtykt.**

**Ískoyti:**
Frank Hellisdal og Sp/f ZRJ geva tilboð uppá 1. byggistig tann 6. juni 2016. Umsitingin viðger innkomnu tilboðini og ger tilmæli til fundin. Tilboðini verða løgd í málið og kunnu síggjast á nevndarportalinum frá 7. juni 2016.

**Tilmæli:**
Tilmæli kemur til fundin.

**Ískoyti:**
Sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal og Sp/f Z.R.J hava givið tilboð uppá 1. byggistig tann 6. juni 2016. Umsitingin hevur viðgjørt innkomnu tilboðini. Tilboðini eru løgd í málið og kunnu síggjast á nevndarportalinum frá 7. juni 2016.

2 tilboð eru innkomin. Tey eru áljóðandi:

| | |
|---|---|
| Sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal | 5.159.000,00 kr. uttan mvg |
| Sp/f Z.R.J | 2.683.043,00 kr. uttan mvg |

Sp/f Z.R.J. hevur gjørt vart við eina roknivillu í tilboði teirra. Endaliga tilboðið er 4.340.543 kr. uttan mvg., og hetta stendur Sp/f Z.R.J. við. Umsitingin hevur síðani gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera 1. byggistig. Samlaði kostnaðurin er 5,4 milliónir.

Játtaðar eru kr. 500.000 til projektering. Av hesum eru kr. 405.000 eftir.
Á karminum til kirkjugarðar eru kr. 1.795.000. Neyðugt er sostatt við fígging 3,2 mió. afturat

Støða skal takast til, um takast skal av tí lægsta tilboðnum frá Sp/f Z.R.J. og hvussu restupphæddin á 3,2 mió. skal fíggjast.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2016: Útsett.**

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur kannað málið. Umsitingin hevur sett seg í samband við sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal, har kunnað hevur verið um málið, at lægri tilboðsveitari, Sp/f Z.R.J., hevur gjørt eina roknivillu og at endaligi tilboðsprísurin hjá Z.R.J. er 4.340.543 kr. uttan mvg. Umsitingin hevur heitt á sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal at koma við einum nýggjum tilboði, grundað á sama útbjóðingartilfar.
Sp/f Maskingrevstur v/Frank Hellisdal boða frá, at teir standa við sítt tilboð, áljóðandi 5.159.000,00 kr. uttan mvg, og at um tilboðið skal broytast ella regulerast, er neyðugt at útbjóðingargrundarlagið eisini verður broytt.

Endaliga tilboðið hjá sp/f Z.R.J. er 4.340.543 kr. uttan mvg. Hetta stendur sp/f Z.R.J. við.

Umsitingin hevur síðani gjørt eina samlaða kostnaðarmeting at gera 1. byggistig. Samlaði kostnaðurin er 5,4 milliónir.

Játtaðar eru kr. 500.000 til projektering. Av hesum eru kr. 405.000 eftir.
Á karminum til kirkjugarðar eru kr. 1.795.000. Neyðugt er sostatt við fígging á 3,2 mió. afturat.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla til at taka av lægsta tilboðnum hjá sp/f Z.R.J. áljóðandi 4.340.543 kr. uttan mvg.
Eisini verður mælt til at fíggja restupphæddina á 3,2 mió. av íløgukarminum á 6275, Fríðkan av kommununi, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2016: Samtykt at taka undir við tilmælinum. Samstundis verður heitt á umsitingina um at hava greiðar reglur, tá roknifeilir, sum ávirka prísin, verða staðfestir í tilboðum.**

**Fíggjarnevndin 16. juni 2016: Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.**

Annnfinn Brekkstein luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 16. juni 2016: Einmælt samtykt.**

**Býráðsfundur 26. juli 2016: Einmælt samtykt**

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting fyri at gera kirkjugarðin í Hoyvík lidnan. Samlaði kostnaður er: kr. 13.659.359,00. Fyrsta byggistig á Kirkjugarðin í Hoyvík verður liðugt síðst í mars 2017. Skipan av økinum, avgrevstur og burturbeiningin av tilfari hevur gingið sera væl. Sprongt og brekkað er á økinum til tess at avvatna alt kirkjugarðsøkið. Atkomuvegur frá Klingruni gjøgnum kirkjugarðin er skipaður og grovplaneraður. Somuleiðis er parkeringsøkið grovplanerað.

Næsta byggistig er liður í eini størri ætlan at fáa gjørt kirkjugarðin lidnan. Her er talan um í fyrsta lagi at drena kirkjugarðin, og at breiða mold út í turru árstíðini. Turra árstíðin er frá mai - august 2017. Hetta arbeiðið má byrja skjótast gjørligt, um tað skal gerast í 2017. Samstarvið við verandi arbeiðstakara á Kirkjugarðin í Hoyvík, Z.R.J., hevur gingið sera væl. Møguleiki er at gera ein ískoytisavtalu við Z.R.J, av tí at teir longu eru á staðnum. Hetta verður mett at vera bíligari og skjótari enn at bjóða út av nýggjum. Somuleiðis skal havast í huga, at moldin skal liggja í umleið 1 ár at seta seg. Umsitingin hevur biðið um tilboð frá Z.R.J. at gera næsta byggistig.

Tilboðið frá Z.R.J á hetta arbeiðið er: kr. 4.252.485,00 uttan mvg.

Samlaði kostnaður á hetta arbeiðið er, sí Kostnaðarætlan C: kr. 4.786.703,00.

2 mió. kr. eru settar av íløgu karminum 2017 til Kirkjugarðar. Írestandi upphædd, sum neyðug er at játta í 2017: 2.8 mió. kr.

Av tí at arbeiðið við kirkjugarðinum ikki má steðga upp, so verður neyðugt í fyrstu atløgu at fíggja arbeiðið av øðrum verkætlanum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekurin mæla til at taka av tilboðnum frá Z.R.J. og játta írestandi upphædd á 2.8 mió. kr. av kontantútgjaldinum í sambandi við eldsbrunan í AA-húsinum áljóðandi 1.63 mió. kr., umframt flyta 1.17 mió. kr. av játtanini til vegagerðina á Traðabrekku/Hoyvíksvegur, sí j.nr. 15/04352, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. februar 2017: Samtykt at taka undir við tilmælinum.**

Fíggjarnevndin 22. februar 2017: **Samtykt at játtað tilsaman 4,8 mió. kr. til kirkjugarðin í Hoyvík soleiðis: 2 mió. kr. av íløgukarminum 6575. Írestandi upphædd játtað av Traðarbrekka/Hoyvíksvegur 1,44 mió. kr. og av AA-húsið 1,36 mió. kr. og at beina málið í býráðið.**

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

# 86/17 Íbúgvar norðuri í Sundum : Umsókn um stuðul til nýggjan sparkivøll og dagføring av verandi spæliplássi.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.02.2017 | 31/17 | 16/01498-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 37/17 | 16/01498-2 |
| 3 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 86/17 | 16/01498-2 |

**Málslýsing:**
Umsókn, dagfest 30. mars 2016, um skipan av sparkivølli Norðuri í Sundum í Kollafirði.

Umsóknin vísir á staðseting av vølli sunnanvert matrikul 337 og vestan fyri matrikul 28. Lendið til sparkivøllin, uml. 620 $m^2$, er partur av matrikul nr. 27a. Viðkomandi leigari/brúkari av økinum hevur ávíst økið.

Økið er ogn hjá Búnaðargrunninum. Byggisamtyktin fyri økið er sethúsaøki A1.

Atkoman til stykkið verður frá Brekkutúni nr. 3, uml. 90 m av vegi/gøtu tvørtur ígjøgnum traðarlendi, ið eisini er ogn hjá Búnaðargrunninum. Festarin/brúkarin av økinum hevur skrivliga váttað, at økið kann nýtast til bóltvøll,

Økið tilsamans at keypa frá Búnaðargrunninum er uml. 1.030 $m^2$. Keyp av lendi verður mett at kosta kr. 135.000. Mælt verður til at fíggja lendið av konto 6175, Projekt kt. L61020 Keyp av jørð.

Hjáløgd skjøl: Matrikulkort j. nr. 16/01498-13
Støðumynd j. nr. 16/01498-14

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at taka undir við staðsetingini og at beina málið í fíggjarnevndina til keyp av lendi.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. februar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

# 87/17 Umsókn um fíggjarligan stuðul til ábøtur á spæliplássið á Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.02.2017 | 30/17 | 16/02938-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 38/17 | 16/02938-5 |
| 3 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 87/17 | 16/02938-5 |

**Málslýsing:**
**Útvegan av lendi til spæli- og fríøki**

14. juli 2016 kemur umsókn frá eigarafelagnum undir Borgarhálsi á Velbastað, um at kommunan keypir uml. 800 $m^2$ burturav matr. nr. 50a, hagaparturin Fungagimbrar á Velbastað.

Økið er landsjørð og ogn hjá Búnaðargrunninum.

Økið er í almennu byggisamtyktini fyri Velbastað merkt sum lutur **F**: Alment frítíðarøki

Partur av økinum matr. nr. 50 ak, 150 $m^2$, varð fyri árum síðani keyptur til spælipláss, og hevur verið nógv brúkt.

Verandi spæliútbúnaður er uml. 20 ára gamal, og ætlan er m.a. at keypa og seta upp nýggja spæliborg, reiggjur, og balansubreytir v.m.

Mettur kostnaður at keypa lendið er 101.960 kr. Peningurin verður veittur av kt. 6175, Projekt kt. L61020 Keyp av jørð.

Hjálagt: Matrikulkort j. nr. 16/02938-6
Staðsetingarkort j.nr. 16/02938-8

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at keypa lendið, og beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. februar 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Samtykt.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Einmælt samtykt.

# 88/17 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.02.2017 | 47/17 | 17/00303-1 |
| 2 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 88/17 | 17/00303-1 |

**Málslýsing:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið. Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 22. februar 2017:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Framlagt og einmælt góðkent.

## 89/17 Fíggjarætlan 2017

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 166/16 | 16/01873-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 153/16 | 16/01873-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 30.05.2016 | 33/16 | 16/01873-1 |
| 4 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.06.2016 | 42/16 | 16/01873-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 01.06.2016 | 68/16 | 16/01873-1 |
| 6 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 07.06.2016 | 45/16 | 16/01873-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2016 | 167/16 | 16/01873-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 171/16 | 16/01873-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 07.09.2016 | 300/16 | 16/01873-1 |
| 10 Býráðsfundur | 12.09.2016 | 238/16 | 16/01873-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 09.09.2016 | 306/16 | 16/01873-1 |
| 12 Trivnaðarnevndin | 26.09.2016 | 42/16 | 16/01873-1 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.09.2016 | 222/16 | 16/01873-1 |
| 14 Vinnunevndin | 03.10.2016 | 35/16 | 16/01873-1 |
| 15 Tekniska nevnd | 11.10.2016 | 91/16 | 16/01873-1 |
| 16 Tilbúgvingarnevndin | 06.10.2016 | 1/16 | 16/01873-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 05.10.2016 | 240/16 | 16/01873-1 |
| 18 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 06.10.2016 | 54/16 | 16/01873-1 |
| 19 Fíggjarnevndin | 19.10.2016 | 308/16 | 16/01873-1 |
| 20 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 284/16 | 16/01873-1 |
| 21 Trivnaðarnevndin | 17.10.2016 | 49/16 | 16/01873-1 |
| 22 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 260/16 | 16/01873-1 |
| 23 Fíggjarnevndin | 25.10.2016 | 363/16 | 16/01873-1 |
| 24 Fíggjarnevndin | 14.11.2016 | 366/16 | 16/01873-1 |
| 25 Býráðsfundur | 16.11.2016 | 290/16 | 16/01873-1 |
| 26 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 318/16 | 16/01873-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 29.11.2016 | 399/16 | 16/01873-1 |
| 28 Fíggjarnevndin | 18.01.2017 | 12/17 | 16/01873-1 |
| 29 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 89/17 | 16/01873-1 |
| 30 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 57/17 | 16/01873-1 |

**Málslýsing:**
Uppskot á greinastøði til fíggjarætlanina 2017 verður lagt fram.

**Tilmæli:**

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við uppskotinum.

**Ískoyti:**
Við støði í samtykt fíggjarnevndarinnar 11. mai 2016 og samtyktu tíðarætlanini í máli 16/01224 - FÆ 2017 – tíðarætlan skulu faknevndirnar viðgera uppskot til rakstrar- og íløguætlan fyri 2017. Málið verður lagt fyri mentamálanevndina at umrøða og kemur til aðru umrøðu á fundi í juni. Í samtyktini hjá fíggjarnevndini er lagt upp til, at grein 4 og 5 fáa eina framskriving á 1,8%. Hetta svarar til áleið lønarhækkingar í 2017, sum eru uml. 1,9%.
Hjálagt (skjølini koma á nevndarportalin mánadagin) er yvirlitsskjal (skjal 1) fyri grein 4 (fólkaskúlaøkið) og grein 5 (mentanar- og ítróttaøkið), umframt viðmerkingar til einstøku konturnar, ið greina týðandi viðurskifti í sambandi við uppskotið, umframt nærri frágreiðing um møguligar upp- og niðurraðfestingar hjá nevndini at umrøða og meta um.

Á nevndarfundinum fara trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin at gjøgnumganga uppskotið til fíggjarætlan fyri ymisku konturnar. Uppskotini eru m.a. gjørd við støði í fíggjarætlan fyri 2016, mál- og avriksavtalum fyri grein 5 stovnarnar, dialogfundum við leiðslurnar vm. Talan er um stovnar vm. við ymiskum virksemi og ymiskum stevnumiðjum. Í sambandi við fíggjarætlan er týdningarmikið at gera sær greitt, hvussu mett verður um, í hvønn mun stovnar náa settum stevnumiðjum og hvussu til ber at menna indikatorar fyri tað og í øðrum lagi, hvat krevst fyri at gera tað enn betri innan bæði tænastu og rakstur og innan hvønn tíðarkarm!

Umsitingin fer síðani við støði í viðgerðini og viðmerkingunum hjá nevndini á fundinum at gera enn eitt dagført uppskot til nevndarviðgerð í juni. Hareftir verða uppskotini løgd inn í samlaðu fíggjarætlanina, ið aftur kemur til nevndarviðgerð í heyst áðrenn endaligu viðgerðina í býráðnum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til:
a). at umrøða uppskotið til fíggjarætlan fyri einstøku konturnar hjá stovnum og øðrum virksemi og
b). at umrøða verandi ella nýggj stevnumið fyri einstøku økini innan rakstur og íløgur,
c). at umrøða møguligar umraðfestingar innan karmin fyri einstøku greinarnar og hvussu hesar kundu verið framdar.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Umrøtt.

**Trivnaðarnevndin 30. mai 2016:** Umrøtt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. juni 2016:** Útsett.

**Tekniska nevnd 01. juni 2016:** Umrøtt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2016:** Umrøtt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 07. juni 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti**
Hjálagt sum fylgiskjal í nevndarportalinum er frágreiðing viðv. grein 3 – Børn og ung. Á fundinum verður framløga um viðurskiftini sum har eru umrødd.

Innan grein 4 og 5 er gjørd nýggj uppseting og dagføring av skjølunum (sí fylgiskjal "Fíggjarætlan grein 4 og 5" og fylgiskjal "Viðmerkingar til einstøku høvuðskonturnar fíggjarætlan 2017" á nevndarportalinum. Á fundinum verður framløga um útvald viðurskifti í skjalinum og annars framhald av viðgerðini og tilmælinum frá fundinum 25. mai 2016.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. Desember 2016.
Tilfar kemur áðrenn fundin.

**Fíggjarnevndin 07. september 2016:** Útsett.

**Ískoyti:**
Arbeitt er við uppskotinum til fíggjarætlan 2017 at leggja fyri fíggjarnevndina. Fortreytirnar fyri uppskotinum er, at skattaprosenti verður verandi á sama støði. Skattaprosentið lækkaði frá 20,25% til 19,75% í 2016. Barnafrádrátturin verður framhaldandi 8.000 kr. Hædd er tikið fyri lønarvøkstri og virksemisbroytingum annars. Í talvuni niðanfyri eru høvuðstølini býtt upp á greinar, tølini eru undantikið Tórshavnar Havn.

**Uppskot á greinastøði 2017**

| | Roknskapur 2015 | Ætlan 2016 | Reg. ætlan juli | Ætlan 2017 | Broyting pct. FÆ16 -FÆ17 | Broyting kr. FÆ16 - FÆ17 | Broyting pct. RFÆ16 -FÆ17 | Broyting kr. RFÆ16 - FÆ17 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Inntøkur** | | | | | | | | |
| Kommunuskattur | 705.075 | 679.818 | 679.818 | 717.766 | 5,6% | 37.948 | 5,6% | 37.948 |
| Felagsskattur | 30.438 | 20.000 | 20.000 | 20.000 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| Húsaleiguskattur | 1.680 | 2.000 | 2.000 | 2.000 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| Skattur av eftirlønarinngjøldum | 101.653 | 106.122 | 106.122 | 106.122 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| DIS, FAS, og frádráttir | 34.301 | 35.507 | 35.507 | 35.507 | 0,0% | 0 | 0,0% | 0 |
| Tíðaravmarkað flyting til eldraøkið | 8.916 | 4.866 | 4.866 | 0 | -100,0% | -4.866 | -100,0% | -4.866 |
| **Inntøkur tilsamans** | **882.063** | **848.313** | **848.313** | **881.395** | 3,9% | **33.082** | 3,9% | **33.082** |
| | | | | | | | | |
| **Rakstur** | | | | | | | | |
| §1 Kommunal fyrisiting | 76.781 | 78.519 | 79.831 | 79.466 | 1,2% | 947 | -0,5% | -365 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 202.275 | 194.192 | 206.021 | 214.177 | 10,3% | 19.985 | 4,0% | 8.156 |
| §3 Børn og ung | 139.802 | 150.338 | 150.415 | 156.590 | 4,2% | 6.252 | 4,1% | 6.175 |
| §4 Undirvísing | 38.641 | 39.096 | 41.200 | 41.310 | 5,7% | 2.214 | 0,3% | 110 |
| §5 Mentan og frítíð | 44.933 | 46.197 | 44.087 | 47.944 | 3,8% | 1.747 | 8,7% | 3.857 |
| §6 Teknisk mál | 115.934 | 111.770 | 119.545 | 112.732 | 0,9% | 962 | -5,7% | -6.813 |
| §7 Kommunal virkir | 54.770 | 56.754 | 61.529 | 59.135 | 4,2% | 2.381 | -3,9% | -2.394 |
| **Rakstur tilsamans** | **673.136** | **676.866** | **702.628** | **711.354** | 5,1% | **34.488** | 1,2% | **8.726** |
| | | | | | | | | |
| **Aðrar útreiðslur** | | | | | | | | |
| Stuðul til rentuútreiðslur | 18.245 | 21.000 | 21.000 | 20.000 | -4,8% | -1.000 | -4,8% | -1.000 |
| Aðrar útreiðslur | 2.295 | 2.000 | 2.185 | 2.029 | 1,5% | 29 | -7,1% | -156 |
| **Aðrar útreiðslur tilsamans** | **20.540** | **23.000** | **23.185** | **22.029** | **-4,2%** | **-971** | **-5,0%** | **-1.156** |
| | | | | | | | | |
| **Úrslit áðrenn rentur** | **188.387** | **148.447** | **122.500** | **148.012** | **-0,3%** | **-435** | **21%** | **25.512** |
| | | | | | | | | |
| **Rentur** | | | | | | | | |
| Rentuútreiðslur | 5.583 | 8.869 | 8.869 | 8.800 | -0,8% | -69 | -0,8% | -69 |
| Rentuinntøkur | 123 | 300 | 300 | 100 | -66,7% | -200 | -66,7% | -200 |
| **Rentu útreiðslur tilsamans** | **5.461** | **8.569** | **8.569** | **8.700** | **1,5%** | **131** | **1,5%** | **131** |
| | | | | | | | | |
| **Úrslit av rakstri** | **182.926** | **139.878** | **113.931** | **139.312** | **0%** | **-566** | **22%** | **25.381** |

Samlaðu inntøkurnar vaksa við 3,9% frá 848 mió. kr. til 881 mió. kr. ella 33 mió. kr. inntøkurnar frá kommunuskatturin hækka 5,6% í mun til fíggjarætlan 2016. Í mun til framrokning frá TAKS 31.08.2016 er løgd ein hækking inn á 2%.

Í uppskotinum til fíggjarætlan 2017 hækka rakstrarútreiðslurnar 5,1% frá 677 til 711 mió. kr. Í mun til reguleraða fíggjarætlan 2016 er broytingin 1,2%. Hædd er tikið fyri lønarhækkan, sum stendur fyri einum munandi parti av vøkstrinum í 2017. Størsta hækkingin annars er innan Almanna- og heilsumál. Játtanin er ætlað heilsu- og umsorganartænastuni. Játtanin á barnaansingar- og undirvísingarøkinum fylgir barnatalinum, sum væntandi er hægri í 2017. Eisini er tikið hædd fyri, at samtykt var at broyta sysktinaavsláttурin í 2016. Hækkingin fyri kommunal virkir skyldast í størstan mun sáttmálabundnum broytingum.

Við hesum fyritreytum er úrslit áðrenn íløgur og avdráttir góðar 139 mió. kr. fyri Tórshavnar kommunu í 2017.

Uppskot til fíggjarætlan fyri Tórshavnar Havn er løgd fyri vinnunevndina. Sambart uppskotinum verða samlaðu rakstrarútreiðslur 27,9 mió. kr. og samlaðu inntøkur 59,6 mió. kr. Nettoútreiðslujáttanin verður 31,6 mió. kr. Íløgujáttanin fyri 2017 er 160 mió. kr.

Sambart kommunstýrislógini § 39 skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.

**Fíggjarnevndin 09. september 2016:** Samtykt at leggja fyriliggjandi uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið.

**Býráðsfundur 12. september 2016:** Framlagt.

**Trivnaðarnevndin 26. september 2016:** Framlagt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. september 2016:** Nevndin staðfestir, at tørvur er á at hækka játtanina til viðlíkahald av bygningum.

**Ískoyti:**
Á fundinum koma trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og mentamálaleiðarin at greiða frá høvuðsspurningum innan grein 3, 4 og 5.

**Vinnunevndin 03. oktober 2016:** Framlagt.

**Mentamálanevndin 05. oktober 2016:** Umrøtt.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 06. oktober 2016:** Nevndin staðfestir, at tørvur er á at hækka játtanina til kloakkir, renovasjón og tyrving umframt at hækka konto 6610 Umhvørvistiltøk o.a. í sambandi við umhvørvispolitikkin.

**Tilbúgvingarnevndin 06. oktober 2016:** Mælir til at játta kr. 880.000,00 til viðlíkahald av bygningum í Nólsoy og Tórshavn. Samtykt at sløkkiliðið ger uppskot til skipan av skorsteinsreinsan í kommununu.

**Tekniska nevnd 11. oktober 2016:** Nevndin staðfestir, at tørvur er á at hækka játtanina til kloakkir, avleiddar íløgur í vegakervið í sambandi við Innkomuvegin, íløgur í vegakervið í vestari parti av býnum í sambandi við Glasir, viðlíkahald av øðrum vegum, íløgur í útbygging av samferðslukervi til súkklubreytir og aðrar tekniskar veitingar hjá kommununi. Víðari vísur nevndin á týdningin av at halda fram við gongdini um orkusparandi tiltøk innan bæði vatn og gøtuljós fyri at tálma framtíðar útreiðslunum.

**Trivnaðarnevndin 17. oktober 2016:** Nevndin vísir til skjal nr. 19 í málinum og mælir til at raðfesta játtan kr. 5,5 mió til fleiri tænastur og tilboð til heilsu- og umsorganartænastuna. Nevndin vísir eisini á skjal nr. 7 í málinum og mælir til, at Lopfjølin heldur fram og játta verða kr. 450.000 til endamálið.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Nevndin mælir til at uppraðfesta dagstovnaøkið við 3-4 mió kr. eitt nú til serstakan fíggjarleist fyri smæstu stovnarnar, smærri bygningstillagingar konta 3214, fyribyrgjandi verkætlan (TÍT), og betra ungdómsklubbavirksemið.

**Ískoyti:**
Viðvíkjandi inntøkum hevur TK fingið dagførd tøl síðani seinasta fund. Uppskot til broytingar sambært dagførdum tølum (sí talvu niðanfyri) er ein framskriving av Kommunuskattinum við 2% í mun til seinastu meting, sum er komin frá TAKS. Grundað á, at gongdin í felagsskattinum seinastu árini hevur verið hækkandi, er ráðiligt at hækka felagsskattin við 2 mió. kr. Afturbering í samband við eldraøkið er sambært tølum frá FMR. Viðvíkjandi rentuútreiðslum, er hædd tikið fyri verandi lánum, 50 mió. kr., sum áður samtyktar og, at helvtin av íløguni í skúlanum av Fløtum verður láni fíggjaður. Harumframt er hædd tikin fyri verandi lága rentustøði.

| | Uppskot 2017 | Dagførd meting 2017 | Broyting |
|---|---|---|---|
| *1.000 kr.* | | | |
| Inntøkur | | | |
| Kommunuskattur | 717.766 | 715.962 | -1.804 |
| Felagsskattur | 20.000 | 22.000 | 2.000 |
| Skattur av eftirlønarinngjøldum | 106.122 | 110.967 | 4.845 |
| DIS, FAS, og frádráttir | 35.507 | 34.972 | -535 |
| Inntøkur tilsamans | 879.395 | 883.901 | 4.506 |
| Rentur | | | |
| Rentuútreiðslur | 8.800 | 6.500 | 2.300 |
| | | | |
| Broyting tilsamans | | | 6.806 |

**Tilmæli**
Fyrisitingarstjórin og fíggjarleiðarin mæla til at taka støðu til fyriliggjandi fíggjarætlan og broytingum sambært niðanfyristandandi. Eisini verður mælt til at taka støðu til nevndarviðgerðirnar.

# Yvirlit

## Høvuðsyvirlit

| **Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlan** | | | | **2017** |
|---|---|---|---|---|
| | | **Rakstrarætlan** | | **Løguætlan** |
| Túsund kr. | | Útreiðslur | Inntøkur | Útreiðslur |
| **§ 1.** | **Kommunal fyrisiting** | **79.466** | **-** | **-** |
| | 11. Felagsútreiðslur | 76.567 | - | - |
| | 18. Almenn starvsfólk v.m. | 2.899 | - | - |
| **§ 2.** | **Almanna- og heilsumál** | **214.177** | **-** | **1.500** |
| | 20. Heilsumál | 18.141 | - | - |
| | 21. Almannamál | 196.036 | - | 1.500 |
| **§ 3.** | **Børn og ung** | **156.590** | **-** | **-** |
| | 24. Mentan | 7.772 | - | - |
| | 26. Barnaansing | 148.818 | - | - |
| **§ 4.** | **Undirvísing** | **41.310** | **-** | **80.075** |
| | 23. Útbúgving og gransking | 41.310 | - | 80.075 |
| **§ 5.** | **Mentan og frítíð** | **47.944** | **-** | **22.500** |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | 23. Útbúgving og gransking | 11.161 | - | - |
| | 24. Mentan | 36.783 | - | 22.500 |
| **§ 6.** | **Teknisk mál** | **112.732** | **-** | **8.000** |
| | 11. Felagsútreiðslur | 50.119 | - | 3.000 |
| | 24. Mentan | 2.917 | - | - |
| | 30. Umhvørvi | 18.201 | - | 5.000 |
| | 38. Samferðsla og samskifti | 41.495 | - | - |
| **§ 7.** | **Kommunal virki** | **27.510** | **-** | **160.000** |
| | 30. Umhvørvi | 19.275 | - | - |
| | 31. Tilbúgving | 9.394 | - | - |
| | 37. Handil og vinna annars | 5.217 | - | - |
| | 38. Samferðsla og samskifti | -6.376 | - | 160.000 |
| **Tilsamans** | | **679.729** | **-** | **272.075** |
| § 20. | 22. Íbúðarmál | 20.000 | - | - |
| § 20. | 50. Rentur | 8.700 | - | - |
| § 20. | 52. Skattir og avgjøld | 2.030 | 881.395 | - |
| Tilsamans | | 710.459 | 881.395 | 272.075 |
| **Yvirskot** | | **-** | **170.936** | **-** |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | | **-** | **-101.139** | **-** |
| § 25. | 62. Afturgjald av skuld | 17.939 | - | **-** |
| **Bruttokassaúrslit** | | **17.939** | **-101.139** | **-119.078** |
| Fígging: | | | | |
| § 25. | 64. Útvegan av gjaldføri | - | 119.078 | **-** |
| Fígging íalt: | | - | 119.078 | 119.078 |
| **Samanlagt** | | **17.939** | **17.939** | **-** |

## Broytingaruppskot:

| Tekstur | Deild | | | Broyting |
|---|---|---|---|---|
| ***Fíggjarnevndin:*** | | | | |
| -Avgjald av kapitaleftirlønum, nýggj meting FMR | 20710 | | | 4.845.000 |
| -DIS, FAS og frádráttir, nýggj meting FMR | 20801 | | | -535.000 |
| -Kommunuskattur, nýggj inntøkumeting | 20501 | | | -1.804.000 |
| -Felagsskattur, nýggj meting | 20601 | | | 2.000.000 |
| -Rentuútreiðslur, nýggj meting | 20301 | | | 2.300.000 |
| | | | | |
| **Inntøkur íalt** | | | | **6.806.000** |
| | | | | |
| **Tekstur** | **Deild** | **Rakstur** | **Íløgur** | **Broyting** |
| | | | | |
| ***Trivnaðarnevndin:*** | | | | |
| -Heilsu og umsorganart. Lønarregulering | 2700-2799 | 1.232.000 | | 1.232.000 |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| | | | | |
| ***Náttúru- og umhvørvisnevndin:*** | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| ***Mentamálanevndin:*** | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| ***Tekniska nevnd:*** | | | | |
| -Brandstøðin, rætting í lønum | 7210 | -369.000 | | -369.0000 |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| **Útreiðslur íalt** | | **869.000** | **0** | **869.000** |
| **Broyting íalt** | | **869.000** | | **5.937.000** |

**Fíggjarnevndin 19. oktober 2016:** Umrøtt.

**Fíggjarnevndin 25. oktober 2016:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 14. november 2016:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til fíggjarætlan við niðanfyristandandi broytingum og við teirri viðmerking, at meirinntøkurnar fyri fíggjarárið 2016 skulu játtast til arbeiðið at byggja Skúlan á Fløtum:

| **Tekstur** | **Deild** | | | **Broyting** |
|---|---|---|---|---|
| ***Fíggjarnevndin:*** | | | | |
| -Avgjald av kapitaleftirlønum, nýggj meting FMR | 20710 | | | 4.845.000 |
| -DIS, FAS og frádráttir, nýggj meting FMR | 20801 | | | 1.717.000 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| -Kommunuskattur, nýggj inntøkumeting | 20501 | | | 7.287.000 |
| -Felagsskattur, nýggj meting | 20601 | | | 2.000.000 |
| -Rentuútreiðslur, nýggj meting | 20301 | | | 2.300.000 |
| | | | | |
| **Inntøkur íalt** | | | | **18.149.000** |
| | | | | |
| **Tekstur** | **Deild** | **Rakstur** | **Íløgur** | **Broyting** |
| | | | | |
| -Fyrisiting, lønarregulering | 1110-1313 | 82.000 | | 82.000 |
| | | | | |
| -Heilsu og umsorganart. lønarregulering | 2700-2799 | 2.377.000 | | 2.377.000 |
| -Brandstøðin, rætting í lønum | 7210 | -149.000 | | -149.000 |
| **Útreiðslur íalt** | | **2.310.000** | **0** | **2.310.000** |
| **Broyting íalt** | | **6.748.000** | | **15.839.000** |

| Deild | Tekstur | Upphædd | Nevnd |
|---|---|---|---|
| **Rakstur** | | | |
| 6110 | Umsiting av røkt og bygningum | 5.000.000 | Byggi- og býarskipanarnevndin 30.09.16 |
| 6810 | Kloakkir | 4.000.000 | Náttúru- og umhvørvisnevndin 06.10.16 |
| 7110/8111 | Renovatión, tyrving og reinhald | 2.000.000 | Náttúru- og umhvørvisnevndin 06.10.16 |
| 6610 | Umhvørvispolitikkur | 1.000.000 | Náttúru- og umhvørvisnevndin 06.10.16 |
| 7210 | Viðlíkahald av bygningum í Nólsoy og Tórshavn | 500.000 | Tilbúgvingarnevndin 06.10.16 |
| 2721 | Náttarvakt, reingerð og uppraðfestingar | 7.730.000 | Trivnaðarnevndin 17.10.16 |
| 3215 | Endurgjald vegna longri sjúkralegu | 1.000.000 | Mentamánanevndin 17.10.16 |
| 7316 | Hugskotið | 500.000 | |
| 7311 | Ferðavinnan | 500.000 | |
| | Lopfjølin | 450.000 | |
| | Fíggjarligt fríðpláss | -500.000 | |
| | Ansingarøki | 2.800.000 | |
| **Løgur** | | | |
| 8175 | Útreiðslur til innkomuveg | 5.000.000 | Teniska nevnd 11.10.16 |
| | Skjótibreyt | 3.800.000 | |
| | Skúlin á fløtum | -<br>37.799.800 | |
| | **Íalt** | **-4.019.800** | |
| 20501 | Lække skattin frá 19,75% til 19,00% | 29.231.000 | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **íalt** | **25.211.200** | |
| | Avlop FÆ2017, sambært broytingaruppskoti 14.11.16 | 25.211.200 | |
| | **At fíggja** | **0** | |

Ein minniluti, Jógvan Arge, viðmerkir, at tað er ósiður, at fráfarandi stýri eftir býráðsval ger fíggjarætlan og ásetur skattaprosent v.m., ið bindur nýggja stýrið, og minnilutin tekur støðu til fíggjarætlanina á seinni fundi.

**Býráðsfundur 16. november 2016:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti at taka undir við meirilutanum í fíggjarnevndini og fer fíggjarætlanin soleiðis samtykt til 2. viðgerð.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Jógvan Arge, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Bogi Andreasen greiddu ikki atkvøðu.

**Ískoyti:**
Niðanfyri eru uppskot til broytingar til fíggjarætlaruppskotið sum samtykt omanfyri:

Kontur 2720-2799: Nýggir lønarsáttmálar eru í heyst gjørdir við flestu fakfeløg innan økið, og sum ávirkar fíggjartørvin fyri 2017. Omanfyri er lagt upp fyri lønarregulering fyri fýra tey størstu av fakfeløgunum svarandi til tkr. 2.377. Ein sáttmáli er síðani komin aftrat, svarandi til tkr. 139.

Konta 2722 Tilboð: Inntøkumetingin fyri tilboð er tillagað staðfestu inntøkunum í 2016.

Konta 2731 Gjøld fyri røktartænastur: Inntøkumetingin er nærri tillagað staðfestu inntøkunum í 2016.

Konta 2761 Leiga: Inngingin er nýggjur leigusáttmáli fyri 2017-2018.

| **Broytingar Heilsu- og umsorganartænastan** | Tkr. |
|---|---|
| Lønarregulering konta 2720-2799 | 139 |
| Broytt inntøkumeting konta 2722 Tilboð | -2.000 |
| Broytt inntøkumeting konta 2731 Gjøld fyri røktartænastur | -600 |

| | |
|---|---|
| Leigugjald konta 2761 | 266 |
| | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin mælir til at taka undir við nevndu broytingum.

**Fíggjarnevndin 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og 3 ímóti við hesum broytingum:

| Deild | Tekstur | Upphædd |
|---|---|---|
| Rakstur | | |
| 3313 | Klubb 188 | 100.000 |
| 3316 | Úthangið | 100.000 |
| | Klubb 160 | 300.000 |
| 5365 | Stuðul til ítrótt | 300.000 |
| 5717 | Ítróttaranlegg | 300.000 |
| 6110 | Umsiting og røkt av bygningum | -1.000.000 |
| 20301 | Rentu útreiðslur | -350.000 |
| 20910 | Aðrar útreiðslur | -29.000 |
| Løgur | | |
| 6275 | Fríðkan av býnum | -2.000.000 |
| 6575 | Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin | 2.000.000 |
| 8175 | Gamli Velbastaðvegur (Vinnuøki Vika) | 2.000.000 |
| 8175 | Stórheygg/Gerðisbreyt á Velbastað | 800.000 |
| 8175 | Ervaveg á Velbastað | 800.000 |
| 8175 | Útreiðslur til innkomuveg | -1.000.000 |
| | Íalt | 2.321.000 |

Eisini samtykt at áseta skattaprosenti til 19% og barnafrádráttin til 8.000 kr.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrun Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen

Ímóti atkvøddu:
Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal

Viðmerking frá Tjóðveldi
Tjóðveldi atkvøður ímóti fíggjarætlanini 2017, tí skatturin verður lækkaður samstundis sum raksturin hækkar sløk 10%. Hetta fer at elva til størri skuldarbinding við lántøkum, skulu neyðugu ætlaninar fremjast. Víst verður eisini á, at íløguætlanin 2017 samstundis er lækkað nærum 35% niður í 85 mió kr.

**Ískoyti:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass skjóta upp at gera niðanfyristandandi broytingar í íløguætlanini fyri 2017:

| Uppskot til broyting av íløguætlan | | |
|---|---|---|
| | | |
| 5175 | Musikkskúlin | 15.300.000 |
| 2775 | Eldrarøkt | 2.000.000 |
| 4175 | Dagføring skúlar | -2.000.000 |
| 5775 | Ítróttarannlegg - Svimjihøll | -3.500.000 |
| 5775 | Ítróttarannlegg - Skjótibreyt | -3.800.000 |
| 6175 | Umsiting og røkt av fastari ogn (løgur) | -4.000.000 |
| 8175 | Innkomuvegur | -4.000.000 |

**Fíggjarnevndin 18. januar 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, taka undir við omanfyristandandi broytingum í íløguætlanini fyri 2017 og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við uppskotinum og mælir býráðnum til at halda fast við samtyktu fíggjarætlanina fyri 2017.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Atkvøtt varð um tilmæli frá Anniku Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrinu Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Boga Andreasen og Bergun Kass um niðanfyristandandi broytingar í íløguætlanini fyri 2017:

| Konta | Heiti | Broyting |
|---|---|---|
| 5175 | Musikkskúlin | 15.300.000 |
| 2775 | Eldrarøkt | 2.000.000 |
| 4175 | Dagføring skúlar | - 2.000.000 |
| 5775 | Ítróttarannlegg – Skjótibreyt | - 3.800.000 |
| 6175 | Umsiting og røkt av fastari ogn (løgur) | - 7.500.000 |
| 8175 | Innkomuvegur | - 4.000.000 |

ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Gunnvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass

Ímóti atkvøddu:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

**Býráðsfundur 02. mars 2017:**Samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurdsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

# 90/17 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í eldranevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 90/17 | 17/00812-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.
*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.
*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Sambært § 28 í kommunustýrisskipanini er ásett um eldranevnd:

**2. petti**. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Heilsu- og umsorganartænasta

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu

| Sum fastir limir: | Sum varalimir: |
|---|---|
| Bergun Kass | Gunvør Balle |
| Turið Horn | Marin Katrina Frídal |
| Bogi Andreasen | Jákup Dam |
| Bjørghild Djurhuus | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Annfinn Brekkstein |

# 91/17 Val av 5 limum og 5 tiltakslimum í vinnunevndina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 8/16 | 16/04611-1 |
| 2 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 91/17 | 16/04611-1 |

**Málslýsing:**
Sambært §§ 28 og 29 í kommunustýrislógini er ásett:

**§ 28.** Settar skulu verða ein fíggjarnevnd og ein ella fleiri aðrar fastar nevndir til beinleiðis fyrisiting av kommunalum viðurskiftum. Nevndirnar skipa seg sjálvar, sbr. tó § 38, stk. 1, 2. pkt.

*Stk. 2.* Val av limum og tiltakslimum til fastar nevndir fer fram beint eftir, at borgarstjóri og varaborgarstjóri eru valdir. Valið fer fram eftir lutfalsvalháttinum sambært § 3.

**§ 29.** Allir limir í føstu nevndunum skulu vera kommunustýrislimir.

*Stk. 2.* Kommunustýrisskipanin skal áseta nærri reglur bæði um manning og málsøki hjá teimum føstu nevndunum. Talið á nevndarlimum skal vera stakt, og tað skal vera minni enn helmingurin av øllum kommunustýrislimunum.

Sambært § 29 í kommunustýrisskipanini er ásett:

**2. petti**. Nevndin fyrisitur hesi málsøki:
1. Tórshavnar havn 2. Smábátahavn 3. Vinnubygningar og vinnuøki 4. Oljuvinnu
5. Fiskivinnu 6. Ferðavinnu 7. Cruisevinnu 8. Handils- og tænastuvinnu
9. Vinnunýskapan 10. Vinnustrategi 11. Hýruvognsloyvi.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 5 limir í nevndina, umframt 5 tiltakslimir

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Bogi Andreasen | Marin Katrina Frýdal |
| Gunnvør Balle | Turið Horn |
| Jákup Dam | Bergunn Kass |
| Helena Dam á Neystabø | Heðin Mortensen |
| Bjørghild Djurhuus | Halla Samuelsen |

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Bogi Andreasen | Marin Katrina Frýdal |
| Gunnvør Balle | Turið Horn |
| Jákup Dam | Bergunn Kass |
| Helena Dam á Neystabø | Heðin Mortensen |
| Annfinn Brekkstein | Halla Samuelsen |

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:45**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Olsen | Helena Dam á Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Annfinn Brekkstein |
| Jákup Dam | Marin Katrina Frýdal | Bjørghild Djurhuus |
| Gunvør Balle | Turið Horn | Bergun Kass |
| | Heðin Mortensen | |